FØROYA KÆRUSTOVNUR
VINNUKÆRUNEVNDIN

Tórshavn: 11. januar 2019
J.Nr.: 18/00248
(at tilskila í svari)
Viðgjørt: AH/pj

Sókn Advokatar
J.H.Schrøtersgøta 7
Postsmoga 258
110 Tórshavn

Tils.: Eyðbjørn Larsen, adv.

Viðvíkjandi kæru til Vinnukærunevndina um avgerð hjá Kappingarráðnum.

Vinnukærunevndin hevði fund 2. januar 2019, har kæran frá Fuglafjarðar kommunu um avgerð hjá Kappingarráðnum frá 11. oktober 2018 um loðsflutning og sleipivirksemi í Fuglafirði varð viðgjørd og avgjørd.

Vinnukærunevndin staðfestir avgerðina hjá Kappingarráðnum, at Fuglafjarðar kommuna hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini við at forða P/F Faroe Agency at útinna loðsflutning.

Hinvegin metir Vinnukærunevndin, at Kappingaráðið hevur ikki lyft prógvbyrðuna fyri at Fuglafjarðar kommuna hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini við at forða P/F Faroe Agency at útinna sleipitænastur og við at seta umsitingarliga forðing fyri P/F Faroe Agency og gevur tí Fuglafjarðar kommunu viðhald í hesum partinum av kæruni.

Avgerðin verður hjáløgd send tykkum.

Vinarliga

Anja Hovgaard, stjóri

Avgerð
tikin av Vinnukærunevndini 2. januar 2019
Kærarin: Fuglafjarðar kommuna
Evni: Kappingarlógin

Fuglafjarðar kommuna hevur kært avgerð hjá Kappingarráðnum frá 11. oktober 2018 um, at kommunan hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini.

Samlað málslýsing er at finna aftast í hesum skjalinum.

Fundur í Vinnukærunevndini
Tann 2. januar 2019 hevði Vinnukærunevndin fund. Á fundinum møttu partarnir og løgdu fram teirra sjónarmið soleiðis, sum tey áður eru borin fram skrivliga fyri nevndini.

Fyri kæraran møttu Eyðbjørn Larsen, advokatur, Sonni í Horni, borgarstjóri, Rólant Højsted, havnameistari, Kristian Petersen, formaður í vinnunevndini og Jákup Frants Larsen, kommunustjóri.

Fyri Kappingarráðið møttu Terji Sigurðsson, deildarleiðari, Sigurd Rasmussen, fulltrúi og Rúni Niclassen, fulltrúi.

Fyri P/F Faroe Agency møttu Óla Jákup Kristoffersen, advokatur, Vivi Davidsen, fíggjarleiðari og Karl-Erik Reynheim, stjóri.

Avgerð hjá Vinnukærunevndini

Áheitan um avvísing
Í telduposti frá 23. november 2018 hevur Kappingareftirlitið heitt á Vinnukærunevndina um at avvísa kæruna vísandi til, at kæran er ikki komin fram rættstundis.

Kappingareftirlitið vísir m.a. á, at tey í gjøgnumgongd av tilfarinum, sum Eyðbjørn Larsen, advokatur hevur sent við kæruni, kunnu staðfesta, at skjal 14 manglar. Kappingareftirlitið vísur á, at advokaturin var klárur yvir hetta longu, tá ið kæran var send Vinnukærunevndini tann 20. november 2018. Hóast hetta so er skjalið framvegis ikki sent teimum.

Kappingareftirlitið metir, at skjal 14 er ein partur av klaguni, serliga tí talan er um eitt yvirlit yvir manglar og skeivleikar í avgerðini hjá Kappingarráðnum, sum skulu stuðla undir at Vinnukærunevndin antin ógildar avgerðina vegna vantandi grundgeving, ella at fáa Vinnukærunevndina at heimvísa málið til nýggja viðgerð vegna málsviðgerðarfeilir.

Víst verður á, at avgerð skal verða tikin í málinum innan 6 vikur, sbrt. §27, stk. 5 í kappingarlógini, so tað er avmarkaðir møguleikar at leingja freistir uttan at tað rakar møguleikan hjá øðrum at ummæla málið.

Av omanfyri nevndu orsøkum metir Kappingareftirlitið, at kæran er ikki komin fram rættstundis, tí freistin gekk út tann 21. oktober 2018. Mælt verður tí til, at Vinnukærunevndin avvísur kæruna.

Umboð kærarans, Eyðbjørn Larsen, advokatur greiður í telduposti frá 23. november 2018 frá, at skjal 14 bara var eitt fylgiskjal ella stuðulsskjal, sum var avgerðin hjá Kappingarráðnum, har hann

setti kommentarfelt við viðmerkingum inn til einstøk punkt fyri greidleika skuld. Skjalið (viðmerkingar teirra í skjalið) misfórst í skipanini, tá sendast skuldi, men viðmerkingarnar eru innihildnar í sjálvari kæruni, so biðið verður um, at sæð verður burtur frá hesum skjalinum, sum ikki vildi lagt nakað nýtt til sjálvt kæruskrivið.

Í telduposti seinni sama dag kemur kæruumboðið við fleiri viðmerkingum til áheitanina.

Hann vísur m.a. á, at sambært fyrisitingarrættinum eru ongi krøv til innihald ella form á kæru til hægri myndugleika, uttan so at hetta er ásett í lóg.

Harvið er greitt, at kærast kann við teim sakarkrøvum, sakargrundum, tí innihaldi, vavi og viðløgdum skjølum, ið kærarin velur at gera galdandi. Talan er jú um rekurs, har kærumyndugleikin hevur myndugleika til at royna kærda málið til fulnar, so at røtt avgerð kan verða tikin.

Hvørki kappingarlóg ella lóggávan um Vinnukærunevndina seta krøv til innihaldið í kærum. Einans krevur kunngerðin um Vinnukærunevndina í § 7, stk. 1, at kæra skal vera skrivlig.

Í framhaldi av hesum, og vísandi til tað faktum, at skrivlig kæra er latin inn og móttikin hjá Kærustovninum dagin áðrenn freistina, tvs. tann 20. November 2018, verður heitt á Kærustovnin/Vinnukærunevndina um at síggja burtur frá niðanfyri nevndu roynd hjá Kappingareftirlitinum at forða fyri, at málið verður roynt, heldur enn at gera viðmerkingar til innihaldið í kæruni.

Vinnukærunevndin skal viðmerkja, at sambært § 28, stk. 2 í kappingarlógini kann kæra verða skotin inn fyri Vinnukærunevndina innan 4 vikur frá tí, at avgerðin er kunngjørd tí, sum hon viðvíkur. Í hesum føri er avgerðin hjá Kappingareftirlitinum viðvíkjandi loðsflutningi og sleipivirksemi í Fuglafirði dagfest 11. oktober 2018. Avgerðin er tó ikki send kæruumboðnum fyrr enn 24. oktober 2018. Kæran er innkomin 20. november 2018 og er sostatt innkomin innan fyri freistina á 4 vikur.

Krøv eru ikki ásett í kappingarlógini til kæruna. Og í kunngerð um vinnukærunevnd er einasta krav, at kæran skal vera skrivlig, jbr. § 7, stk. 1.

Tá skrivlig kæra er innlatin rættstundis, metir Vinnukærunevndin, at grundarlag er ikki fyri at avvísa kæruni, sum tí verður tikin til viðgerar.

§ 2, stk. 2 í kappingarlógini

Sambært § 2, stk. 2 í kappingarlógini eru reglurnar í kapitli 2. og 3. í lógini ikki galdandi, um ein kappingaravmarking er ein beinleiðis ella neyðug fylgja av almennari regulering.

Sambært viðmerkingunum er endamálið við § 2, stk. 2 at tryggja, at politiskt ásettar reguleringar og avgerðir, tiknar við heimild í lóggávu, her uppi í reglur um ikki-lógarásettar uppgávur hjá kommunum (Kommunufullmaktin), ikki skulu kunna gerast ógyldugar av kappingarmyndugleikanum við tað, at hesar reguleringar og avgerðir kunnu hava onnur samfelagslig atlit enn atlit til kappingina.

Sambært § 2, stk. 4 skal Kappingarráðið seta fram fyrispurning til landsstýrismannin, sum varðar av viðkomandi regluverki og er tað landsstýrismaðurin, ið ger av, hvørt ein kappingaravmarking er fevnd av stk. 2.

Í hesum føri hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið viðgjørt spurningin og er niðurstøðan, at tað ber ikki til at staðfesta, at ein kappingaravmarking gongur greitt og eyðsýnligt fram av lóggávuni. Ráðið staðfestir eisini, at kommunan hevur ikki ásett kappingaravmarking.

Vinnukærunevndin hevur ikki heimild at meta um avgerðina hjá Landsstýrismanninum og leggur tí til grund at talan er ikki um eina kappingaravmarking, sum er ein beinleiðis ella neyðug fylgja av almennari regulering.

§ 11, stk. 1 í kappingarlógini
Sambært § 11, stk. 1 í kappingarlógini er ikki loyvt einum ella fleiri fyritøkum at misnýta eina ráðandi marknaðarstøðu.

Í viðmerkingunum til hesa grein í kappingarlógini verður m.a. sagt, at: *"Talan er um eina ráðandi støðu, tá ein fyritøka hevur eina so ráðandi búskaparliga støðu, at fyritøkan hevur møguleika at forða fyri munagóðari kapping á umrødda marknaðinum, av tí at nevnda støða gevur fyritøkuni møguleika fyri óheftum atburði mótvegis kappingarneytum, viðskiftafólki og í síðstu atløgu brúkarunum."*

Tað er Kappingarráðið, sum hevur prógvbyrðuna fyri, at talan er um ráðandi støðu og at hon verður misnýtt.

Sambært Kappingarráðnum er misnýtslan tann, at Fuglafjarðar kommuna
- síðan apríl 2014 hevur brúkt hesa støðu at forða P/F Faroe Agency at útinna tænastur á viðkomandi marknað fyri loðsflutning í Fuglafirði.
- síðan 2014 hevur brúkt hesa støðu til at forða P/F Faroe Agency at útinna tænastur á viðkomandi marknað fyri sleipitænastur í Fuglafirði.
- síðan 2016 hevur brúkt hesa støðu til at seta umsitingarliga forðing fyri, at P/F Faroe Agency kundi útinna tænastur á viðkomandi marknað fyri sleipitænastur í Fuglafirði.

Vinnukærunevndin metir, at kommunan sambært loðslógini hevur veitingarskyldu bæði tá tað snýr seg um loðs og um loðsbát.

Í hesari meting er dentur lagdur á svar frá uttanríkis- og vinnumálaráðnum frá 28. september 2018, at veitingarskyldan fevnir um bæði loðs og loðsbát. Av sama skrivi framgongur, at loðsstøðin hevur ábyrgdina av, at krøvini sambært lóggávuni verða hildin og skal mótvegis eftirlitinum, Sjóvinnustýrinum, prógva, at tey settu krøvini verða yvirhildin. Hetta er galdandi uttan mun til, um kommunan sjálv røkir uppgávuna, ella hevur gjørt avtalu við ein annan um at røkja uppgávuna. Sagt verður eisini, at talan má vera um eina skipan, sum loðsstøðin/kommunan hevur gjørt, og ikki ein privatur, men í tí sambandi skal vera ansað eftir, at minst møguligt inntriv verður gjørd í kappingina.

Kommunan hevur rætt til at skipa loðsingina og hevur rætt at krevja, at veitarar av loðstænastum ganga inn í eina loðsskipan hjá kommununi, sí í hesum sambandi teldupost frá uttanríkis- og vinnumálaráðnum frá 20. desember 2018.

Fuglafjarðar kommuna hevur tó ikki egnan loðsbát, hevur ikki bjóðað tænastuna út og hevur heldur ikki ásett skrivligar mannagongdir fyri val av loðsbáti.

Vinnukærunevndin metir, at tá kommuna ikki á greiðan hátt hevur skipað loðstænastuna og við støði í, hvussu hon útinnur virksemi, má útgangsstøðið vera, at ynski hjá skipunum um ávísan veitara verður gingið á møti.

Kappingarráðið hevur víst á, hvussu nógv skip, ið P/F Faroe Agency umboðar, hava havt brúk fyri loðsing og sleipitænastum og hvussu ofta P/F Faroe Agency hava fingið loyvi til at flyta loðsin, ávikvíst sleipa skipini. Talvurnur stuðla pástandinum hjá Kappingarráðnum, at P/F Faroe Agency bert í hendingaførum hava flutt loðsin, tá skip, sum P/F Faroe Agency umboðar, hava havt tørv á loðsi, tó so, at felagið í 2018 hevur útført hesa uppgávu í størri mun enn undanfarnu árini. Fyri sleipitænastur hevur P/F Faroe Agency havt uppgávuna í størri mun enn viðvíkjandi loðsing, og hevur í 2014 og 2018 havt allar sleipiuppgávurnar, tá skip hjá felagnum hava havt tørv á sleiping.

Harafturat kemur, at hóast samtyktin hjá Vinnunevndini í Fuglafjarðar kommunu frá 2014 at staðbundin fyritøka skuldi verða fyrsta val, er strikað, stuðlar teldupostur frá havnameistararnum frá 4. apríl 2018, at Fuglafjarðar havn framhaldandi velur at brúka staðbundna veitaran, hóast P/F Faroe Agency ynskir at teirra bátur verður brúktur. Samtyktin hjá kommununi at fríttstilla havnarmeistaran stuðlar somuleiðis pástandinum hjá Kappingarráðnum, at kommunan misnýtir sína ráðandi støðu.

Vinnukærunevndin ásannar, at kommunan kann hava sakligar orsøkir til at velja annan bát til uppgávurnar t.d. vísandi til responstíðir og logistikkin á fjørðinum og á henda hátt hevði borið til at koppa prógvbyrðuna yvir aftur á Kappingarráðið. Men Fuglafjarðar kommuna hevur ikki skrivligar mannagongdir fyri val av loðsbáti og tí ber ikki til at gjøgnumskoða mannagongdina fyri hvussu val av loðsbáti fer fram í Fuglafjarðar kommunu. Kommunan hevur heldur ikki kunna víst á í einstøku førunum, hví annar bátur enn tann hjá P/F Faroe Agency er valdur til uppgávuna, tá skip sum P/F Faroe Aency umboðar hevur tørv á loðsbáti. Kommunan hevur tí ikki lyft prógvbyrðuni fyri, at hon hevur ikki forðað P/F Faroe Agency at útinna tænastur á viðkomandi marknaði fyri loðsflutningi á Fuglafirði.

Samanumtikið verður tí mett, at Fuglafjarðar kommuna hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini, við at forða P/F Faroe Agency at útinna loðsflutning, tá skip, sum P/F Faroe Agency umboðar, koma og fara av Fuglafirði.

Mett verður, at Kappingareftirlitið hevur ikki lyft prógvbyrðuna fyri, at Fuglafjarðar kommuna hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini við at forða P/F Faroe Agency at útinna sleipitænastur, tá skip, sum P/F Faroe Agency umboðar, koma og fara av Fuglafirði.

Í hesum sambandi er dentur lagdur á, at P/F Faroe Agency í 2017 hevur havt meginpartin av sleipiuppgávunum og í 2018 hevur havt allar sleipiuppgávurnar, tá skip, sum felagið umboðar, hava havt tørv á sleiping.

Viðvíkjandi umsitingarligum forðingum skal viðmerkjast, at tað kann metast sum ein umsitingarlig forðing at biðja um váttan frá reiðarínum í hvørjum einstøkum føri, tá upplýsing um, hvør er umboðsmaður eigur at kunna síggjast í teimum upplýsingum, sum er latin loðsstøðini í samband við at skip skal til bryggju, sí § 5 í kunngerð nr. 153 frá 21. desember 2012 um loðsing, gjøld o.a. Hinvegin er upplýst, at hetta bert er gjørt í trimum førum. Vinnukærunevndin er av teirri fatan, at kravið má vera, at talan er um eina meira regluliga forðing, sum fyrigongur yvir eitt longri tíðarskeið, og metir Vinnukærunevndin tí, at tað er ikki grundarlag fyri at staðfesta, at talan um umsitingarliga forðing, sum kann metast sum brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini.

§ 22, stk. 4 í kappingarlógini

Kærarin ger galdandi, at boðini sambært kærdu avgerðini um at gevast at nýta aðrar veitarar enn P/F Faroe Agency til flutning av kommunalum starvsfólkum samstundis eru at líkna við kravboð um at nýta P/F Faroe Agency. Slíkt er ikki heimilað í § 11, stk. 4, sbr. § 22, ikki grundað, ikki neyðugt og úti av proportiónum í mun til at fremja kapping innan flutning av loðsum, í tann mun tað annars gevur meining at kappast um slíka veiting, sum er partur av veitingarskylduni hjá Fuglafjarðar kommunu sambært lóg.

Vinnukærunevndin viðmerkir, at hon er samd við tí, sum kærarin førir fram, at boð um at selja, men ikki at keypa, kunnu gevast sambært § 22, stk. 1, nr. 3 í kappingarlógini. Vinnukærunevndin metir tó, at boðini um at steðga við at forða P/F Faroe Agency í at útinna loðsflutning í Fuglafirði kunnu ikki javnsetast við kravboð til Fuglafjarðar kommunu um keyp av tænastum. Keyparin er reiðaríið, sum júst ynskir at sleppa at keypa hesa tænastu.

Samanumtikið staðfestir Vinnukærunevndin soleiðis avgerðina hjá Kappingarráðnum, at Fuglafjarðar kommuna hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini við at forða P/F Faroe Agency at útinna loðsflutning.

Hinvegin metir Vinnukærunevndin, at Kappingaráðið hevur ikki lyft prógvbyrðuna fyri at Fuglafjarðar kommuna hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini við at forða P/F Faroe Agency at útinna sleipitænastur og við at seta umsitingarliga forðing fyri P/F Faroe Agency og gevur tí Fuglafjarðar kommunu viðhald í hesum partinum av kæruni.

Hendan avgerð er endalig innan fyrisitingina, men kann innan 8 vikur leggjast fyri Føroya Rætt, jbr. § 28, stk 3 í kappingarlógini.

Til kunningar verður sagt frá, at avgerðin ætlandi verður løgd út á heimasíðu okkara www.fks.fo.

Vinnukærunevndin

Marjun Magnussen, forkvinna

Anja Hovgaard, skrivari

Málslýsing

Fuglafjarðar kommuna hevur kært avgerð hjá Kappingarráðnum um, at kommunan hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini.

Avgerðin hjá Kappingarráðnum

1. Samandráttur

Tann 9. desember 2016 fekk Kappingareftirlitið kunning um viðurskifti í sambandi við loðsflutning og sleipitænastur í Fuglafirði, ið møguliga vóru í stríð við kappingarlógina. Vinnunevndin í Fuglafjarðar kommunu hevði hin 14. apríl 2014 samrykt, at staðbundin fyritøka skuldi verða fyrsta val í sambandi við loðsflutning.

Kappingareftirlitið avgjørdi tann 10. mars 2017 at taka málið upp til viðgerð. Tann 19. april 2017 varð tilmæli um avgerð sent til hoyringar hjá Fuglafjarðar kommunu. Tann 10. mai 2017 kom hoyringssvar frá Fuglafjarðar kommunu við boðum um, at samtyktin var strikað, og at havnarmeistarin var álagdur einans at umbiðja neyðugar tænastur. Kappingareftirlitið metti, at hesi stig gingu teimum ivamálum sum vóru á møti, og avgjørdi tann 12. juni 2017 at niðurleggia málið sbrt. § 20 í kappingarlógini.

Tann 26. februar 2018 fekk Kappingareftirlitið avrit av skrivi, sum Fuglafjarðar kommuna hevði sent P/F Faroe Agency. Í skrivinum verður havnarmeistarin frítt stillaður, tá tað kemur til at umbiðja tænastur. Grundarlagið fyri at niðurleggja málið var nú burtur, og hevur Kappingareftirlitið tí avgiørt at taka málið upp til nýggja viðgerð, sbrt. § 20 í kappingarlógini.

Eftir at hava gjøgnumgingið hvat er farið fram í tíðarskeiðinum frá 2014 til 2018, er Kappingareftirlitið komið til ta niðurstøðu, at Fuglafjarðar kommuna hevur framt brot á § 11, stk. 1íkappingarlógini.

Í fyrsta lagi, hevur Fuglafjarðar kommuna framt mismun millum loðsbátatænastuveitarar við at forða P/F Faroe Agency í at veita loðsbátatænastur í Fuglafirði, til fyrimuns fyri staðbundna fyritøku.

Í øðrum lagi, hevur Fuglafjarðar kommuna framt mismun millum sleipitænastuveitarar við at forða P/F Faroe Agency í at veita sleipitænastur í Fuglafirði, til fyrimuns fyri staðbundna fyritøku.

Í triðja lagi hevur Fuglafjarðar kommuna sett umsitingarligar forðingar fyri P/F Faroe Agency við at krevja, at váttan frá reiðarínum skal fyriliggja, í hvørjum einstøkum føri, tá bátarnir hjá felagnum skulu brúkast til sleip.

1.1. Kærda avgerðin

Kappingarráðið hevur tikið avgerð um, at Fuglafjarðar kommuna hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini:

- við at forða P/F Faroe Agency at útinna loðsflutning, sum nærri lýst í parti 3.2.2.
- við at forða P/F Faroe Agency at útinna sleipitænastur, sum nærri lýst í parti 3.2.2.
- við at seta umsitingarliga forðing fyri P/F Faroe Agency, sum nærri lýst í parti 3.2.2.

Kappingarráðið hevur tikið avgerð um at geva Fuglafjarðar kommunu fylgjandi boð, sbrt. § 11, stk. 4 í kappingarlógini:

- at steðga við at forða P/F Faroe Agency at útinna loðsflutning, tá skip, sum P/F Faroe Agency umboðar, koma og fara av Fuglafirði.
- at steðga við at forða P/F Faroe Agency at útinna sleipitænastur, tá skip, sum P/F Faroe Agency umboðar, koma og fara av Fuglafirði.
- at steðga við at seta krav um at reiðarí, sum P/F Faroe Agency umboðar, skulu vátta um bátarnir hjá P/F Faroe Agency skulu brúkast í sambandi við loðsflutning og sleipitænastur.

2. Málslýsing
2.1. Inngangur
P/F Faroe Agency umboðar fleiri størri russisk reiðarí, sum hava virksemi í føroyskum sjóøki. Í nógv ár umskipaðu russisku fiskiskipini sínar lastir til farmaskip, meðan hesi lógu fyri akker í Nólsoyarfirði.

Føroyska Fiskiveiðueftirlitið hevði leingi ynskt, at russisku umskipingarnar skuldu fara fram við bryggju soleiðis, at betri eftirlit var við virseminum hjá russiskum skipum í Føroyum. Føroyskir og russiskir myndugleikar gjørdu sáttmála um hesi viðurskifti, og kom sáttmálin í gildi tann 1. februar 2010.

Sáttmálin hevði við sær, at nógv russisk fiski- og farmaskip komu til bryggju at umskipa. Fyrstu tíðina var nógv virksemi í Kollafirði og á Sundi, men eisini í Klaksvík og í Fuglafirði vaks virksemið. Í Fuglafirði var oljuterminalur komin, sum kundi lata skipum tungolju, og fekk Fuglafjarðar havn tí eina serstøðu hesum viðvíkjandi.

Støðan viðvíkjandi sleipibátum í Føroyum var ikki nøktandi um hetta mundi. Í Tórshavn var MS Pressarin hjá P/F Mest. Hesin kundi brúkast bæði sum loðs- og sleipibátur, og hann riggaði væl til uppgávurnar á Sundi og Kollafirði. Í Klaksvík varð bjargingarbáturin MS Ziska brúktur sum loðs- og sleipibátur. Í Fuglafirði varð loðs- og sleipibáturin MS Pilot brúktur.

Í 2013 fóru umboð fyri P/F Faroe Agency til Russlands at vitja nøkur av teimum reiðaríum, sum felagið umboðaði. Russisku reiðaríini greiddu føroysku umboðnum frá, at teir ikki vóru nøgdir við trygdina, bæði í Klaksvík og í Fuglafirði, tí loðs- og sleipibátarnir har vóru ikki egnaðir til stóru russisku skipini.
Í hesum sambandi valdi P/F Faroe Agency at byggja ein nýggjan loðs- og sleipibát í Istanbul. MS Maria kom til landið i februar 2014, og fór beint í vinnu.

Tann 9. desember 2016 fekk Kappingareftirlitið kunning um viðurskiftini í sambandi við loðsflutning og sleipitænastur í Fuglafirði, ið møguliga vóru í stríð við kappingarlógina. Vinnunevndin í Fuglafjarðar kommunu hevði hin 14. apríl 2014 samtykt, at ávís vinnufyritøka í Fuglafirði skuldi verða fyrsta val hjá Fuglafjarðar havn í sambandi við loðsbátatænastuvirksemi.

Í avgerðini hjá vinnunevndini stóð at lesa:
"Vinnunevndin fegnast um økta sleipi- og trýsti orku, ið er tøk, nú MS Maria er løgd afturat flotanum. Hinvegin er Vinnunevndin samd um, at tað er skilagott at varðveita tær tænastur vit hava á fjørðinum. Vinnunevndin vil tí biðja Havnameistaran um at skipa so fyri, at MS Pilot verður fyrsta val til loðs- og oljusperrutænastur.

Báturin MS Maria er ogn hjá P/F Faroe Agency, ið hevur heimstað í Tórshavn. MS Pilot er ogn hjá Sp/f Pilot, ið hevur heimstað í Fuglafirði.

Tann 30. apríl 2014 fór P/F Faroe Agency á fund við Fuglafjarðar kommunu fyri at vísa á sína ónøgd við samtyktina. Í teldupostinum tann 5. november 2014, vísir P/F Faroe Agency aftur á sína ónøgd við at staðbundan felagið verður brúkt til loðsflutning til skip, sum felagið umboðaði, samstundis sum MS Maria bleiv brúkt til sleip.

Tann 12. november 2014 fekk P/F Faroe Agency boð frá Fuglafjarðar kommunu um, at samtyktin hjá vinnunevndini varð løgd fyri býráðið á komandi fundi, og at støða tá varð tikin til, um samtyktin skuldi staðfestast ella vrakast.

Tann 1. desember 2014 boðaði Fuglafjarðar kommuna frá, at vinnunevndin ikki hevði heimild at taka slíka avgerð, og at vinnunevndin tí hevði lagt áðurnevndu samtykt fram sum eitt tilmæli fyri býráðið. Býráðið samtykti tilmælið.

Tann 15. desember 2014 boðar advokaturin hjá P/F Faroe Agency frá, at varð samtykta mannagongdin ikki strikað beinanvegin, so bleiv klaga til Kommunala eftirlitið.

Tann 20. januar 2015 boðar advokaturin hjá Fuglafjarðar kommunu frá, at samtyktin hjá býráðnum ikki varð strikað. Advokaturin hjá Fuglafjarðar kommunu mettir, at Fuglafjarðar kommuna, sambært loðslógini, hevði frítt at velja hvønn flutningsveitara kommunan ynskti at brúka.

17. apríl 2016 sendi P/F Faroe Agency ein teldupost til Fuglafjarðar havn har víst varð á, at hóast fleiri áheitanir um at brúka bátarnir hjá P/F Faroe Agency til at flyta loðs út á skip, sum P/F Faroe Agency umboðar, so varð hetta sum meginregla ikki eftirlíkað. P/F Faroe Agency bað Fuglafjarðarhavn vátta, at havnin framyvir fór at brúka bátarnar hjá P/F Faroe Agency.

Tann 18. apríl 2016 kom svar frá Fuglafjarðar havn har sagt varð, at havnin hevur eina býráðssamtykt at fyrihalda seg til, og at havnin roynir at gera tað so bíligt fyri reiðaríini sum gjørligt. Í hesum sambandi varð kunnað um, at havnin framyvir fór at krevja, at reiðaríini, ið P/F Faroe Agency umboðaði, í hvørjum einstøkum føri skuldu vátta, at bátarnir hjá P/F Faroe Agency skulu brúkast.

Tann 14. oktober 2016 sendi advokaturin hjá P/F Faroe Agency eitt skriv til advokatin hjá Fuglafjarðar kommunu harð boðað varð frá, at um ikki Fuglafjarðar havn steðgaði við at lata aðrar útinna loðsbátatænastur og sleipivirksemi fyri skip hjá P/F Faroe Agency, og ikki steðgaði við at seta krav um áðurnevndu váttan frá reiðaríum, sum P/F Faroe Agency umboðaði, so varð fráboðan send Kommunala eftirlitinum og øðrum viðkomandi myndugleikum.

Tann 9. desember 2016 varð fráboðan send Kommunala eftirlitinum og Kappingareftirlitinum um atferðina hjá Fuglafjarðar kommunu.

Tann 10. mars 2017 valdi Kappingareftirlitið at taka málið upp til viðgerar, sum møguligt brot á kappingarlógina.

Tann 30. mars 2017 varð skrivligur fyrispurningur sendur Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, sum varðar av loðslógini. Spurt varð um ásetingar eru í loðslógini, sum seta kappingalógina til viks.

Tann 6. apríl 2017 kom svar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum um, at ongar ásetingar eru í loðslógini, sum seta kappingarlógina til viks.

Tann 19. apríl 2017 sendi Kappingareftirlitið eitt avgerðarskriv í hoyring hjá Fuglafjarðar kommunu.

Tann 10. mai 2017 kom hoyringssvar frá Fuglafjarðar kommunu, har boðað varð frá, at avgerð var tikin um at strika áðurnevndu samtykt, og at havnameistarin framyvir einans skuldi umbiðja neyðugar tænastur.

Tann 31. mai 2017 sendi Kappingareftirlitið skriv til Fuglafjarðar kommunu, har sagt varð, at Kappingareftirlitið skilti hoyringsskrivið soleiðis, at kommunan var samd um, at skip, sum komu undir § 4 í loðslógini, ikki skuldu verða forðað í at velja tann loðsbát tey ynsktu. Kappingareftirlitið bað síðani um skjalprógv fyri, at kappingaravlagingin var steðgað, og boðaði samstundis frá um ætlanina at niðurleggja málið, tá neyðug skjalprógv vóru fingin til vega.

Tann 6. juni 2017 fekk Kappingareftirlitið eintak av telduposti, sum varð sendur til havnameistaran, har sagt varð, at samtyktin var ógildað, og tað nú var upp til havnameistaran at umbiðja tær veitingar, sum vóru neyðugar.

Tann 12. juni 2017 sendi kappingareftirlitið skriv til Fuglafjarðar kommunu um, at Kappingareftirlitið nú hevði móttikið nøktandi skjalprógv, og at málið nú varð niðurlagt, sbrt. § 20 í kappingarlógini. Her skal viðmerkjast, at tá ið havnarmeistarin var avmarkaður til einans at umbiðja neyðugar tænastur, so var hann avmarkaður frá at umbiða loðs- ella sleipibát, tá ið umboðsfólk ella reiðarí longu hava gjørt avtalu við annan veitara.

Tann 26. februar 2018 fekk Kappingareftirlitið skriv frá advokatinum hjá P/F Faroe Agency, sum hesin hevði fingið frá advokatinum hjá Fuglafjarðar kommunu. Av hesum skrivi framgongur, at kommunan nú tulkar leiklutin hjá havnameistaranum øðrvísi enn í hoyringsskrivinum. Nú var tað havnameistarin, sum í øllum førum kann avgera, hvør veitari skal brúkast.

Kappingareftirlitið hevur fingið skjalprógv fyri tíðarskeiðið frá 26. februar 2018 til 18. apríl 2018, sum vísa, at kappingaravlagandi atburðurin, ið byrjaði í apríl 2014, heldur fram.

Kappingareftirlitið kann tí staðfesta, at Fuglafjarðar kommuna er lopin frá givnum lyftum.

Kappingareftirlitið hevur tí avgjørt at taka málið uppaftur til viðgerar.

Málið snýr seg um, at ein kommuna brúkar sína støðu sum loðsstøð at forða P/F Faroe Agency í at veita loðsflutning og sleipitænastur í Fuglafirði til fyrimuns fyri staðbundnari fyritøku.

Í hesum sambandi hevur Kappingareftirlitið tann 30. august 2018 sent Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, sum varðar av loðslógini, fyrispurning sambært § 2, stk. 4 í kappingarlógini.

Fyrispurningurin snýr seg um, hvørt tann kappingaravmarking, sum Fuglafjarðar kommuna fremur er ein beinleiðis ella neyðug fylgja av tí skyldu, sum er áløgd kommununum, sbrt. § 4, stk. 1 í loðslógini.

Tann 30. september 2018 kom svar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, har boðað varð frá, at tann kappingaravmarking, sum Fuglafjarðar kommuna fremur ikki er ein beinleiðis ella neyðug fylgja av tí skyldu, ið er áløgd kommununi, sbrt § 4, stk. 1 í loðslógini.

2.2. Lóggávan
2.2.1. Loðslógin
Hóast donsk loðslóg varð sett í gildi í Føroyum longu í 1916, so hevur ongin loðsskipan virkað í Føroyum eftir hesi lóg, tí lógin varð ikki mett hóskandi til føroysk viðurskifti. Ístaðin virkaði ein skipan, sum ikki bygdi á nakað lógargrundarlag, har skip, sum ynsktu loðs, antin settu seg í

samband við føroyskan umboðsmann ella havnina sjálva. Umboðsmaðurin ella havnin syrgdi so fyri, at skipini fingu neyðugu hjálpina frá staðkendum skipsførara.

Veikleikin við hesi skipan var, at tað var heldur tilvildarligt, hvørji skip bóðu um vegleiðing frá staðkendum persóni, og varð skipanin tí ikki mett at vera nóg trygg.

Í 2011 varð loðslógarøkið yvirtikið sum føroyskt málsøki, og tann 9. januar 2012 varð uppskot til løgtingslóg um havnaloðsing løgd fyri Løgtingið. Endamálið við lógini var við støði í verandi skipan at tryggja, at skip, sum skuldu hava loðs, og skip, sum ynsktu at fáa loðs, fingu loðs. Hetta varð gjørt við at áleggja kommununum eina loðsskyldu.

Í § 2, stk. 1, pkt. b, verður loðsing allýst sum: "Loðsing": ein persónur, ið hevur gildugt loðsprógv eftir hesi løgtingslóg, antinn staddur á brúnni umborð á skipinum ella frá loðsbáti vegleiðir vakthavandi navigatør á skipinum um sigling, navigasjón, og mannereran.

T.v.s. at loðsing er, at ein staðkendur skipsførari við loðsprógvi vegleiðir vakthavandi navigatør á skipinum, hvussu hesin skal bera seg at.

Í § 2, stk. 1, pkt. a, verður loðsskyldan allýst sum:
"Loðsskylda": At tey í § 7 nevndu skip, hvørs vakthavandi navigatørur ikki hevur loðsfrítøkuskjal, ikki kunnu sigla í ella út úr føroyskari havn uttan at nýta loðs.

Í § 4, stk. 1 verður henda skylda víðkað nakað:
Kommunur hava skyldu til at tryggja, at skip, sum eru loðsskyldug eftir hesi løgtingslóg, sbr. § 7, stk. 1, og skip, sum biðja um loðs, verða loðsað, tá ið tey skulu í ella úr einari havn í viðkomandi kommunu.

Veitingarskyldan hjá kommunum er sostatt, at øll skip, sum sambært lógini skulu hava loðs, og tey skip, sum biðja um loðs, fáa loðs. Kommunan er hinvegin ikki áløgd at eiga hvørki loðs- ella sleipibát.

Umboðsfólk ella reiðarí skulu gjalda fyri loðstænastuna. Gjaldið er ásett í kunngerð nr. 153 frá 21. desember 2012. Í § 13 er ásett eitt gjald fyri loðsing, sum er grundað á støddina á skipinum og tíðarnýtsluna. Gjaldið fyri loðsingina skal gjaldast til loðsstøðina, sbrt. § 13, stk. 3 í loðslógini.

Sambært § 13, stk. 3 er gjald fyri loðsflutning ikki íroknað gjaldið fyri loðsingina. Hetta gjald skal umboðsmaður hjá skipinum ella reiðarí rinda beinleiðis til eigaran av loðsbátinum. Talan er sostatt um tvær ymiskar tænastur.

Gjaldskyldan fyri loðsing v.m. liggur hjá umboðsmanninum hjá loðskylduga skipinum og annars hjá reiðarínum, sbrt § 18 í somu kunngerð.

Sambært § 4, stk. 2 í loðslógini, kunnu kommunur gera avtalur við privatar um at útinna loðsing. Í viðmerkingunum til greinina verður sagt, at ábyrgdin fyri at veitingarskyldan verður hildin liggur hjá kommununi. Kommunur kunnu tó samstarva um loðsingina, harumframt kunnu kommunur gera avtalur við privatan persón ella felag um útinnan av loðsing.

Ósemjan millum Fuglafjarðar kommunu og P/F Faroe Agency snýr seg um, hvør skal veita loðsbátatænastu, tá staðkendur skipsførari við loðsprógvi skal vegleiða vakthavandi navigatør á skipi, sum P/F Faroe Agency umboðar.

P/F Faroe Agency vil hava møguleika at velja, hvør skal flyta loðsin fyri tey reiðarí, sum felagið umboðar – harundir sjálvt at kunna veita tænastuna.

Fuglafjarðar kommuna metir, at veitingarskyldan í loðslógini heimilar kommununi at avgera, hvør skal flyta loðsin út á skipið.

Kappingareftirlitið metir, at talan er um eina tænastu, sum eigur at fara fram undir vanligum marknaðartreytum. Tí meðan lóggávan ásetur eitt gjald fyri loðsing, so verður gjaldið fyri loðsflutning avtalað millum seljara og keypara. Søla og keyp kann bara fara fram eftir marknaðartreytum, um seljari og keypari hava møguleika at tingast um eitt nú prís og innihald í tænastuni.

2.2.2. Útinnan av veitingarskylduni
Kappingareftirlitið hevur spurt seg fyri hjá Tórshavnar, Klaksvíkar og Runavíkar havn um, hvussu hesar útinna veitingarskylduna. Ítøkiliga varð spurt um:

- Hvussu havnin útinnir veitingarskylduna, tá umboðsmaður biður um loðs, sleip og loðsflutning.
- Hvussu havnin útinnir veitingarskylduna, tá umboðsmaður biður um loðs og loðsflutning, men sjálvur tekur sær av restini.
- Hvussu havnin útinnir veitingarskylduna, tá umboðsmaður biður um loðs, men sjálvur tekur sær av restini.

Allar loðsstøðir svaraðu, at ynskini hjá umboðsmanninum verða fylgd í øllum førum, hetta sjálvt sagt treytað av, at øll krøv eru uppfylt, og at báturin er egnaður til endamálið.

Loðsstøðirnar í Klaksvík, Runavík og Tórshavn eru í nøkulunda somu støðu sum loðsstøðin í Fuglafirði. Talan er um havnir, har nógv skip vitja. Í Klaksvík og Tórshavn eru staðbundin feløg, sum kunnu veita sleipi- og loðsbátatænastur.

Loðsstøðirnar í Klaksvík, Runavík og Tórshavn røkja tær skyldur, ið loðslógin áleggur teimum uttan at forða umboðsmanninum at veita tær tænastur, sum avtalað er við reiðarí um. Somuleiðis røkja hesar havnir tær skyldur, sum loðslógin áleggur teimum uttan at gera mismun á staðbundnum ella feløgum aðrastaðni í landinum.

Tær skyldur, sum loðslógin áleggur kommununum kunnu tí útinnast á ein hátt, ið ikki er í stríð við ásetingar í kappingarlógini.

2.2.3. Fyrispurningur til UVMR
Kappingarlógin fevnir um øll sløg av vinnuvirksemi og almennum stuðli til vinnuvirksemi, sbrt. § 2, stk. 1 í kappingarlógini. Reglurnar í 2. og 3. kapitli í kappingarlógini eru tó ikki galdandi, um ein kappingaravmarking er ein beinleiðis ella neyðug fylgja av almennari regulering, sbrt. § 2, stk. 2 í somu lóg.

Kappingarráðið kann, sbrt. § 2, stk. 4 í kappingarlógini, biðja viðkomandi landsstýrismann taka støðu til, hvørt ein kappingaravmarking er ein beinleiðis ella neyðug fylgja av almennari regulering.

Tann 30. august 2018 sendi Kappingareftirlitið ein fyrispurning til Uttanríkis- og vinnumálaráðið, vísandi til § 2, stk. 4 í kappingarlógini. Spurt varð um tann kappingaravmarking, sum Fuglafjarðar kommuna fremur ímóti P/F Faroe Agency, er ein beinleiðis ella neyðug fylgia av tí veitingarskyldu, sum loðslógin áleggur kommununi.

Tann 28. september 2018 fekk Kappingareftirlitið svar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum. Av skrivinum framgongur at:

Um ein almenn regulering skal seta reglurnar í 2. og 3. kapitli i kappingarlógini til viks, skal talan vera um:

- eina beinleiðis fylgju av eini almennari regulering, tvs. at hetta skal framganga greitt og eyðsýnligt av lóggávuni ella, sum tað minsta, vera greitt, at lóggevari hevur fyrihildið seg til spurningin, at talan er um eina kappingaravmarking ella
- eina neyðuga fylgju av eini almennari regulering, har fyritøkan ikki kann yvirhalda lóggávuna uttan at fremja kappingaravmarkingina. Um fyritøkan hevur fleiri valmøguleikar og velur tann, sum er kappingaravmarkandi, kann hon ikki brúka § 2, stk. 2 sum verju.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið heldur, at ætlanin hevur verið, at veitingarskyldan sambært § 4, stk. 1 í loðslógini, bæði fevnir um loðs og loðsbát. Sum stuðul fyri hesi tulking vísir ráðið til kapittul 2 í lógaruppskoti um havnaloðsing, ið snýr seg um fíggjarligar avleiðingar av uppskotinum. Har stendur millum annað:

"Kommunurnar/havnirnar mugu tískil hava avtalu við góðkendar loðsar um at útinna hesa uppgávu og harumframt at tryggja, at bátur er tøkur til uppgávuna, sum lýkur krøvini frá Sjóvinnustýrinurn til loðsbátar."

Uttanríkis- og vinnumálaráðið metir, at veitingarskyldan hjá kommunum bæði fevnir um loðs og loðsbát. Kommunur eru sostatt álagdar at hava eina loðstilbúgving tilreiðar, meðan skyldan viðvíkjandi loðsbátinum er avmarkað til at tryggja, at loðsbátur er tøkur í samband við hvørja loðsing.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið kemur eisini til ta niðurstøðu, at:
"Av tí, at lóggávan um havnaloðsing er skipað á henda hátt, ber ikki at staðfesta, at ein kappingaravmarking gongur greitt og eyðsýniligt fram av lóggávuni, ella at tað er greitt, at lóggevari hevur fyrihildið seg til spurningin."

At enda staðfestur Uttanríkis- og vinnumálaráðið eisini, at tær forðingar, sum eru settar av Fuglafjarðar kommunu ímóti P/F Faroe Agency, ikki eru ein beinleiðis fylgja av teimum skyldum, sum loðslógin áleggur kommununi í sambandi við loðsing.

"Tað gongur ikki greitt fram av loðslógini, at tílíkar forðingar eru ein beinleiðis fylgja av løgtingslóg um havnaloðsing."

Uttanríkis- og vinnumálaráðið staðfestir sostatt, at tann kappingaravmarking, sum Fuglafjarðar kommuna fremur, ikki er ein beinleiðis fylgja av teirri veitingarskyldu, sum er áløgd kommununi. Um hvørt kappingaravmarkingin er ein neyðug fylgja av veitingarskylduni, skrivar Uttanríkis- og vinnumálaráðið:

"Lógin útilokar tó ikki, at tað verða settar avmarkingar, um tað í ítøkiligum førum verður mett, at tað er ein neyðug fylgja av teimum skyldum, sum eru álagdar kommununi eftir løgtingslóg um havnaloðsing.

Tað kann sjálvsagt ikki útilokast, at serlig viðurskifti eru galdandi í Fuglafirði í mun til í øðrum havnum, sum hava við sær, at tað er neyðugt at gera ávís inntriv í fríu kappingina fyri, at skipanin kann virka. Tað treytar, at kommunan hevur tikið nærri avgerð um tað, og grundgivið fyri, at slík avmarking er neyðug. Kommunan hevur tá skyldu til at ansa eftir, at talan er um minst møgulig

inntriv í kappingina.

Tað hevur kommunan ikki gjørt, og treytin fyri møguligum avmarkingum er tí ikki lokin."

Sostatt staðfestir Uttanríkis- og vinnumálaráðið, at kappingaravmarkingin, sum Fuglafjarðar kommuna fremur ímóti P/F Faroe Agency, ikki er ein neyðug fylgja av veitingarskylduni.

2.2.4. Ávegis niðurstøða um lóggávuna
Kappingareftirlitið hevur fingið staðfest frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, at loðsstøðir ikki hava einarætt at velja, hvør skal útinna loðsflutningin. Loðsstøðir skulu bert tryggia, at loðsbátur, sum hevur góðkenning frá Sjóvinnustýrinum, er tøkur.

Hevur umboðsfelag ella reiðarí ávíst ynski um, hvør skal útinna loðsflutningin, so er loðsstøðin avskorin frá at velja annan veitara, tí tá er longu trygd fyri, at loðsbátur er tøkur. Hetta er treytað av, at loðsbáturin er góðkendur av Sjóvinnustýrinum.

Veitingarskyldan áleggur kommunum at gera avtalur við góðkendar loðsar um útinnan av loðsing. Hinvegin er veitingarskyldan viðvíkjandi loðsflutningi avmarkað at trygga at loðsbátur er tøkur.

Hevur umboðsfelag ella reiðarí ikki gjørt avtalu um loðsflutning, so er tað skyldan hjá kommununi at tryggja, at loðsbátur er tøkur at flyta loðsin.

Kappingareftirlitið hevur staðfest, at loðsstøðirnar í Tórshavn, Klaksvík og Runavík útinna veitingarskylduna samsvarandi tí tulking, sum Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur. Nevniliga at loðsstøðin bert velur veitara, um umboðsfelag ella reiðarí ikki hava tikið sær av hesum.

Svarið hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum hevur við sær at tann kappingaravmarking, sum Fuglafjarðar kommuna fremur, ikki er undantikin kapittul 2 og 3 í kappingarlógini. Málið kann tí roynast sum møguligt brot á § 11 í kappingarlógini.

2.3. Partarnir
2.3.1. Fuglafjarðar havn
Fuglafjarðar havn er millum størstu havnirnar í landinum. Sambært Hagstovuni, hava árliga millum 800-850 skip lagt at í Fuglafirði seinastu árini. Einans Tórshavnar og Klaksvíkar havn hava meira virksemi. Verður støði tikið í nøgdini av góðsi, sum er komið ella farið úr føroysku havnunum í sama tíðarskeiðið, er Fuglafjarðar havn næststørsta havn í Føroyum. Einans Tórshavnar havn er størri. Niðanfyri er talva, sum lýsir virksemið í teimum størstu havnunum í Føroyum.

Samlað virksemi - árini 2012-2016	Tórshavn	Klaksvík	Fuglafjørður	Runavík	Tvøroyri	Vági
Komin skip	12.403	8.234	4.085	3.975	1.313	816
Uppskipað góðsmongd í 1.000 t.	1.923	579	1.478	548	456	105
Innskipað góðsmongd í 1.000 t.	1.272	149	761	109	281	52

Tá ið hugt verður at, hvussu nógv skip koma til hvørja havn, skal havast í huga, at skipini hjá Strandferðsluni eru íroknað í tølini hjá Tórshavnar havn. Hesi skip telja sum ein koma hvønn dag. Kollafjarðar havn er eisini tald uppí tølini hjá Tórshavnar havn. Í Klaksvík eru útróðrabátar ikki taldir við.

Sambært yvirlitinum hava 4085 skip vitja Fuglafjørð í hesum tíðarskeiði. Hetta svarar áleið til tað sama, sum kemur á Runavík. Til samanberingar koma tvær ferðir so nógv skip til Klaksvíkar, meðan uppskipaða mongdin av góðsi, t.v.s. tað, sum kemur á landi, er minni enn helmingurin av tí, ið verður uppskipað í Fuglafirði. Innskipaða mongdin av góðsi er hon, sum fer úr havnini. Her er nøgdin 5 ferðir so stór sum í Klaksvík. Talan er sostatt um eina havn, har serliga nógv vinnuvirksemi fyriferst.

2.3.2. P/F Faroe Agency
P/F Faroe Agency er ein føroysk fyritøka, ið veitir tænastur til skip og reiðarí, sum virka í føroyskum sjóøki. Fyritøkan varð stovnað í 2004 og hevur heimstað í Tórshavn.

Fyritøkan bjóðar tænastur innan: umboðsmannavirksemi, handfaring av manningarviðurskiftum, loðsbátatænastur v.m.

Fyritøkan eigur tveir bátar, MS Anna og MS Maria. Hesir vórðu smíðaðir í 2013 og 2015. Loðsbátarnir eru góðkendir sum bæði loðs- og sleipibátar og eru virknir kring landið. Bátarnir hava fyrst og fremst til uppgávu at veita tænastur til reiðarí, sum P/F Faroe Agency umboðar í Føroyum.

2.4. Marknaðarlýsing
Havnir eru markamót millum vøruflutning á landi og vøruflutning um hav. Havnir hava tí ein týðandi búskaparligan leiklut í samfelagnum. Í 2015 og 2016 fór áleið 90 % av føroyska útflutninginum umvegis havnir, meðan 10 % fór umvegis flogvøllin í Vágum.

Tá skip koma, liggja ella fara frá bryggju kann tørvur verða á fleiri ymiskum tænastum. Tað kann vera kommunan, sum veitir nakrar atknýttar tænastur, t.d. vatn ella innsavnan av ruski. Somuleiðis kunnu tað vera aðrar veitingar sum tørvur er á, t.d. proviantering og bunkring.

Havnir kunnu vera í kapping við aðrar havnir ella hava monopol innan eitt ávíst landafrøðiligt økið. Ein monopolstøða kann t.d. taka seg upp um ein havn hevur eina góða landafrøðiliga staðseting í mun til aðrar granna havnir. Góða staðsetingin kann hava við sær at flutningstíð ella flutningskostnaður millum tvey økir gerst munandi lægri, enn um ein granna havn verður brúkt.

Tað kunnu eisini vera tænastur, sum havnin ella aðrir, sum eru staðsettir í havnini ella nærhendis, kunnu veita, sum havnir i grannaøkjum av eini ella aðrari orsøk ikki kunnu veita.

Talan kann eisini vera um, at skip koma við farmi til eina fyritøku, sum er staðsett við havnarlagið ella nærhendis. Ofta vil tað ikki vera handilsliga ráðiligt at uppskipa vøruna í aðrari havn, t.d. um talan er um leysafarm. Í eini neyðstøðu kann leysafarmur umskipast í bingjur ella líknandi, men hetta er ikki ein loysn, sum er handilsliga ráðilig.

Fuglafjarðar havn er í teirri serligu støðu, at havnin hevur einasta tungoljuterminal í Foroyum. SEV hevur tungoljugoymslur, men skip kunnu ikki bunkra frá teimum. Skip her umleiðir, sum brúka tungolju, fara tí til Fuglafjarðar at bunkra.

Í øðrum lagi eru virkini Pelagos og Havsbrún staðsett við havnarlagið í Fuglafirði. Tey skip, sum

skulu lata uppisjóvarfisk til hesi virkir kunnu bara velja Fuglafjarðar havn, tí flutningur eftir landi, t.d. frá Gøtu ella Leirvík, kann neyvan fara fram á einum handilsligum grundarlagi.

Í triðja lagi er frystivirkið Bergfrost staðsett við havnarlagið í Fuglafirði. Tey farmaskip, sum koma eftir liðugvørum, sum liggja á goymslu hjá Bergfrost, kunnu bara velja Fuglafjarðar havn um talan er um leysafarm. T.d. farm, sum verður innskipaður á plattum.

Hinvegin kann sigast, at flutningur av ferðafólki er meira opin fyri kapping. Ferðamannaskipini kunnu velja ta havn, har umstøðurnar eru nøktandi.

2.5. Atburður
Fuglafjarðar kommuna hevur roynt at tryggia staðbundnari fyritøku umsetning við at lata felagnum í hendi at útinna tænastuveitingar, sum P/F Faroe Agency hevur átikið sær at útinna fyri tey reiðarí, sum felagið umboðar í Føroyum.

Fuglafjarðar kommuna hevur somuleiðis kravt, at um bátarnir hjá P/F Faroe Agency skulu brúkast í sambandi við loðsing, so skal reiðaríið vátta hetta fyri kommununi í hvørjum einstøkum føri.

2.5.1. Samtyktin hjá vinnunevndini
P/F Faroe Agency kunnaði Fuglafjarðar kommunu í 2014 um, at felagið hevði keypt ein bát til sleipi- og loðsbátatænastur, sum felagið frameftir ynskti at brúka, tá skip sum felagið umboðar komu til ella fóru frá bryggju í Fuglafjørð. Vinnunevndin í Fuglafirði tók avgerð um, at staðbundna felagið heldur skuldi vera fyrsta val, og fekk Fuglafjarðar havn kunning um hetta beinanvegin.

P/F Faroe Agency hevur áhaldandl biðið um, at teirra loðsbátar skulu brúkast, tá skip, ið felagið umboðar, koma ella fara úr Fuglafirði. Lógarásettu freistir fyri nær skip skulu fráboða, at tey koma í ella fara úr havn eru ávikavist 18 og 6 tímar. P/F Faroe Agency er staðsett í Tórshavn, og liggja bátarnir í Runavík og Klaksvík, og kunnu teir tí vera uppá pláss innan hesar freistir.

P/F Faroe Agency hevur avtala við tey reiðarí sum felagið umboðar, at felagið tekur sær av at veita sleipi- og loðsbátatænastur fyri ein frammanundan ásettan prís.

Tá ein og sami bátur hjá P/F Faroe Agency tekur sær av sleipi og flutningi av loðsi, kunnu hesar tænastur fremjast bíligari, enn um tær vóru loystar hvør sær.

Tá Fuglafjarðar kommuna forðar P/F Faroe Agency at brúka sínar egnu bátar verður felagið álagt óneyðugan meirkostnað. Talan er um komplimenterar tænastur, sum kunnu útinnast av einum báti. Tá staðbundna felagið útinnir loðsflutning, so eru tveir bátar og tvær manningar um eina uppgávu, sum ein bátur lættliga kann loysa.

Talan er sostatt um ein meirkostnað, sum verður álagdur P/F Faroe Agency uttan, at felagið hevur umbiðið hesa tænastu, og uttan, at P/F Faroe Agency hevur havt møguleika at tingast um prís og innihald av tænastuni.

2.5.2. Krav um váttan
Tann 18. apríl 2016 fekk P/F Faroe Agency boð frá Fuglafjarðar havn um, at um bátarnir hjá P/F Faroe Agency brúkast í sambandi við loðsflutning og sleip, so skuldi váttan fyriliggja frá reiðarínum í hvørjum einstøkum føri.

P/F Faroe Agency hevur gjørt sáttmálar við fleiri russisk reiðarí, tí hesi ynskja eitt umboð í Føroyum, sum kann taka sær av nøkrum praktiskum uppgávum, sum reiðaríini annars skuldu tikið sær av.

Hetta at hava umboðsfólk er vanligt innan vinnulív og serliga innan sjóvinnu. Í almennu viðmerkingunum til loðslógina stendur, at umboðsmenn og havnir áður tóku sær av, at skip sum ynsktu loðs fingu loðs. Í § 18, stk. 1 í kunngerð nr. 153 frá 21. desember 2012 stendur, at gjaldskyldan fyri loðsing fyrst og fremst liggur hjá umboðsmanninum og annars hjá reiðarínum.

Tað er sostatt ongin orsøk at halda annað enn, at umboðsmaðurin er tann rætti at venda áheitanir til, tá skip skulu í ella úr havn. Tað er tí ongin orsøk til at krevja eina váttan frá reiðarínum, tá umboðsmaður ber fram ynski um at útinna eina tænastu fyri reiðsríið. Umboðsmaðurin fer ikki at taka sær av nøkrum uppgávum, sum ikki er avtalað um frammanundan.

Tá ið Fuglafjarðar havn biðu um tílíka váttan, so avmarkar tað møguleikan hjá umboðsmanninum at útinna sítt virksemi. Í øðrum lagi vilja tílík krøv vera egnaði til at skapa iva hjá reiðarínum um, hvørt umboðsmaðurin røkjur teirra áhugamál.

2.6. Hoyringssvar
Tilmæli um avgerð varð sent til hoyring hjá Fuglafjarðar kommunu tann 19. juni 2018 við hoyringsfreist til 4. juli 2018. Freistin varð sostatt sett til 2 vikur grundað á, at talan var um mál, har nær um eingir nýggir upplýsingar vóru í mun til tað mál, sum varð niðurlagt tann 12. juni 2017. Fuglafjarðar kommuna bað um longda freist í sambandi við eina innlitsumbøn. Freistin varð flutt til 16. juli 2018. Hoyringssvarið kom tann 16. juli 2018.

Eftir at hava sent fyrispurning, sambært § 2, stk. 4 í kappingarlógini, og viðgjørt svarið, valdi Kappingareftirlitið at senda tilmæli um avgerð til hoyring hjá Fuglafjarðar kommunu. Tann 10. oktober 2018 kom svar frá Fuglafjarðar kommunu.

3. Meting
3.1. Viðkomandi marknaður

Í § 5 í kappingarlógini er ásett, at eftirspurningsvaraseting, útboðsvaraseting og møgulig kapping skal kannast í sambandi við skilmarking av viðkomandi marknaði. Hetta er fyri at staðfesta í hvønn mun fyritøkan er undir kappingarligum trýsti. Ásetingin skal skiljast soleiðis, at varasetingin í øllum førum skal kannast, meðan møgulig kapping skal kannast um tað er neyðugt. Somuleiðis skal ásetingin skiljast soleiðis, at varaseting skal kannast undir øllum umstøðum, men at aðrir hættir eisini kunnu brúkast.

Í sambandi við skilmarkingina av viðkomandi marknaði, skal bæði viðkomandi vørumarknaður og viðkomandi landafrøðiligi marknaður staðfestast. Hetta merkir, at kanningin skal staðfesta um tað eru aðrar vørur á marknaðinum, sum kunnu koma ístaðin fyri tær vørur, sum partarnir veita. Eisini skal landafrøðiliga støddin á marknaðinum staðfestast. Landafrøðiligi marknaðurin er tað økið, har partarnir umseta ella avtaka vørur og har kappingarligu umstøðurnar eru so líkar, og sum líkjast frá teimum, sum eru galdandi í grannaøkjum.

3.1.1. Viðkomandi vørumarknaður

Tey skip, sum P/F Faroe Agency umboðar, fara inn á Fuglafjørð, tí tey antin skulu bunkra tungolju, lata tungolju til oljuterminalin, lata rávøru ella avheinta leysafarm.

Kappingareftirlitið hevur staðfest tríggjar viðkomandi vørumarknaðir. Fyrsti vørumarknaðurin er marknaðurin fyri atløguplúss v.m. til skip, har staðbundna loðsstøðin hevur veitingarskyldu, sambært § 4, stk. 1 í loðslógini. Allar kommunur í Føroyum hava loðsskyldu, men tað er serliga størru havnirnar, ið fáa vitjan av teimum skipum, sum koma undir § 4 í loðslógini.

Fyri at atløguplass í øðrum havnum kunnu varasetast í mun til eitt atløguplass í Fuglafirði er neyðugt, at umstøðurnar eru sambærligar, bæði hvat viðvíkur longd og dýpi, men eisini grundleggandi tænastur so sum atgongd til vatn og innheinting av burturkasti. Umstøðurnar á havnarlagnum viðvíkjandi uppskipan og innskipan hava eisini týdning.

Kappingareftirlitið metir, at atløguplass v.m. í Runavíkar-, Tórshavnar-, Klaksvíkar-, Vágs- og Tvøroyrar kommunu kunnu varasetast fyri atløguplass í Fuglafirði.

Kappingareftirlitið metir ikki, at tað eru aðrir veitarar, sum andsvar uppá smáar varandi broytingar í lutfalsligu prísunum, kunnu veita atløguplass, sum kunnu varasetast fyri atløguplass í Fuglafirði.

Kappingareftirlitið metir, at forðingarnar inn á henda vørumarknað eru høgar. Fyri at byrja virksemi innan veiting av atløguplássi krevst, at viðkomandl persónur, felag ella myndugleikl hevur eina havn. Hetta krevur munandi íløgur og verklagsarbeiði í eitt áramál. Tær kommunur, sum longu hava eina havn, men har umstøðurnar ikki eru at sammeta við tær í Fuglafirði kunnu møguliga útbyggia sínar havnir, men talan er framvegis um munandl íløgur og verklagsarbeiði.

Næsti marknaðurin er marknaðurin fyri loðsflutning, har staðbundna loðsstøðin hevur veitingarskyldu sambært § 4, stk. 1 í loðslógini. Loðsflutningur fevnir um at sigla loðsin út á loðspunkti, har skipið, sum skal hava loðs, bíðar. Lóggávan ásetur, at loðsskyldug skip ella skip, sum vilja hava loðs, skulu fráðoða loðsstøðini 18 tímar áðrenn tey koma til loðspunktið. Somuleiðis skulu loðsskyldug skip, ið ætla sær úr havn ella frá akkersplássi, boða loðsstøðini frá 6 tímar áðrenn fráferð.

Treytin fyri at bátur kann virka sum loðsbátur er, at Sjóvinnustýrið hevur góðkent bátin sum loðsbát. Loðsbáturin skal yvirhalda tey krøv, sum verða sett til útróðrarbátar, umframt nøkur eykakrøv. T.d. krøv til atkomuviðurskiftini í bátinum og til útsýni.

Sostatt er viðkomandi vørumarknaður avmarkaður til teir bátar, sum hava neyðugu góðkenningina at verða loðsbátar. Niðanfyri er yvirlit yvir teir bátar, ið eru góðkendir loðsbátar.

Loðsbátar	Eigari	Byggiár	Motor [kW]
Anna	Faroe Agency P/f	2015	1.102
Maria	Faroe Agency P/f	2013	1.102
Lív	Landsfelagið fyri bjargingarfeløg	2008	810
Pressarin	Mest P/f	1996	528
Tjørnunes	Sp/f Búrhella	1993	1.100
Hvannhólmur	Páll Eli Joensen	1988	225
Ziska	Norðoyar Bjargingarfelag	1984	713
Alpha Pilot	Sp/f Búrhella	1974	352
Merkur	Vágs Skpasmiðja Sp/f	1955	397
Pilot	Pilot Sp/f	1952	736

Kappingareftirlitið metir, at talan er um eina tænastu, har aðrir tænastuveitarar skjótt kunnu umstilla
seg til at veita loðsbátatænastur. Talan er um ein marknað har íløgukravið er avmarkað, og har myndugleikakrøvini ikki eru ein stórvegis forðing fyri atgongdini til marknaðin.

Triði marknaðurin er marknaðurin fyri sleipitænastur, har staðbundna loðsstøðin hevur veitingarskyldu, sambært § 4, stk. 1 í loðslógini. Sleipitænastur fevna um at hjálpa skipum til og frá atløguplássum.

Treytirnar fyri at ein bátur kann verða brúktur sum sleipibátur er, at Sjóvinnustýrið hevur góðkent bátin sum sleipibát. Sleipibáturin skal yvirhalda tey krøv, sum verða sett til útróðrarbátar, umframt eykakrøv til m.a. stabilitet. Niðanfyri er yvtrlit yvir teir bátar, sum eru góðkendir sum sleipibátar.

Sleipibátar	Eigari	Byggiár	Motor [kW]
Anna	Faroe Agency P/f	2015	1.102
Maria	Faroe Agency P/f	2013	1.102
Samson	P/f Mest	1999	2.028
Pressarin	P/f Mest	1996	528
Merkur	Vágs Skipasmiðja Sp/f	1955	397
Pilot	Pilot Sp/f	1952	736

Teir bátar, sum hava góðkenning sum loðsbátar, men ikki hava góðkenning sum sleipibátar, kunnu tó sleipa smærri før.

Kappingareftirlitið metir, at talan er um eina tænastu, har aðrir tænastuveitarar skjótt kunnu umstilla seg til at veita sleipibátatænastur. Talan er um ein marknað har íløgukravið er avmarkað, og har myndugleikakrøvini ikki stórvegis forðan fyri at byrja virksemi á marknaðinum.

3.1.2. Viðkomandi landafrøðiligur marknaður
Landafrøðiliga skilmarkingin av tí fyrsta vørumarknaðinum, ið var atløgupláss til skip, har staðbundna loðsstøðin hevði veitingarskyldu, sambært § 4, stk. 1 í loðslógini, er Fuglafjørður.

Orsøkin er, at tey skip, sum P/F Faroe Agency umboðar, og sum hava havt ørindi í Fuglafjarðar havn í tíðarskeiðinum frá 2014 til 2018, í flestu førum, ikki hava havt møguleika at fara í aðra havn í Føroyum.

Kappingareftirlitið kann nevniliga staðfesta at millum 70 og 95% av hesum skipum hava verið í Fuglafirði, tí tey antin skulu bunkra tungolju, lata rávøru til Pelagos ella lagt rávøru á goymslu hjá P/F Bergfrost. Verða tey frystifarmaskip, sum innskipa liðugvørur frá P/F Bergfrost og tey frystifarmaskip, sum innskipa liðugvørur beinleiðis frá teimum russisku fiskiskipunum tald við, so liggur talið millum 90 og 99%. Hesi frystifarmaskip taka leysafarm og hava tí ikki møguleika at fara í aðra havn.
Hjá hesum skipum munar lítið, at aðrar havnir hava atløgupláss, tá skipini hava tørv á vørum og tænastum í Fuglafirði.

Í Føroyum er bert ein tungoljuterminalur. At fara á aðra havn fyri síðani at fáa tungoljuna flutta við tangabilum, kann møguliga gerast í eini neyðstøðu, men ikki á einum handilsligum grundarlagi.

Tey skip, sum P/F Faroe Agency umboðar, ið hava verið í Fuglafirði í tíðarskeiðinum frá 2014 til 2018 við rávøru, hava uppskipað hana sum leysafarm. Somuleiðis hava tey skip, ið P/F Faroe Agency umboðar, sum hava verið í Fuglafirði í tíðarskeiðinum 2014 til 2018 eftir liðugvørum, innskipað hesar sum leysafarm.

Til ber í eini neyðstøðu at umskipa leysafarm í bingjur, flyta hann umvegis veganeti, fyri síðani umskipa hann úr bingjum til leysafarm aftur. Hetta er av fleiri orsøkum ikki ein varandi loysn.

Sostatt hava tey skip, sum hava verið í Fuglafirði í tíðarskeiðinum frá 2014 til 2018, og sum P/f Faroe Agency umboðar, ikki havt møguleika at fara til aðrar havnir í Føroyum.

Kanningin av eftirspurningsvarasetingini vísir sostatt, at viðkomandi vørumarknaður er landafrøðiliga avmarkaður til Fuglafjørð. Ein kanning av útboðsvarasetingini víðkar ikki landafrøðiligu avmarkingina.

Útboðsvaraseting kann fara fram um aðrir veitarar, sum andsvar uppá eina lítla varandi príshækkan innan stutta freist, kunnu umstilla sítt virksemi til at veita til viðkomandi marknað. Kappingareftirlitið metir ikki, at tað eru aðrir veitarar, t.d. verandi havnir í Føroyum, sum kunnu umstilla sítt virksemi á henda hátt. Tað er í hesum føri ikki nóg mikið at veita eitt atløgupláss, tí tað er vinnuvirksemi á havnarlagnum í Fuglafirði, sum er orsøkin til, at skipini koma inn higar.

Landafrøðiliga skilmarkingin av næsta marknaði, ið er loðsflutningur, har loðsstøðin hevur veitingarskyldu, sambært § 4, stk. 1 í loðslógini, eru allar Føroyar, undantikið Suðuroy. Loðsflutningstænastur, sum kunnu varasetast, eru tær, sum verða útintar í Fuglafirði. Hetta kemur av somu orsøkum sum tær, sum eru nevndar omanfyri viðvíkjandi fyrsta marknaði. Tey skip, sum í tíðarskeiðinum frá 2014 til 2018 hava brúkt Fuglafjarðar havn, og sum P/F Faroe Agency umboðar, hava ikki møguleika at velja aðrar havnir. Veitarar í øllum Føroyum, undantikið úr Suðuroynni, kunnu veita loðsflutning í Fuglafirði.

Í sambandi við hoyring, hevur Fuglafjarðar kommuna set spurnartekin við, hví veitarar frá Suðuroynni ikki eru partur av viðkomandi marknað. Hetta er grundað á eina meting hjá Kappingareftirlitinum. Tó skal viðmerkjast, at niðurstøðan er, at ongin veitari er marknaðarráðandi. Tí hevur tað ongan týdning fyri niðurstøðuna, um veitarar úr Suðuroy verða tiknir við ella ikki.

Kappingareftirlitið metir eisini, at aðrir veitarar sum andsvar uppá eina lítla varandi prishækkan, innan eina stutta freist, kunnu umstilla sítt virksemi til at veita á viðkomandi marknaði. Slíkir veitarar kunnu t.d. vera havnir, sum velja at keypa ein loðsbát. Talan kann eisini vera um veitarar, sum dríva annað virksemi, t.d. bjargingarfeløg ella veitarar av bátum til ferðafólkaflutning. Talan er tískil um ein marknað, har íløgukravið ikki er høgt.

Landafrøðiliga skilmarkingin av triðja viðkomandi marknaði, ið er sleipitænastur, har staðbundna loðsstøðin hevur veitingarskyldu, sambært § 4, stk. 1 i loðslógini, eru allar Føroyar undantikið Suðuroy. Sleipibátatænastur, sum kunnu varasetast, eru tær, sum verða útintar í Fuglafirði. Hetta kemur av somu orsøkum sum tær, ið eru nevndar omanfyri viðvikjandi fyrsta marknaði. Tey skip, sum í tíðarskeiðinum frá 2014 til 2018 hava brúkt Fuglafjarðar havn, og sum P/F Faroe Agency umboðar, hava ikki havt møguleika at velja aðra havn. Veitarar í øllum Føroyum, undantikið úr Suðuroynni, kunnu veita sleipitænastur í Fuglafirði.

Kappingareftirlitið metir eisini, at aðrir veitarar sum andsvar uppá eina lítla varandi príshækkan, innan eina stutta freist, kunnu umstilla sítt virksemi til at veita tænastur á viðkomandi marknaði. Slíkir veitarar kunnu t.d. vera havnir, sum velja at keypa ein sleipibát. Talan kann eisini vera um veitarar, sum dríva annað virksemi, t.d. onnur bjargingarfeløg ella veitarar av bátum til ferðafólkaflutning. Talan er um ein marknað, har íløgukravið ikki er serliga høgt.

3.1.3. Ávegis niðurstøða um viðkomandi marknaðir

Kappingareftirlitið hevur staðfest tríggir viðkomandi marknaðir. Hesir eru:

- Marknaðurin fyri atløgupláss í Fuglafirði, har loðsstøðin hevur veitingarskyldu, sambært § 4, stk. 1 í loðslógini.

- Marknaðurin fyri loðsbátatænastur í Fuglafirði, har loðsstøðin hevur veitingarskyldu, sambært § 4, stk. 1 í loðslógini.
- Marknaðurin fyri sleipitænastur í Fuglafirði, har loðsstøðin hevur veitingarskyldu, sambært § 4, stk. 1 í loðslógini.

3.2.§ 11 í kappingarlógini

Sambært § 11 í kappingarlógini, er ikki loyvt einum ella fleiri fyritøkum at misnýta eina ráðandi marknaðarstøðu.

Talan er um eina ráðandi marknaðarstøðu, tá ein fyritøka hevur eina so ráðandi búskaparliga støðu, at fyritøkan hevur møguleika at forða fyri munagóðari kapping á viðkomandi marknaði, tí nevnda støða gevur fyritøkum møguleika fyri óheftum atburði mótvegis kappingarneytum, viðskiftafólki og í síðstu atløgu brúkaranum.

Sum meginregla skal misnýtslan vera farin fram á tí marknaði, har fyritøkan hevur eina ráðandi støðu, fyri at talan skal verða um brot á § 11 í kappingarlógini. Ein fyritøka, sum fremur útihýsandi ella útnyttandi atburð á einum marknaði har hon ikki hevur marknaðarráðandi støðu, hevur ikki brotið § 11 í kappingarlógini.

Hetta er tó ikki galdandi um tað er okkurt samband millum marknaðirnar, t.d. um talan er um ein ovara og ein niðara marknað, ella marknaðir, sum á annan hátt eru knýttir. Grundleggjandl skal ráðandi fyritøkan kunna brúka tað vald hon hevur á einum marknað, til at ávirka kappingina á einum øðrum marknaði.

3.2.1. Ráðandi støða

Í sambandi við skilmarkingina í pkt. 3.1.3. var niðurstøðan, at talan er um tríggjar viðkomandi marknaðir. Hesir eru marknaðurin fyri atløguplássum, vørumarknaðurin fyri loðsflutningi og vørumarknaðurin fyri sleipitænastur.

Marknaðurin fyri atløgupláss

Á marknaðinum fyri atløgupláss, har loðsstøðin hevur veitingarskyldu, sambært § 4, stk. 1 í loðslógini, varð viðkomandi vørumarknaður landafrøðiliga skilmarkaður til Fuglafjørð. Á hesum marknað er bert ein veitari av atløguplássum, ið er Fuglafjarðar havn. Sostatt er talan um ein veitara, sum hevur ein marknaðarpart á 100%. Fuglafjarðar havn hevur sostatt monopolstøðu á marknaðinum fyri atløgupláss í Fuglafirði.

Forðingin inn á marknaðin er fullkomin tí tann kommuna, sum ynskir at byggja eina havn, sum kann kappast um skipini, sum P/F Faroe Agency umboðar, ikki hevur møguleika at bjóða tær tænastur, sum eru orsøk til, at skipini hjá P/F Faroe Agency fara inn á Fuglafjørð.

Monopolstøðan styrkist eisini av, at Fuglafjarðar kommuna, sambært loðslógini, er loðsstøðin í kommununi, og at tað er loðsstøðin, sum fyriskipar loðsingina sambært lóg.

Hóast tað er P/F Faroe Agency, sum skal gjalda rokningina fyri millum annað atløgupláss og atknýttar tænastur, hevur P/F Faroe Agency ikki keyparamakt. Hetta framgongur týðiliga av gongdina í málinum. P/F Faroe Agency hevur áhaldandi biðið um, at egnir bátar verða brúktir, men boðini frá Fuglafjarðar havn verið greið. Havnarmeistarin avger, hvør bátur skal brúkast. Sjálvt eftir at P/F Faroe Agency eitt skifti noktaði at gjalda til staðbundna felagið, helt havnin fast um at tilkalla staðbundna felagið. Hetta er ein greið ábending um, at P/F Faroe Agency ikki hevur keyparamakt.

Kappingareftirlitið metir tí, at Fuglafjarðar havn hevur eina marknaðarráðandi støðu á marknaðinum fyri atløgupláss í Fuglafirði.

Marknaðurin fyri loðsflutning

Á marknaðinum fyri loðsflutning, har loðsstøðin hevur veitingarskyldu, sambært § 4, stk. 1 í loðslógini, varð viðkomandi vørumarknaður landafrøðiliga skilmarkaður til Fuglafjørð. Teir veitarar, sum kunnu veita á hesum marknaði, eru úr øllum Føroyum, tó undantikið úr Suðuroynni.

Á markanðinum fyri loðsflutning í Fuglafirði er tann serliga støða, at staðbundna felagið útinnir bróðurpartin av øllum loðsflutningi. Marknaðarparturin hjá felagnum liggur millum 70 - 90%. Orsøkin til hetta er, at staðbundna loðsstøðin, Fuglafjarðar kommuna, fyriskipar loðsingina, og í hesum sambandi letur hon flestu uppgávur til staðbundna felagið. Hetta merkir tó ikki, at staðbundna felagið hevur eina marknaðarráðandi støðu, tí um tann kappingaravlaging verður tikin burtur, sum Fuglafjarðar kommuna fremur, vil marknaðarparturin hjá staðbundna felagnum minka við minst 40 - 60% á viðkomandi marknaði.

Kappingareftirlitið metir tí, at talan er um ein marknað við 7 veitarum, har ongin teirra hevur eina marknaðarráðandi støðu í Fuglafirði.

Leggjast skal afturat, at sambært tí taltilfari, sum Kappingareftirlitið hevur fingið frá Fuglafjarðar havn, so er tað nær um bara staðbundna felagið, og í minni mun P/F Faroe Agency, sum hava loðsflutning í Fuglafirði. Hinir veitararnir hava stórt sæð ongan loðsflutning í Fuglafirði.

Marknaðurin fyri sleipitænastum

Á marknaðinum fyri sleipitænastum, har loðsstøðin hevur veitingarskyldu, sambært § 4, stk. 1 í loðslógini, varð viðkomandi vørumarknaður landafrøðiliga skilmarkaður til Fuglafjarðar havn. Veitarar sum kunnu veita á hesum marknaði eru úr øllum Føroyum, tó undantikið úr Suðuroynni.

Á hesum marknaði eru áleið 5 veitarar, har ongin teirra hevur eina marknaðarráðandi støðu. Orsøkin til hetta er, at ongin veitari hevur ávirkan á, hvussu nógvar uppgávur teir fáa. Tað er staðbundna loðsstøðin, sum fyriskipar loðsingina, og tí er tað hon, sum tekur samband við veitararnar.

Kappingareftirlitið metir tí, at ongin av teimum 5 veitarunum á marknaðinum hava eina marknaðarráðandi støðu.

Leggjast skal afturat, at sambært tí taltilfari, sum Kappingareftirlitið hevur fingið frá Fuglafjarðar havn, so er tað nær um bara staðbundna felagið, og í minni mun P/F Faroe Agency, sum hava sleipiuppgávur í Fuglafirði. Hinir veitararnir hava stórt sæð ongar sleipiuppgávur í Fuglafirði.

3.2.2. Misnýtsla av ráðandi marknaðarstøðu

Marknaðurin fyri atløgupláss

Kappingareftirlitið metir, at Fuglafjarðar kommuna síðani apríl 2014 hevur misnýtt sína ráðandi støðu á marknaðinum fyri atløguplássi í Fuglafirði. Misnýtslan, ið er at sýta P/F Faroe Agency at veita ávísar tænastur, er ikki farin fram á marknaðinum fyri atløgupláss í Fuglafirði, men á tveimum atknýttum marknaðum. Hesir eru marknaðirnir fyrl loðsflutning og fyri sleipitænastur í Fuglafirði.

Fuglafjarðar kommuna hevur síðan 2016 misnýtt sína ráðandi støðu á marknaðinum fyri atløgupláss í Fuglafirði. Misnýtslan, ið er at seta órímiliga umsitingarliga forðing í vegin fyri P/F

Faroe Agency er ikki farin fram á marknaðinum fyri atløguplass í Fuglafirði, men á marknaðinum fyri sleipitænastur í Fuglafirði.

Marknaðurin fyri loðsflutning

Fuglafjarðar kommuna hevur við síni ráðandi støðu á marknaðinum fyri atløguplássi í Fuglafirði, har loðsstøðin hevur veitingarskyldu, sambært § 4, stk. 1 í loðslógini, latið einum staðbundnum felagi at útinna loðsflutning fyri P/F Faroe Agency, hóast P/F Faroe Agency hevur keypt bátar til endamálið og áhaldandi hevur heitt á Fuglafjarðar havn um ikki at umbiðja hesar tænastur frá staðbundna felagnum. P/F Faroe Agency hevur eisini heitt á staðbundna felagið um ikki at útinna hesar uppgávur fyri seg.

Á talvuni niðanfyri sæst, hvussu nógv skip, sum P/F Faroe Agency umboðar, hava havt brúk fyri loðsing, og hvussu ofta P/F Faroe Agency hevur fingið loyvi at flyta loðsin.

Loðsbátatænasta	2014	2015	2016	2017	2018
Skip hjá P/f Faroe Agency	23	81	50	102	42
Staðbundna felagið	19	78	49	63	16
P/f Faroe Agency	4	3	1	39	26

Sum tað framgongur av talvuni, so er tað bert í hendingaførum fram til 2017, at P/F Faroe Agency slapp at flyta loðsin. Síðani Kappingareftirlitið tók málið upp til viðger, og P/F Faroe Agency hevur lagt málið fyri dómstólarnar, er støðan batnað nakað, men felagið verður framvegis forða at avgera, hvør loðsbátur verður settur á uppgávuna. Hetta hóast, at tað er P/F Faroe Agency, sum skal gjalda rokningina fyri flutningin.

Tað stendur øllum feløgum frítt - eisini staðbundna felagnum - at royna at fáa í lag avtalur við reiðarí, sum hava brúk fyri loðsflutningi. Tá er talan um fría kapping. At Fuglafjarðar havn velur at ganga ímóti ynskjunum hjá P/F Faroe Agency merkir, at teir eisini ganga ímóti ynskjunum hjá teimum reiðaríum, sum felagið umboðar.

Tann fyrimunur, sum staðbundna felagið fær av hesum, er ein kappingaravlaging. Kundarnir, sum í siðsta enda eru tey reiðarí, sum P/F Faroe Agency umboðar, missa rættin til at velja tann tænastuveitara, sum tey ynskja, og møguleikan at tingast um innihaldi av tænastuni og prís.

Kappingareftirlitið metir tí, at talan er um eina roynd hjá Fuglafjarðar kommunu at tilluta einum staðbundnum felagið eitt monopol.

Ofta hava skip, sum koma til Føroyar, ongin ítøkilig ynskir um, hvør skal veita teimum t.d. loðsflutning. Tá er vanligt, at loðsstøðin tekur sær av hesum, og ofta fær staðbundna felagið uppgávuna. Bæði í Klaksvík og Tórshavn eru staðbundin feløg, sum kunnu veita loðsbátatænastur. Hóast hetta, so er tað bert í Fuglafirði, at P/F Faroc Agency verður beinleiðis forða í at brúka egnar bátar til flutning av loðsi.

Tann forðing, sum Fuglafjarðar kommuna fremur, kann sostatt ikki grundast á, at loðsstøðin er áløgd eina veitingarskyldu í samband við loðsing ella onnur viðurskifti í hesum sambandi.

Marknaðurin fyri sleipitænastum

Fuglafjarðar kommuna hevur við síni ráðandi støðu á marknaðinum fyri atløguplássi í Fuglafirði, har loðsstøðin hevur veitingarskyldu, sambært § 4, stk. 1 í loðslógini, latið einum staðbundnum felag at útinna sleipitænastur fyri P/F Faroe Agency, hóast P/F Faroe Agency hevur keypt bátar til

hetta endamál, og áhaldandi hevur heitt á Fuglafjarðar havn um ikki at umbiðja hesa tænastur frá staðbundna felagnum. P/F Faroe Agency hevur eisini heitt á staðbundna felagið um ikki at útinna hesar uppgávur.

Á talvuni niðanfyri sæst hvussu nógv skip hjá P/F Faroe Agency hava havt brúk fyri sleipitænastum, og hvussu ofta P/F Faroe Agency hevur fingið loyvi til at sleipa skipini.

Sleipitænasta	2014	2015	2016	2017	2018
Skip hjá P/f Faroe Agency	12	43	26	58	23
Staðbundna felagið	0	17	19	10	0
P/f Faroe Agency	12	26	7	48	23

Sum tað framgongur av talvuni, so hevur staðbundna felagið útint sleipiuppgávur, sum hava verið í sambandi við, at skip hjá P/F Faroe Agency eru komin og farin úr Fuglafirði. Í 2014 varð hetta ikki gjørt, tí hetta var áðrenn báturin hjá staðbunda felagnum hevði fingið størri motor. Í 2015 varð avtala gjørd millum staðbundna felagið og annað felag um leigu av báti, tí báturin hjá staðbundna felagnum skuldi skifta motor. Tað framgongur av tølunum, at staðbundna felagið fekk nær um helmingin av uppgávunum í 2015, og bróðurpartin í 2016. Í 2017 vórðu munandi færri uppgávur tillutaðar og fram til apríl í 2018, varð staðbundna felagið ikki brúkt. P/F Faroe Agency hevur síðani boðað Kappingareftirlitinum frá at forðingarnar halda fram.

Atburðurin hjá Fuglafjarðar kommunu hevur við sær, at P/F Faroe Agency verður bundið til at brúka annan veitara at útinna tænastu, sum felaglð sjálvt hevur bundið seg til at útinna. Somuleiðis verður felagið avskorið frá at kunnu tingast um innihald og prís á tænastuni. Felagið missir eisini tann kostnaðar fyrimun, sum tað hevur við sær, at ein og sami bátur fremur loðsflutning og sleip.

Tað stendur øllum feløgum frítt at royna at fáa ílag avtalur við skip, sum hava brúk fyri sleipitænastum. Hetta er frí kapping. Tað, at Fuglafjarðar kommuna velur at tilluta staðbunda felagnum loðsflutning fyri skip, sum P/F Faroe Agency umboðar, er harafturímóti ein forðing fyri frælsari kapping millum veitarar.

Ofta hava skip, sum koma til Føroyar ongin ítøkilig ynskir um, hvør skal veita t.d. sleipitænastu Tá er vanligt, at loðsstøðin tekur sær av hesum, og ofta fær staðbundna felagið uppgávuna. Bæði í Klaksvík og Tórshavn eru staðbundin feløg, sum kunnu veita sleipitænastu. Hóast hetta, so er tað bert í Fuglafirði, at P/F Faroe Agency verður forðað í at brúka egnar bátar til sleip.

Tann forðing, sum Fuglafjarðar havn fremur, kann sostatt ikki grundast á, at loðsstøðin er áløgd eina veitingarskyldu í sambandi við loðsing, ella onnur viðurskifti í hesum sambandi.

Umsitingarlig forðing

Fuglafjarðar havn hevur tann 18. apríl 2016 innført eina mannagongd, har P/f Faroe Agency í hvørjum einstøkum føri skal framleggja eina váttan frá reiðaríinum, um teirra bátar skulu brúkast til sleip í Fuglafirði.

Talan er um eina umsitingarliga forðing, sum Fuglafjarðar havn setur, uttan at tað er nøkur verulig orsøk til hetta. Grundgevngin hjá Fuglafjarðar havn var, at teir ikki vildu áleggla reiðaríum eyka kostnað við, at bátur mátti koma aðrastaðni frá í landinum. Í fyrsti lagi er ongin orsøk at halda, at hetta fór at kosta reiðarínum meira. Avtalur millum reiðarí og umboðsmenn fara fram eftir vanligum handilsligum treytum, og talan er um partar, sum virka innan øki teir kenna. Tað er tí

eingin orsøk at halda, at reiðaríini, sum P/F Faroe Agency umboðar, ikki megna at røkja egin áhugamál hesum viðvíkjandi. Í øðrum lagi eru slík atlit ikki nevnd í loðslógini.

Endamálið við at innføra slíka mannagongd kann tí bara vera at seta forðingar í vegin fyri samstarvinum millum P/F Faroe Agency og tey reiðarí, sum felagið umboðar.

Uppgávan hjá einum umboðsmanni er at røkja uppgávur fyri eitt felag, so felagið sleppur undan at brúka tíð og orku til hetta. Tá ið Fuglafjarðar havn setur sum krav fyri at nýta bátarnar hjá P/F Faroe Agency, at ein váttan skal fyriliggja frá reiðarínum, so kann samstarvið millum umboðsmann og reiðarí ikki fara líka høgliga fram. Hetta avmarkar fyrimunin við at hava ein umboðsmann.

Reiðaríið fær ikki tað ætlaða burtur úr samstarvinum við P/F Faroe Agency, tí reiðaríið skal seta tíð og orku av til eina uppgávu, sum er latin P/F Faroe Agency at útinna.

Tað framgongur av talvunum omanfyri, at bátarnir hjá P/F Faroe Agency vórðu nær um ikki brúktir í 2016. Bert einaferð varð bátur hjá P/F Faroe Agency brúktur til loðsflutning, og bert sjey ferðir vórðu bátar hjá P/F Faroe Agency brúktir til sleipitænastur. Orsøkin var, at P/F Faroe Agency noktaði at koma við áðurnevndu váttanum.

Tað er bert Fuglafjarðar havn, sum hevur innført slíka mannagongd. Tórshavnar havn, Klaksvíkar havn og Runavíkar havn hava ikki kravt av P/F Faroe Agency, at slík váttan skal fyriliggja.

Tann forðing, sum Fuglafjarðar kommuna fremur við áðurnevndu mannagongd, kann sostatt ikki grundast á, at loðsstøðin er áløgd eina veitingarskyldu ella onnur viðurskifti í hesum sambandi.

3.2.3. Ávegis niðurstøða um misnýtslu av ráðandi marknaðarstøðu
Kappingareftirlitið hevur staðfest, at Fuglafjarðar kommuna hevur misnýtt sína ráðandi støðu við at seta forðingar í vegin fyri P/F Faroe Agency.

Fuglafjarðar kommuna hevur forða P/F Faroe Agency at útinna loðsflutning og sleipitænastur í Fuglafirði fyri reiðarí sum felagið umboðar, við at tilluta staðbundnum felagið hesar tænastur at útinna.

Fuglafjarðar kommuna hevur somuleiðis sett umsitingarligar forðingar í vegin fyri, at bátarnir hjá P/F Faroe Agency vórðu brúktir til sleip, tá skip, sum felagið umboðar, komu til ella fóru frá bryggju í Fuglafirði.

3.3.Samlað niðurstøða
Kappingareftirlitið metir, at Fuglafjarðar kommuna hevur eina ráðandi marknaðarstøðu á viðkomandi marknaðinum fyri atløguplass í Fuglafirði.

Fuglafjarðar kommuna hevur síðani apríl 2014 brúkt hesa støðu at forða P/F Faroe Agency at útinna tænastur á viðkomandi marknað fyri loðsflutning í Fuglafirði, sum lýst í parti 3.2.2.

Kappingareftirlitið metir, at Fuglafjarðar kommuna við hesum hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini.

Fuglafjarðar kommuna hevur síðani apríl 2014 brúkt sína ráðandi støðu á viðkomandi marknaði fyri atløguplass í Fuglafirði.

Fuglafjarðar kommuna hevur síðan 2014 brúkt hesa støðu til at forða P/F Faroe Agency at útinna tænastur á viðkomandi marknað fyri sleipitænastur í Fuglafirði, sum lýst í parti 3.2.2.

Kappingareftirlitið metir, at Fuglafjarðar kommuna við hesum hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini.

Fuglafjarðar kommuna hevur síðani apríl 2016 brúkt sína ráðandi støðu á viðkomandi marknaði fyri atløguplass í Fuglafirði.

Fuglafjarðar kommuna hevur síðani 2016 brúkt hesa støðu til at seta umsitingarliga forðing fyri, at P/F Faroe Agency kundi útinna tænastur á viðkomandi marknað fyri sleipitænastur í Fuglafirði, sum lýst í parti 3.2.2.

Kappingareftirlitið metir, at Fuglafjarðar kommuna við hesum hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini.

4. Boð
Mælt verður Kappingarráðnum at geva fylgjandi boð, sbrt. § 11, stk. 4 í kappingarlógini:
Tað verður hervið boðað frá, at Fuglafjarðar kommuna hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini við at tilluta staðbundnum felagi tænastur at útinna, sum P/F Faroe Agency áhaldandi hevur boðað frá, at felagið sjálvt vil útinna, og við at seta óneyðuga umsitingarliga forðing í vegin fyri samstarvinum millum P/F Faroc Agency og tey reiðarí, sum felagið umboðar.

Tað verður tí álagt Fuglafjarðar kommunu, sambært § 11, stk. 4 í kappingarlógini, at steðga við at forða P/F Faroe Agency at útinna loðsflutning ella sleipitænastur í Fuglafirði.

Tað verður somuleiðis álagt Fuglafjarðar kommunu, sambært § 11, stk. 4 í kappingarlógini, at avtaka tí umsitingarligu forðing, sum varð sett í verk í 2016.

Kæran
Kæra frá Fuglafjarðar kommunu er dagfest 19. november 2018:
"Við hesum verður vegna Fuglafjarðar kommunu (FK) kært til Vinnukærunevndina um avgerð hjá Kappingarráðnum frá fundi 11. oktober 2018. Avgerdin er send/fráboðað kommununi við teldubrævi frá Kappingareftirlitinum tann 24. oktober 2018.

Kappingarráðið/Kappingareftirlitið verða niðanfyri undir einum nevnd KE.

Kærda avgerðin
KE hevur tikið avgerð um, at FK hevur framt brot á §11, stk. 1 i kappingarlógini við at:
1. forða P/F Faroe Agency (FA) at útinna loðsflutning, sum nærri lýst í parti 3.2.2.
2. forða FA at útinna sleipitænastur,
3. seta umsitingarliga forðing fyri FA.

Í framhaldi av hesum hevur KE tikið avgerð um at geva FK boð um at 1) steðga vid at forða FA í at útinna loðsflutning, 2) steðga við at forða FA í at útinna sleipitænastur, tá skip, sum FA er umboð fyri, koma og fara av Fuglafirði, og 3) at steðga við at biða reiðarí, ið FA umboðar, um váttan fyri, um bátar hjá FA skulu brúkast til loðsflutning og sleipitænastur.

FK er ikki samd við KE í, at kommunan hevur brotið kappingarlógina, § 11, stk. 1.

Í sambandi við kæruna verður tí gjørt galdandi, at grundarlag ikki er fyri tiknu avgerðini, at grundleggjandi málsviðgerðarfeilir eru gjørdir og at Vinnukærunevndin samanumtikið eigur at seta avgerðina úr gildi.

Um kæran ikki verður ógildað verður í øðrum lagi gjørt galdandi, at málið eigur at verða heimvíst til nýggja viðgerð á nøktandi grundarlagi, bæði í mun til einsíðugu útleggingina av loðslógini, manglandi hoyring av FK um skjøl/upplýsingar, sum verða nýtt í avgerðini, men sum ikki framganga av nøkrum tilfari, ið FK er hoyrd um, manglandi hoyring av øðrum pørtum og í mun til málsfyrireiking generelt, har KE í viðgerðini als ikki tekur atlit til heilt grundleggjandi sjónarmið hjá FK. Hetta er ikki í samsvar vid fyrisitingarrættin, herundir § 18 í fyrisitingarlógini um hoyring og § 23 um kravið til grundgevingar, tí KE hevur júst ikki greitt frá í avgerðini, hví metingin er, at KE ikki tekur undir við grundleggjandi sjónarmiðunum hjá FK.

Somuleiðis verður biðið um, at kæran fær steðgandi virknað.

Grundgevingin fyri hesum er, at talan er um mál, ið hevur sera stóran týdning fyri skipanina av virkseminum hjá FK. Málið hevur koyrt síðan 2014, har KE hevur verið innyvir í 2016 og málið, ið avgerð varð tikin um, og sum er fráboðað 24. oktober 2018, er sent KE í desember 2017/januar 2018. Tá so er, er eingin orsøk til, í teirri avmarkaðu tíðini, sum Vinnukærunevndin viðger málið, at kollvelta skipanina og seta loðsstøðina til viks í mun til val av loðsbáti samsvarandi avgerðini hjá KE.
Henda avgerð rakar ikki bara FK, men allar kommunalar loðsstøðir í landinum, sum mugu metast skulu fylgja sama leisti, ið myndugleikin kemur til. Hetta talar eisini fyri steðgandi virknað til avgerðin er roynd.

FA vil heldur ikki vera fyri missi, um avgerðin fær steðgandi virknað, tí sakarmálið millum FA og FK, har FA tann 21. mars 2018 hevur stevnt kommununi eftir endurgjaldi fyri hvønn einstakan flutning av loðsi til skip, sum FA sigur seg umboða og hava framíhjárætt at flyta loðsar til og frá. Tað sakarkravið verður leypandi hækkað av FA fyri hvønn einstakan flutning, ið FA ikki fær framíhjá, og kravið er sambært seinasta skrivinum frá advokatinum hjá FA nú uml. kr. 2,3 milliónir. Hesum vil rættarskipanin tí taka sær av.

Generellar viðmerkingar til málið
KE byggir sína avgerð á, at FK ikki kann samskifta við skip ella reiðaríð, men er bundin at samskifta við skipsagentin, um ein slíkur er, tí annars er talan um umsitingarliga forðing v.m.

Hartil byggir KE avgerðina á, at ein kommuna, her FK, ikki hevur rætt til at hava ávirkan á, hvønn bát kommunan frá tíð til aðra velur at umbiðja at flyta kommunala loðsin á eitt skip, taka hann av skipinum, at útinna loðsingina frá báti, sum kann koma fyri, ella at flyta aðrar loðsar millum skip, sum eisini kann koma fyri.

Hesum er ikki grundarlag fyri sambært loðslógini, kappingarlógin heimilar ikki tílíkari avgerð, og tey úttalilsi, sum eru fingin til vega av KE frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum (UVMR) stuðla heldur ikki undir slíkari útlegging av rættarstøðuni.

Tí er FK grundleggjandi ósamd við KE í, at kommunur treytaleyst skulu hava skyldu at brúka ein ávísan privatan veitara (sum bjóðar seg til, tí viðkomandi er agentur hjá einum skipi, ella sigur seg hava avtala við skipið um loðsflutning) at flyta kommunala loðsin, uttan at loðsstøðin hevur ávirkan á hetta. Loðsur og loðsflutningur eru sambært loðslógini og sambært UVMR tveir integreraðir partar av teirri veitingarskyldu, sum kommunur hava eftir loðslógini og tá kann ein partur av veitingarskylduni ikki brádliga verða latin upp til skipsmeklarar ella aðrar bátaeigarar at hava ræði á uttan serliga heimild.

KE hevur í hesum sambandi gjørt enn eina roynd at skilja loðsin og loðsflutningin frá hvørjum øðrum við nú í endaligu avgerðini at meta, at veitingarskyldan í mun til loðsflutning bara skal eitast at fevna um at tryggja, at loðsur er tøkur (og at loðsstøðin harvið ikki kann hava ávirkan á, hvør báturin er, sum verður nýttur, tí tað skal FA ella annar meklari gera av, um teir hava avtalu við skip ella reiðarí um loðsflutning). Hesum er ikki grundarlag fyri i loðslógini, og heldur ikki er grundarlag fyri hesi fatan í úttalilsinum hjá UVMR.

Hóast KE aftur og aftur grundar rættin hjá privata felagnum FA til at stýra loðsflutninginum hjá kommunalu/almennu loðsstøðini á, at FA hevur avtalu við skip og reiðarí um hetta, so eru hesar avtalur ongantíð komnar til KE, og FK hevur heldur ikki sæð hesar. Heldur ikki eru hesar avtalur komnar fram í sakarmálinum, sum koyrir, hóast FK heitti á FA um at leggja hesar fram longu í svarritinum frá FK frá 28. mai 2018.

KE grundar harvið eisini avgerðina á nakrar avtalur, ið hvørki KE ella FK hava sæð ella kenna. Í hesum sambandi er viðkomandi at nevna aftur, at FK einki kennir til, at skip ikki vilja hava loðs fluttan til ella frá eftir tí leisti, sum FK hevur staðið fyri, har bátur verður umbiðin eftir tørvi, stundum bátur frá FA, stundum aðrir. Leggjast kann aftrat, at FK ongantíð hevur umbiðið bát til loðsflutning, sum ikki lýkur øll myndugleikakrøv.

Um loðsstøðina hjá Fuglafjarðar kommunu/Fuglafjarðar Havn
Fuglafjarðar Havn samskiftir ikki einans við agentar hjá skipum og reiðaríum. Ofta koma skip á havnina, men uttan at agentur hevur sett seg í samband við havnina frammanundan. Hetta er eisini galdandi fyri skip, sum FA sigur seg umboða ella hava umboðað.

Skip, ið aðrir agentar (t.d. Faroe Ship, Thor Shipping, North-West Charter, Thor í Hósvík, Posta, Pelagos, Havsbrún, Vónin, Vistir, KJ Hydraulik og Faroe Maretime Service) umboða, eru stundum á fjørðinum og havnameistarin tosar stundum við skipini beinleiðis, stundum við agentarnar. Hetta er sum so tilvildarligt og valdast umstøðurnar, tí ofta kontakta skipini havnakrivstovuna/loðsstøðina beinleiðis, uttan at nakar agentur er uppíblandaður.

Gjørt verður galdandi, at havnin/loðsstøðin, soleiðis sum KE leggur til grund, ikki kann hava skyldu til bara at fyrihalda seg til ein agent, um/tí hesin meldar ankomst hjá loðsstøðini sum umboð fyri ett skip. Innan fyrisitingina er ikki óvanligt at spyrja partin um umboðið, tá onkur letur seg umboða, bæði fyri at vissa skal vera, men eisini um orsøk er til at kontakta partin beinleiðis. Tí er í prinsippinum einki í vegin fyri, at FK hevur avklárað nøkur praktisk viðurskifti kring komu og fráferð, herundir losðflutning beinleiðis við skipið.

At KE soleiðis hartar FK fyri at kontakta skip í ávísum føri er tí púra uttan orsøk og grundarlag. Hetta tykist tí tíverri sum enn eitt av argumentunum, ið KE leitar sær fyri teirri niðurstøðu, sum tykist gjørd av KE, tá málið byrjaði, og sum er komin týðiliga til sjóndar longu á fundi 23. april 2018. Tá tosaði umboð fyri KE aftur og aftur um sjálvsagda rættin hjá FA at føra kommunalt settar loðsar við sínum privata báti til øll tey skipini, sum FA so ella so sigur seg umboða. Aftur og aftur bleiv kommunan tá eisini løgd undir at favorisera lokala veitaran, men uttan at KE vildi fyrihalda seg til at sakligar orsøkir vóru til val av báti frá tíð til aðra.

Kappingarlógin og próvbyrða
Próvbyrðuna fyri, at FK misnýtir eina ráðandi støðu og fremur brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini, eigur KE. FK ger galdandi, at henda próvbyrða ikki er lyft í málinum.

Í mun til evt. ráðandi støðu er tað so, at tað kunnu vera subjektiv viðurskifti hjá tí ráðandi, sum sakliga kunnu grunda eina ávísa atferð, uttan at talan er um misnýtslu, t.d. at valið av báti frá tíð til aðra hevur týdning fyri útinningina av teirri loðstænastu, ið FK stendur fyri.

Hóast FK ferð eftir ferð hevur víst á, at FK má kunna velja, hvønn bát loðsstøðin skal nýta frá tíð til aðra, og at loðsstøðin faktisk eisini velur millum ymisku bátarnar, so hevur KE als ikki tikið atlit til hetta.

Hartil má tað liggja á KE at ávísa, at FK hevur havt ætlan um at ávirka ella vreingja kappingina við síni atferð, men hetta er ikki ávist.

Eisini kunnu tað vera objektiv viðurskifti, ið kunnu grunda val av báti. KE hevur ikki viðgjørt ella avvíst, at viðurskiftini, sum FK hevur víst á í mun til val av báti, ikki kunnu grunda valið av loðsflutningi frá tíð til aðra.

FK ger galdandi, at neyðuga prógvbyrðan ikki er lyft í málinum, tí KE tekur als ikki atlit til tey sjónarmið, ið FK hevur ført fram sum orsøk fyri at velja aðrar veitarar enn bara FA. Hetta gevur sum so meining, tá hugsað verður um, at KE byggir tilmæli og avgerð á, at FA eigur ein sjálvsagdan rætt (orðingin sjálvsagdur rættur er nýtt av KE í tilmælunum líka fram til avgerðina) til ávísan part av loðsflutninginum, tí føroyska felagið sigur seg hava avtalur um loðsflutning við ymisk reiðarí.

Hetta vil hartil hava beinleiðis og víttfevnandi avleiðingar fyri allar aðrar aktørar innan hetta tænastuøkið, sum vilja verða settir til síðis uttan víðari og skerdir frá at bjóða kommununi sína tænastu.

Spurnartekin verður tí sett við, um tann parturin av veitingarskylduni eftir loðslógini, sum er loðsflutningur, er ætlaður og egnaður at fremja í kapping, tá ongin annar enn kommunan kann umbiða tænastuna. Hartil verður spurnartekin eisini sett við, um tað yvirhøvur gevur meining at tosa um misnýtslu av ráðandi støðu, tá FK sambært KE als ikki hevur rætt at velja flutning?

Misnýtsla má onkursvegna hava sum fortreyt, at tú hevur rættin at gera av, men síðan tekur avlagandi avgerð. Tað kann ikki vera støðan hjá FK, um privatur veitari eigur rættin til flutningin uttan víðari.

Um sleipivirksemi

Málið hjá KE er onkursvegna eisini blivið til eitt mál um, at FK skal fremja mismun millum sleipibátatænastuveitarar og skal hava forðað FA at útinna sleipibátavirksemi á fjørðinum til fyrimuns fyri ein lokalan veitara av sleipibátatænastu.

Sum FK fleiri ferðir hevur ført fram, metir FK seg ikki sum loðsstøð ella havnamyndugleika á nakran hátt at hava kravt ávísan bát at sleipa, forðað ávísum báti at sleipa ella líknandi, tá skip fara ella koma á Fuglafjørð.

Tað er komið fyri, at loðsstøðin/havnameistarin hava biðið meir enn ein bát komið at sleipa/trýst, tá talan hevur verið um stór skip, ella tá líkindini hava kravt tað. Eisini hevur okkurt verið umrøtt um skipan av sleipitænastunum, men forðingar hevur FK ikki lagt fyri FA ella onnur. Loðstøðin/havnin biðir vanliga um sleip, tá skip hava tørv á tí, men leggur seg seg ikki í, hvønn ymisku skipini ynskja at sleipa. Er talan um FA, so eru teir oftast á fjørðinum, tá teir eru agentar fyri skipið, og tá verður FA nýtt. FA er tá ikki altid á fjørðinum - heldur ikki altið tá skip, ið FA umboðar koma ella fara. Tað er ført fram fyrr, men tað gevur KE als ikki ans.

FK er tú púra ósamd í hesum partinum av avgerðini, sum ikki hevur hald í faktisku viður skiftunum í málinum.

Um skipsagentar og umsitingarligar forðingar

Fyrst er at siga, at skrivið dagfest 18. april 2018 (ein leyst orðaður teldupostur, sum eingin hevur nýtt ella givið ans síðan uttan KE) frá Fuglafjaðrar havn, ið KE vísir til, ikki kann metast sum nøkur umsitingarlig forðing, soleiðis sum KE førir fram og leggur til grund.

Orsøkin til skrivið er rímilig og saklig, tí havnastjórin var komin í ta ógreiðu støðu, at hann móttók skip, ið sambært FA stundum ynskti ein, stundum annan bát at flyta loðs ella til at avgreiða sleip ella trýst.

Fyri at hava greiðar mannagongdir í eini havn, har nógv og stór skipa koma og fara er tí blivið spurt til 2-3 skip, ið FA umboðar, tí ógreiða hevur verið um, hvat skipini ynsktu ella høvdu brúk fyri. Hetta hevur ikki bara týdning fyri trygd, men eisini logistikkin i havnini.
At agentur er knýttur at skipinum kann tí ikki forða einum havnastjóra at tryggja greidleika, ella at kontakta skip, júst sum agenturin ikki er nøkur forðing fyri, at skipið kann kontakta og stundum kontaktar havnina beinleiðis.

Um FK skuldi hildið stýr á, hvør er agentur hjá hvøjum einstøkum skipi, og ansa eftir ikki at kontakta skip heldur enn agent um so grundleggjandi viðurskifti sum loðs, so má hetta hartil metast sum ein órímilig skylda at áleggja eini loðsstøð, ið ikki kann gerast uttan at heilt serligar orsøkir og grundarlag er fyri tí. Tað er ikki ávíst í hesum máli.

FK er tí eisini ósamd í hesum partinum av avgerðini, sum ikki er sakliga grundað.

FK dugir sum áður nevnt ikki at síggja nakað skjal í málinum um, at skip ikki vilja brúka onkran av teim veitarum, ið kommunan/loðsstøðin hevur boðsent at føra loðsin. Hóast hetta hevur KE fitt av hugleiðingum um hetta, sum ikki eigur at hava týdning fyri málið. At nýta óviðkomandi og ódokumenterað uppáhald sum argument fyri avgerðini er ikki saklig fyrisiting.

Hóast ongar upplýsingar eru um avtalurnar hjá FA við reiðaríini/skipini, hvat tær snúgva seg um, nær tær eru gjørdar v.m., sí eisini niðanfyri, so vil KE, at FA grundað á hesar avtalur skal hava einkarrætt til alt, ið FA sigur seg hava avtalu um, og at FK tá ongan rætt hevur at umbiðja flutning frá øðrum enn FA.

At vera agentur (skipsagentur) kann vanliga sammetast við at vera eitt slag av meklara, ið skipar fyri fraktuppgávum og ein, sum serviserar reiðarí og manning í sambandi við komu og fráferð og meðan skip eru í havn, umframt at samskifta við myndugleikar.

FK kunnugt er heldur ikki vanligt, at agentar útinna sleipitænastur og loðsbátatænastu.

At agentar skulu hava serligan rætt at flyta loðsar, ið kommunur/tað almenna hevur lógarfesta skyldu at veita, til og frá, er kommununi kunnugt heldur ikki skipan, ið finst aðrastaðni. Hetta var heldur ikki skipanin, ið var galdandi áðrenn loðslógina, og onki grundarlag er fyri at halda, at hetta er broytt við loðslógini.

Um okkara loðslóggáva skal forða loðsstøðini at hava ræði á ella ávirkan á val av loðsbáti frá tíð til aðra, so verður gjørt galdandi, at staðilig heimild/áseting má vera í lógini um slíka avmarking fyri tann, ið hevur loðsskylduna. Tað er ikki støðan í galdandi loðslóg.

At ein agentur hevur avtalu við reiðarí um, hvussu kommunalu loðsarnir verða fluttir til og frá skipum, sum umbiðja loðs, og harvið skal hava einkarrætt ella framihjárætt til at flyta kommunalu starvsfólkini til og frá arbeiði í tí sambandinum, sæst kappingarlógin heldur ikki hava ásetingar um.

FK ger tí galdandi, FK ikki er bundin til bara at samskifta við agentar um loðsviðurskifti i havnini. Eisini verður gjørt galdandi, at § 11, stk. 1, í kappingarlógini ikki kann grundað ella elva til, at einstakur privatur veitari/agentur kann fáa serstøðu og taka ræði á veitingarskylduni hjá kommununi í mun til loðsflutning til og frá ávísum skipum, har kommunala loðsstøðin síðan er bundin at fylgja tí privata.

Um loðslógina

Sum tað framgongur av viðmerkingunum til uppskotið til loðslógina, so byggir hon á ta skipan, sum var, har kommunurnar/havnirnar veittu hjálp til skip í sambandi við sigling inn og út úr havnunum.

Hyggja vit at lógarviðmerkingunum í uppskotinum til loðslógina um gjald, so verður har røtt um, at loðsskipanin skal vera sjálvfíggjað. Víst verður eisini til, at í øðrum londum eru loðsskipanirnar í útgangsstøði sjálvfíggjaðar.

Her verður yvirskipað røtt um eina loðsskipan og tað verður ikki gjørdur skilnaður millum gjald fyri loðsin á aðru síðuni og gjald fyri loðsflutningin á hinu síðuni.

Tá so er, er talan um skipan við gjøldum fyri veittar tænastur, ið mugu standa mát við kostnaðin. At satsirnir fyri loðsarnir eru ásettir generelt, meðan kostnaðurin fyri loðsbátin er eftir rokning broytir onki uppá, at prinsipielt er bara talan um, at loðsskipanin ikki er ókeypis, men skal vera sjálvfiggjað.
Eisini er tað meira upplagt at hava somu tímaprísir fyri loðsarnar heldur enn loðsbátarnar, sum ikki eru/nýtast at vera líka. Vóru somu satsir ásettir fyri bátarnar bleiv skipanin ikki sjálv-figgjað, uttan so, at bátarnir vóru líka og t.d. sigldu líka langt við loðsum í ymisku havnunum. Tað er ikki støðan og kann neyvan vera støðan.

KE vísir til, hvussu onkur onnur loðsstøð í landinum hevur skipað flutningin. Til hetta er at siga, at ein myndugleikatulking sum tann hjá KE av nýggju loðslógini ikki bara kann leggja seg upp at, hvussu aðrar havnir hava skipað seg tá tað kemur til flutning av kommunalu loðsunum til og frá.

At UVMR í einum teldubrævi frá 6. april 2017 hevur svarað generelt, at í loðslógini eru ongar ásetingar um loðsbátavirksemi, sum seta kappingarlógina til viks, er ikki tað sama sum, at loðsbátavirksemi einki hevur við loðsing at gera ella at loðsbátavirksem ikki kann verða skipað eftir tørvinum hjá kommunalu loðstøðini. Hetta er ikki minst, tá bæði UVMR og KE ásanna, at loðsstøðin eins væl kundi átt loðsbát, umframt at UVMR nevnir møguleikan at útveita tænastuna.

Aftur og aftur hevur FK heitt á KE um at venda sær aftur til UVMR og spyrja aðalráðið, um loðslógin skal skiljast soleiðis, at tað at flyta loðs einki hevur við loðsstøðina at gera, at tað fullkomiliga er upp til privat at gera avtalur um flutning av kommunalu loðsunum og at loðsstøðin skal hava skyldu at brúka ávásan bát hjá privatum veitara, alt eftir hvørjir agentar hava avtalur við skip ella ikki um agentur, sleip, loðsflutning v.m.

Hetta var tí, at KE í tveimum tilmælum um brot á fyrst § 12 síðan § 11 í kappingarlógini legði til grund, at loðsflutningur onki hevði við loðsveitingarskylduna eftir loðslógini at gera. KE legði tá, við tilvísing til svarið frá UVMR frá 6. april 2017, til grund, at loðsflutningur onki hevur við loðslógina at gera.

Hesum hevur FK ongantíð verið samd í.

Sama er í mun til galdandi fyriskriftir um loðsfør, tí loðsstøðin skal hava regluligar bjargingarroyndir saman við loðsbátinum. Hetta tengir loðs og flutning til eina veiting.

FK hevur aftur og aftur víst á, at loðsflutningur og loðsing er tengt at hvørjum øðrum í størri mun enn KE tykist góðtaka. Tað vísir eisini kunngerðin um loðsing, sí t.d. §§ 6-10 um, hvussu loðsing verður framd, um tað, at seta loðs á skip, um at loðsa frá báti v.m. sama framgongur av § 13 í loðslógini. Somuleiðis er greitt í almennu viðmerkingunum til uppskotið til loðslógina, kap. 2 um figgjarligu avleiðingarnar, litra B fyri kommunur. Har framgongur, at "Eftir uppskotinum verða í kunngerð ásettar reglur um gjald fyri loðsing, soleiðis at útreiðslurnar av skipanini skulu verða fíggjaðar við gjøldum. Gjøldini fyri loðsing skulu rinda fyri útreiðslur til tey skeið, sum loðsar skulu hava, útgerð, samsýning/løn til loðslar, útreiðslur til loðsbát v.m."

Tí er ikki hald í sundurtaðingini av loðsingini og loðsflutninginum, sum KE leggur fyri dagin, heldur ikki í mun til gjald.

Gjørt verður tí galdandi, at grundarlag ikki er fyri teirri sera avmarkandi tulking av loðslógini, ið KE leggur fyri dagin, tá KE tykist hava sum fortreyt, at loðsbátur/loðsflutningur onki hevur við loðsing og loðslógina at gera. Aðrastaðni er heilt vanligt – og soleiðis legði áður galdandi loðslógin eisini til grund, sí t.d. § 33 har, at loðsur og loðsbátur so ella so hoyrdu saman. Tá so er kann ein myndugleiki ikki uttan serligt grundarlag velja at leggja aðra fatan til grund, har loðsbátur og loðsflutningur onki hevur við loðsing og loðsstøðir at gera. Slíkt grundarlag er ikki í hesum máli.

Sambært loðslógini liggur tað á kommununum/havnunum at tryggja, at bátur er tøkur til uppgávuna (sí kap. 2 í viðmerkingunum). So langt er harvið greitt, at loðsbátar eru partur av uppgávuni hjá loðsstøðini at tryggja.

Áðrenn KE soleiðis burturtulkaði øll atlit til kommunalu loðsstøðina tá um loðsflutning ræður, varð tí heitt á KE um at fáa eitt gjølligari svar ella upprit frá UVMR um málið, heldur enn bara at seta einfalda spurningin um kappingarlógin er sett til viks ella ikki við loðslógini.

Hetta fekk FK síðan fatan av fór at verða avklárað, tí á fundi í Kappingarráðnum 22. august 2018, tá málið var fyri har, var áheitan aftur løgd fram og ongin avgerð bleiv tikin á fundinum. Eftirfylgjandi frættir FK so 1. oktober 2018, at UVMR er eftirspurt aftur. Tíverri spurdi KE aftur hesuferð á selektivan hátt og bara í mun til § 2, stk. 4 í kappingarlógini, sí skrivi frá KE frá 30. august 2018.

KE hevur sum nevnt frá byrjan lagt til grund, at FK brýtir kappingarlógina so ella so. Byrjað varð viðat lýsa hetta sum mál um ólógligan stuðul eftir § 12. Síðan var hálsað um til, at tað via tulkingina hjá KE av loðslógini (um at loðsflutningur ikki er partur av veitingarskylduni há loðsstøðini) snúi seg um misnýtslu av ráðandi støðu sambært § 11 tá FK ikki letur ein privatan veitara at fluta allar kommunalar loðsar til skip, ið hesin veitarin umboðar.

Nú Uttanríkis- og vinnumálaráðið (UVMR) hevur staðfest, at sambært loðslógini fevnir veitingarskyldan og heimildin hjá kommunum at gera avtalur við privat bæði um sjálvan loðsin og um loðsflutningin, so er hetta heilt grundleggjandi argumentið hjá KE í tilmælinum frá august 2018 burtur. Harvið staðfestir UVMR tað, sum FK allatíðina hevur víst á.

Kortini er í endurskoðaða tilmælinum frá 1. oktober og i avgerðini aftur ein útlegging hjá KE av loðslógini og ein útlegging av svarinum frá UVMR, hareftir loðstænastan bara fevnir um tað at hava loðsflutning tøkan.

Hetta er eftir bestu sannføring ikki grundarlag fyri at leggja í svarið frá UVMR, og hetta ber enn sum áður ikki til at leggja í loðslógina. Tvørturímóti skal flutningurin av kommunala loðsinum síggjast sum ein heildarpartur av tí at hava veitingarskyldu í mun til loðs. Kortini hevur KE alla

tíðina vilja skilt loðsing og loðsflutning frá hvørjum øðrum, fyri at loðsflutningur harvið kann verða lýstur sum eitt hvørt vanligt keyp av tænastum.

Heldur ikki er grundarlag fyri at siga, at lodslógin ikki heimilar kommunun at skipa loðsflutningin við at hava egnan bát, ið verður nýttur í øllum førum til kommunalu loðsingina, ella við at útveita loðsing og loðsflutning til ein privatan/eksternan, sum síðan hevði havt uppgávuna eftir avtalu í samsvar við § 4, stk. 2 í loðslógini.

KE hevur í tí sambandinum svarað FK, at útboð tá bara kann fevna um tað, sum ein agentur ikki hevur markað sær at flyta via avtalu við reidarí, og at ein evt. kommunalur loðsbátur tá bara kann flyta loðsar til skip, har umboðsmaðurin ikki hevur tryggjað sær rættin til flutningin via avtalu við reiðarí.
Heldur ikki hesi útleggingini hjá KE er FK samd í, tí tá gevur tað í fyrra lagi lítla meining at eiga t.d. ein loðsbát, sum ikki kan brúkast til alt virksemið, og tá er tad ikki loðsstøðin, ið fyriskipar loðsflutningin sum part av tí at hava loðsskyldu. Dagsskráin í mun til at flyta hesi kommunalu starvsfólkini til og frá arbeiði vildi tá verði sett av umboðsmonnum fult og heilt, har loðsstøðin má innrætta sína myndugleikauppgávu/veitingarskyldu eftir ymisku aktørunum, sum bjóða seg fram, tí umboðsmenn hava rættin at diktera flutningsháttin.

Øll planlegging av loðsvirkseminum vil tá skula taka støði í, hvørjir umboðsmenn eru til ymisku skipini (teir eru nógvir, sí omanfyri), um umboðsmenn vilja flyta loðs sjálvir ella ikki og harvið verða fleiri aktørar í drift í senn í havnini enn neyðugt.

Slíkum er ikki grundarlag fyri at tulka í kappingarlógina ella loðslógina, og slík skipan vil vera serstakliga óhaldbær fyri kommunalu loðsstøðina sum arbeiðsgevara og tænastuveitara.

Hetta vildi hartil fullkomiliga tikið støðið undan rættinum hjá komununi at skipa loðsvirksemi, herundir við at gjørt avtalu við privat um at útinna uppgávuna fyri kommununa, soleiðis sum lógin heimilar, ella við at boði uppgávuna út, soleiðis sum rúm er fyri, tí sambært KE er tá bara rúm fyri at bjóða tað út, har ongin agentur hevur kannað sær flutningin framíhjá via avtalu við skip.

Í mun til ábyrgd av kommunalu stavsfólkunum er hetta eisini óheppið og ógreitt, tí stundum vilja tey skula fara umborð í bátar, sum arbeiðsgevarin hevur umbiðið og hevur ábyrgdina av, stundum skulu tey umborð á bátar ið onnur privat sambært KE hava rætt at krevja tey umborð á. Eisini av hesi orsøk má serligt grundarlag og heimild vera fyri at gjøgnumtvinga eina skipan sum hana, sum KE mælir til. Slíkt grundarlag er ikki.
KE leggur enn dent á, at reguleringin av gjaldinum fyri loðs og loðsflutning ikki er eins og meðan loðslógin ásetir gjaldið fyri loðsin, so er gjaldið fyri loðsbátin ein spurningur millum seljara og keypara, har atgongd skal vera at tingast um treytir og pris, og har talan er um tvær ymiskar tænastur. Hetta stuðlar KE við at vísa til kunngerðina um gjald.

Hetta er ikki so einfalt, tí einfalda forkláringin uppá ásetingarnar um gjald er, sum tað framgongur av lógarfyrireikingunum og skrivinum frá UVMR, at løgtingið ikki vildi áleggja kommunum at hefta fyri flutning, sum kommunan umbiðir til at flyta loðs á skip. Hetta regulerar á ongan hátt tann partin av loðsveitingini sum nakað serligt ella nakað, sum skal greiðast millum keypara og seljara, eins og var talan um eina verkstaðsvitjan ella keyp av matvørum á einum torgi.

Hartil kemur atlitið til aðrar veitarar, sum KE fullkomiliga setir út av spælinum við at tryggja tí umboðsmanni einkarrrætt til loðsflutning til skip, ið viðkomandi umboðar. Hetta er sum so kommununi lika mikið og má í fyrra lagi vera upp til teir aktørar at taka hond um, men sum skilst hevur KE noktað øðrum veitara at fáa innlit í hetta mál, eins og KE ikki vil viðurkenna aðrar veitarar av loðsbátaflutningi í Fuglafirði at vera partar í hesum máli.

Loksins skal í hesum sambandi verða víst til næstseinasta brotið á s. 2 í svarinum frá UVMR, har ráðið greitt vísir á, at kommunur kunnu lata privat røkja bæði loðsing og loðsflutning, men har UVMR eins greitt vísir á, at talan tá má vera um skipan, sum kommunan/loðsstøðin hevur gjørt og ikki ein privatur. Hetta hevur KE valt ikki at taka við, og KE er eftir okkara fatan júst í holt við at lata privat gera skipanina í mun til flutningin, tí loðsstøðin við tiknu avgerðini fullkomiliga er sett til viks.

Tá KE vendir sær til UVMR er hetta við einum avmarkaðum spurningi um § 2, stk. 4 í kappingarlógini, samstundis sum svarið frá øðrum kommunum verður endurgivið fyri ein part og eftir okkara fatan uttan rættan samanhang. Hetta er tí, at tað sæst ikki, at aðrar kommunur hava valt at lata umboðsmenn flyta loðs, men at hetta er ikki nakað, ið kommunala loðsstøðin metir seg hava skyldu til, men tekur støðu til frá máli til mál.

KE velur harvið aftur bara at taka tað við, sum tænir fatanini hjá KE. Slíkt er ikki røtt fyrisitingarlig atferð.

Tíbetur var UVMR so mikið sakligt og greitt í sini viðgerð og svari, at tey svara KE uppá røttu fatanina av loðsing sum veitingarskyldu, og at hetta fevnir um flutning av loðsinum. Rættast hevði verið, at UVMR fekk spurningar til og svar frá hinum havnunum fyrilagt beinleiðis heldur enn via resumé frá KE, tí einans á henda hátt fæst eitt nøktandi svar frá tí spurda/UVMR.

UVMR leggur her til grund tað, ið KE upplýsir um aðrar havnir, men uttan týðandi viðmerkingarnar frá havnastjórunum um, at havnin metir seg hava fult ræði á hesum viðurskiftunum.

FK vísti í skivi frá 10. oktober 2018 til KE á, at gingið varð út frá, at hesi svar vóru løgd fyri limir í Kappingarráðnum, og ikki bara (lutvíst) endurgivin av KE í sínum tilmæli, men fundurin 11. oktober sannførdi okkum um, at hetta var ikki so.

Sama er í mun til tey skriv, ið FK áður hevur sent KE, tí limir i Kappingarráðnum kundu einfalt ikki svara uppá fyrispurning, um teir bara høvdu fingið resumeið frá KE fyrilagt (sum ikki á nakran hátt var fullfíggjað ella rætt endurgeving í mun til hoyringssvarini frá FK), ella um teir faktiskt høvdu fingið og lisið hoyringsvarini.

Slíkt er ikki álitisvekjandi málsviðgerð. Í sambandi við kæruna verður tí gingið út frá, at Vinnukærunevndin stuðlar seg til upplýsingarnar frá skjølunum, ið eru latin KE, sí eisini viðheftu skjøl heldur enn endurgevingina hjá KE í avgerð ella tilmælum.

Um partar og manglandi hoyring av pørtum

KE metir bara FK og FA verða partar í hesum máli. Fyrisitingarliga eru tey partar, ið hava ein individuellan og týðandi áhuga í einum máli, tvs. her eisini viðvíkjandi rættinum at bjóða seg fram at flyta kommunalar loðsar.

Í hesum máli hevur KE tikið avgerð, sum tryggjar einum ávísum privatum vinnurekandi serrætt til at krevja av kommunalu loðsstøðini at skula brúka sínar bátar. Harvið missa aðrir aktørar uttan víðari møguleikan fyri at bjóða sína tænastu til kommununa, eins og kommunan verður forðað í at skula brúka annan veitara enn FA.

Eitt er, at kommunan ikki er samd í, at hetta er í lagi í mun til loðlóggávuna og rættin hjá loðsstøðini at skipa virksemi í tí sambandinum, men lítil ivi man vera um, at teir aktørar, sum harvið uttan víðari verða avskornir frá at veita tænastur á fjørðinum, undir hesum umstøðum hava ein individuellan og týðandi áhuga í málinum.

Ongi onnur enn FK eru hoyrd í hesum máli, hóast onnur eyðsæð vilja verða rakt av avgerðini. Hetta er ikki rætt havandi § 18, stk. 1 i fyrisitingarlógini í huga.

Vinnukærunevndin eigur tí at ógilda avgerðina ella heimvísa málið longu av hesi orsøk.

Um staðbundna veitaran
Aftur og aftur leggur KE til grund uttan nærri grundgeving, at FK favoriserar lokala veitara Sp/f Pilot. Talan er ikki um at velja veitara, men um ta loysn, sum loðsstøðin metir best hóskandi. Ongastaðni metir KE tó um, hvørjar orsøkir kunnu hava verið til at velja bátin hjá hesum veitaranum heldur enn annan frá tíð til aðra.

Hetta er ikki rætt í mun til málsfyrireiking og grundgeving fyri einari avgerð. Heldur átti KE at mett um, hvørt sakligar orsøkir kunnu vera at velja annan bát enn tann hjá FA frá tíð til aðra.

Í hagtølunum, ið KE leggur til grund, er eingin tilskilan av, hví ávísur bátur t.d. er valdur til uppgávuna v.m. FK metir ikki, at KE bara kann fyrihalda seg til útleggingina hjá FA og síðan hyggja at samlaðu hagtølunum. T.d. hevur FK upplýst, at FA ikki altíð hevur verið tøkt, tá skip, ið FA sigur seg umboða, eru komin inn, og skip kontakta stundum FK beinleiðis, eins og FK ella KE hava ikki neyvt yvirlit yvir, hvørjir bátar ymisku agentar umboða ella ikki. Hartil hevur FK ført fram/víst á, at sakligar orsøkir eru og kunnu vera fyri, hvør bátur verður boðsendur, men hetta viðgerð KE ikki.

Slíkt er ikki nøktandi málsviðgerð í so álvarsligum máli.

Eftir fundin millum Kappingareftirlitið og FK 23. april 2018 bað KE FK um yvirlit yvir m.a. hvussu nógv loðsskyldug skip, ella skip, ið hava biðið um loðs, hava verið á har frá 2014 til apríl 2018.

Tað yvirlitið ella loggurin vísir, at FA í hvussu so er í 2017 og 2018 havt stóran part av flutninginum av loðsi og meira enn árini frammanundan. Sambært havnastjóranum er ymiskt, hvørjir bátar eru tøkir og nær, og t.d. eru bátarnir hjá FA ikki altíð tøkir hóast skip, ið FA umboðar, koma í havn. Eisini er tað ymisk, um FA bjóðar seg fram til loðsflutning, tá skip, ið FA umboðar, koma inn á Fuglafjørð, og FA er sjálvdan ella ongantíð á fjørðinum, tá onnur skip koma inn og skip, ið FA umboðar ikki eru har.

Sambært Fuglafjarðar havn kemur ofta fyri, at skip, ið koma og serliga tá tey skulu avstað, boða frá hálvan til ein tíma áðrenn - hóast tey hava fráboðanarskyldu. Fuglafjarðar havn vil veita eina góða tænastu til skip og tað kann havnin ikki eins væl, um bíðast skal eftur loðsbáti, sum t.d. fyrst skal sigla úr Runavík, ca. 2 tímar at sigla, um fólk annars eru umborð. Aðrar tíðir skulu teir koma úr Havn ella Klaksvík so har gongur ein tími afturat. Úr Klaksvik skulu teir hava 1,5 tíma freist.

Nevndu viðurskifti ávirka val av báti frá tíð til aðra, men onki av hesum tekur KE atlit til.

Vanlig krøv til sakliga viðgerð og grundgeving ikki hildin
KE hevur í avgerðini generelt eina røð av niðurstøðum/staðfestingum, ið flest allar eru gjørdar, uttan at meta fyri og ímóti, og uttan at heild er í, men ofta bara reinar staðfestingar. Sjónarmiðini hjá kommununi eru at kalla konsekvent als ikki viðgjørd.

Hetta er ikki viðgerð sum er sannførandi, tá so álvarsligar skuldsetingnar verða settar fram og niðurstøður gjørdar, og hetta lýkur heldur ikki krøvini í fyrisitingarlógini til grundgevingar.
Slíkur háttur at gera sær niðurstøður ella at nýta fakta í málinum er ikki í samsvari við § 23, stk. 1, í fyrisitingarlógini, har ásett er, at er avgerðin (sum her) grundað á eini fyrisitingarligari meting,

so skal grundgevingin eisini tilskila tey høvuðsfyrilit, ið hava verið avgerandi fyri útinningina av metingini. Tvs. at sjónarmið mugu vigast, ið tala fyri og ímóti, og myndugleikin má síðan vísa, hvat myndugleikin leggur dent á, tá konkluderað verður. Slík viðgerð er generelt ikki av ymisku tættunum í hesum máli.

Bara fyri at nevna dømi, so er longu í innleiðingini, pkt. 14 í avgerðini upplýsingarnar, sum bara stava frá frásøgn hjá FA, ið KE uttan víðari leggur til grund og dent á. Her er viðkomandi at viðmerkja, at FK ongantíð hevur fingið fráboðan um, at trygdin ikki var í lagi ella at valdu loðsbátarnir ikki egnaðir. Hartil má hetta metast hanga saman við, at KE frá byrjan hevur valt at meta ella leggja til grund, at báturin MS Pilot er minni væl egnaður til uppgávuna at føra loðs enn bátarnir hjá FA (sæst í undanfarnu tilmælunum frá KE til Kappingaráðið), eisini hóast Pilot er uppdateraður síðan, hevur fingið nýggja brúgv, størri motor, bógskrúvur, siglir skjótari enn teir hjá FA v.m.

Í pkt. 16 refererar KE samtyktina frá Vinnunevndini 14. apríl 2014 soleiðis at ávís vinnufyritøka í Fuglafirði skuldi verða fyrsta val til loðsflutning. Hetta er ikki rætt og hevur einki við eina ávísa vinnufyritøku at gera. Vinnunevndin legði dent á tænastuna, ið var á fjørðinum, og metti tí, at báturin, sum altíð var staðsettur har, "Pilot", var besta loysnin/skuldi vera fyrsta val.

Í pkt. 21 sigur KE, at kommunan boðar frá, at vinnunevndin ikki hevði heimild at taka avgerð. Heldur ikki hetta er rætt endurgivið. Metingin var, at ivasamt var, um hetta var vinnunevndarmál ella býráðsmál (eisini tí, at avgerðin hjá vinnunevndini frá 14. april 2014 snúi seg boð til havnameistaran, hóast starvsfólkaviðurskifti hoyra fíggjarnevnd og byráði til. Tí bleiv málið viðgjørt í byráðnum.

Býráðið tók tá undir við tilmælinum hjá Vinnunevndini um, at skilabest er, at loðsflutningsbáturin hevur støð har loðsstøðin er staðsett, at kommunan tekur fulla ábyrgd av loðsstøðini við nøktandi tali av loðsum, og at loðsflutningurin ikki verður latin yvir til ein ella fleiri skipsmeklarar, sí skrivið frá FK til FA frá 1. desember 2014.

Harvið snúi avgerðin seg um keyp av loðsflutningi hjá kommunalu loðsstødini og bara tað (ikki oljusperrur ella sleip ella annað).

Í pkt. 32 og 34 sæst ikki rætti samanhangurin, nevniliga at samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá meirilutanum í Vinnunevndini, og eftir hesum "skuldi tað verða upp til havnameistaran/Fuglafjarðar Havn at umbiðja tær veitingar í mun til loðsvirksemi, sum neyðugar eru. Kommunan eigur at umhugsa at bjóða út loðsbátatænastuna."

Hetta hevur onki við tað at gera, at kommunan harvið tók undir við, at t.d. FA frítt kundi diktera kommunalu loðsstøðini, nær FA skuldi føra kommunalan loðs ella ikki. Tað er nakað, ið KE kom við seinni tann 31. mai 2017, eftir at kommunala viðgerðin var endað 10. mai 2017, sí pkt. 33, men sum FK ongantíð hevur tikið undir við og ikki er samd í. Teldupostur umrøddur í pkt. 34 er ein teldupostur til havnameistaran við avriti av býráðsavgerðini frá 10. mai 2017 - onki annað.

Útleggingin í pkt. 36 er gjørd av KE. Hesum er og hevur kommunan ikki verið samd við KE í, og hetta liggur ikki í avgerðini frá 10. mai 2017. Talan er sum tíðarlinjan vísir, um eftirfylgjandi fatan ella útlegging hjá KE.

Ætlanarskrivið um avgerð frá KE frá 19. apríl 2017 snúi seg um, at FK skuldi skipa fyri, at veitarar av loðsflutningi sluppu at kappast á fjørðinum á jøvnum føti, og ikki at ein veitari átti sjálvsagdan rætt til ávísan flutning, sum KE seinni hevur argumenterað fyri, sí tilmælið til Kappingarráðið frá 19. juni 2018, pkt. 147.

Í pkt. 38, 39 og 41 eru fleiri dømi um einsíðuga útlegging av málinum, uttan at samanhalda fakta frá báðum síðum. Um KE við hesum sipar til, at FA ikki hevur flutt allar loðsar til tey skip, ið FA er agentur hjá, so er hetta skilligt. Aðramátar er ilt at skilja, hvat sipað verður til, tí FA hevur flutt loðs sera ofta í tíðarskeiðinum, men kann ikki eiga rætt til ávíst túratal framum onnur ella tí FK hevur ávís ynski um aðra loysn frá máli til mál enn bara at brúka FA. Hartil er FK ósamd við KE í, at FK er lopin frá nøkrum lyfti. Øll hava kunnað kappast á fjørðinum, men FK hevur frá tíð til aðra valt millum ymisku veitararnar, tá FK hevur havt brúk fyri at flyta sínar kommunalt settu loðsar.
Málið snýr seg tí ikki um, at FK sum loðsstøð vil forða FA í at veita loðsflutning og sleipitænastu til fyrimuns fyri lokala fyritøku. Hetta er útleggingin hjá KE av støðuni. Rættara útleggingin málinum er heldur, at KE sær tað sum eina forðing, um FA ikki hevur sjálvsagdan framíhjárætt at flyta allar loðsar til tey skip, har FA er agentur, og bara tí at FA er agentur. Harvið skulu onnur avskerðast at kunna kappast um veitingina, og harvið skal FK forðast í at hava ávirkan á, hvør flytir kommunal sett starvsfólk til og frá skipum ella millum skip á fjørðinum. Tað metir FK hvørki vera rætt ella heimilað.
Í pkt. 72 er ein beinleiðis misvísandi útlegging av tulkingini hjá UVMR, tí talan er um tulkingina hjá KE í 2. broti í pkt. 72. Sama er í pkt. 74, tí UVMR svarar sum tað er spurt av KE og UVMR veit einki annað um støðuna í Fuglafirði enn tað, sum KE hevur upplýst um sonevndar forðingar, ið verða settar FA.

Í pkt. 78, 79, 80 og 81 er ein røð av skeivum útleggingum av loðslógini - allar uttan nærri grundgeving, meting ella annað, men har lesarin fær fatan av, at hetta er metingin hjá UVMR.

Í pkt. 82 kann man illa annað enn øtast av útleggingini hjá KE av praksis. Her má kærumyndugleikin tí samanhalda spurningar og svar til kommunurnar og síðan samanhalda við svarið frá UVMR; tí hetta er einfalt ikki rætt hjá KE.

Ikki sæst í málinum, hvørjar avtalurnar eru, sum dentur verður lagdur á í pkt. 103, hvønn prís talan er um ella annað. Heldur ikki sæst hvat KE leggur dent á, tá konkluderað verður í pkt. 105 og 106, at FA verður álagt óneyðugan meirkostnað (her mugu vit minnast til, at reiðaríðini hefta sambært loðslógini í seinna enda).

Sama er í pkt. 2.5.2. um sonevnda kravið um váttan, har KE ikki tekur atlit til, at FK fleiri ferðir hevur upplýst rætta samanhangin, at talan var um serstakt føri og at hetta bara kom fyri 3 ferðir.

Í pkt. 176 verður ein fráboðan frá FA umrødd (j.nr. 18/00246-37). Hesa er FK ikki hoyrd um og kennir ikki innihaldið. Kortini leggur KE dent á hesa. FK hevur biðið um fullfíggjað innlit í alt málið og FK hevur tann 6. juli 2018 fingið innlit í skjølini fram til skjal 30 + samskiftið við loðsstøðirnar og UVMR, sum KE hevur sett fyrispuringar til. Kortini visir hetta, at annað og meira samskifti, skjøl og upplýsingar eru í málinum (skrivið frá FA er sambært avgerðini dagfest dagin undan at innlit er givið, nevniliga 5. juli 2018), sum KE leggur dent á, men uttan at hetta er lagt fyri FK. Á s. 8, fótnotu 7 í avgerðini, sæst, at í hvussu so er 45 skjøl eru í málinum. Skjal 37 metir FK seg ikki hava fingið, sí omanfyri, og alt bendir á, at fleiri onnur skjøl eru, ið FK ikki er hoyrd um.
Slíkt er samanumtikið avgjørt ikki í lagi.

Onnur dømi eru um manglar og skeivleikar í avgerðini, sum verða ávíst í yvirlitinum, skjal 14.

Endi
Samanumtikið er FK ikki samd í, at FK misnýtir nakra ráðandi støðu. FK er — eins og UVMR — av teirri greiðu fatan, at loðsflutningur er ein integreraður partur av teirri veitingarskyldu, sum FK

hevur sambært loðslógini, og tí kann ein privatur ikki hava framíhjárætt til at standa fyri flutningi av kommunalum starvsfólkum til skip, ið viðkomandi umboðar.

Tá eru vit uttanfyri tær støður, sum § 11 í kappingarlógini er ætlað at regulera.

Aðramáta tekur KE fullkomiliga støði undan tí rætti, ið kommunur hava at skipa ta veiting, ið tær hava skyldu til eftir loðslógini, herundir at útvega sær egnan bát og/ella at lata uppgávuna fult og heilt (bæði sjálvan loðsin og flutningin) til privat eftir avtalu, ella at bjóða veitingina út, soleiðis sum loðslógin eisini heimilar.

Samanumtikið skal tí verða viðmerkt, at heldur enn á sera ivasomum grundarlagi at leggja Fuglafjarðar kommunu undir lógarbrot, tá loðsflutningur verður fyriskipaður frá høvi til høvi, og at geva kommununi boð um at lata størsta partin av flutninginum av kommunalum loðsum til navns nevndan veitara framihjá, so verður mælt Vinnukærunevndini til at ógilda avgerðina.
Um Vinnukærunevndin ikki er samt í hesum, verður mælt til antin at heimvísa málið til nýggja viðgerð vegna málsviðgerðarfeilir, ella at heimvísa við boðum um at nýta ta mannagongd, sum er í kappingarlógini til at greiða ivamál ella óhepnar støður, sí § 2, stk. 5.

Sambært nevndu grein í kappingarlógini er har ein einfaldur háttur at fáa greidleika ella finna sær greidleika. Har er ásett, at um Kappingarráðið metir, at ein almenn regulering (loðslógin, sum UMVR eisini vísir á, ikki er heilt greið hesum viðvíkjandi) ella stuðulsskipan kann hava skaðilig árin á kappingina ella á annan hátt forðar eini fulldyggari samfelagsligari tilfeingisnýtslu, kann Kappingarráðið lata avvarðandi landsstýrismanni og landsstýrismanninum í kappingarmálum eina frágreiðing, ið vísir á møgulig skaðilig árin á kappingina, og koma við uppskoti um, hvussu kappingin kann fremjast.

Hetta vil vera einasta rætta alternativið til eina ógildan, tí loðslógin og veitingarskyldan har er eyðsæð ikki ætlað at vera fevnd av vanligu kappingarreglunum í mun til loðsflutning, sum var talan um bomm- ella teldukeyp.

Á henda hátt kundi skipanin við kommunalum loðsum og flutningi av loðsum verði greiðari skipað, herundir í mun til kappingina, neyðugar kanningar verið gjørdar ella neyðug lógaruppskot um broyting í rættarstøðuni (sí t.d. kommenteraðu donsku kappingarlágina, 4. útgávu, s. 107f) heldur enn at gjøgnumtvinga eina sera ivasama mannagongd, einans til fyrimuns fyri umboðsmannin, sum hevur kært. Tá fekst ein skynsom heildarloysn, har eisini kommunur og aðrir viðkomandi partar eru við í tilgongdini.

Hetta var støðan í Danmark, tá kappingareftirlitið har í 2002 kannaði loðsøkið og Kappingarráðið har síðan í 2003 kontaktaði stjórnina við viðmæli um lógarbroytingar. Hetta elvdi til broyting i donsku loðslógini í 2006 (lógaruppskotið hesum viðvíkjandi var: 2005/1 LSF 210, sum varð samtykt í juni 2006, og lógin kom síðan í gildi 1. desember 2006.

Alt talar tí fyri at nýta henda framferðarhátt í hesum máli, heldur enn at staðfesta og harvið gjøgnumtvinga eina serliga mannagongd við serrættindum til umboðsmenn at flyta loðs á serstakliga ivasomum grundarlagi.

At tann parturin av veitingarskylduni, sum er loðsflutningur, ikki er staðiliga reguleraður í loðslógini kann ikki merkja, at loðsstøðin skal verða prísgivin og uttan ávirkan á, hvussu kommunalu starvsfólkini verða flutt til og frá. Skuldi tað verið støðan, má heimild finnast fyri slíkari niðurstøðu, men slík heimild er ikki ávíst hvørki í loðslógini, kappingarlógini ella aðrari lóg, og enn minni via avtalur millum FA og okkurt reiðarí.

Samanumtikið verður gjørt galdandi, at avgerðin eigur at verða ógildað grundað á omanfyri nevndu viðurskifti um manglandi hoyring, manglandi faktiskum grundarlagi fyri teim niðurstøðum, ið KE ger, ógrundaðari útlegging av loðslógini í royndini at skilja loðsflutning frá restini av loðstænastuni undir veitingarskylduni, manglandi meting av týðandi faktiskum viðurskiftum og manglandi meting av grundleggjandi sjónarmiðum og atlitum frá FK.

Ummælið

1. Generellar viðmerkingar

Tann 9. desember 2016 fekk Kappingareftirlitið kunning um viðurskiftini í Fuglafirði, sum møguliga vóru í stríð við kappingarlógina. Kappingareftirlitið tók málið upp til viðgerðar tann 10. mars 2017. Tann 12. juni 2017 valdi Kappingarráðið at niðurleggja málið eftir at Fuglafjarðar kommuna gekk teimum ivamálum sum vóru á møti.

Sambært § 20 í kappingarlógini kann Kappingarráðið taka avgerð um at niðurleggja mál bæði fyribils og endaliga. Talan er tá ikki um eina fyrisitingarliga avgerð. Í niðurlagda málinum (17/00071) varð ongin avgerð tikin á rættarstigi 1, sum er Kappingarráðið. Sambært § 27, stk. 1 í kappingarlógini kunnu mál, sum eru niðurløgd, ikki kærast.

Tann 26. februar 2018 fekk Kappingareftirlitið boð um at forðingar vóru framvegis lagdar fyri virkseminum hjá P/F Faroe Agency í Fuglafirði. Tann 4. juni 2018 sendi Kappingareftirlitið boð til Fuglafjarðar kommunu um, at málið varð uppafturtikið, men nú sum møguligt brot á § 11 í kappingarlógini. Hetta mál (18/00246) er kært til Vinnukærunevndina tann 19. november 2018.

Kærari vísur til tilfar og viðurskifti í niðurlagda málinum. Velur Vinnukærunevndin at taka atlit til henda part av kæruni, so er ein vandi fyri at niðurlagda málið, har ongin fyrisitingarlig avgerð bleiv tikin, í veruleikanum verður roynt av Vinnukærunevndini. Kappingareftirlitið fer tí at heita á Vinnukærunevndina at síggja burtur frá hesum í kæruni, havandi í huga at niðurløgd mál ikki kunnu kærast til Vinnukærunevndina.

At enda skal viðmerkjast, at kæran frá Fuglafjarðar kommunu ikki snýr seg um tað, sum má sigast at ver bulurin í einum máli um misnýtslu av ráðandi støðu, nevniliga, at staðfestingin av, at Fuglafjarðar kommuna hevur eina ráðandi støðu, og at framferðin hjá Fuglafjarðar kommunu er ein misnýtsla av ráðandi støðu, sbrt. § 11 í kappingarlógini. Somuleiðis hevur Fuglafjarðar kommuna ikki víst á objektiv viðurskifti sum grund fyri framdu kappingaravmarking.

§ 2 í kappingarlógini

Í kæruni verður gjørt nógv burturúr tí fyrispurningi, sum Kappingareftirlitið sendi til Uttanríkis- og Vinnumálaráðið tann 30. august 2018, og svarinum, sum kom 30. september 2018. Alt, sum verður ført fram, er ikki rætt, og tí verður greitt nærri frá § 2 í kappingarlógini.

Meginreglan viðvíkjandi lógdømi í kappingarlógini er § 2, stk. 1, ið sigur, at kappingarlógin fevnir um øll sløg av vinnuvirksemi og almennum stuðli til vinnuvirksemi. Undantak til hesa reglu er í § 2, stk. 2, ið sigur, at kapittul 2 og 3 eru ikki galdandi, um ein kappingaravmakring er ein beinleiðis ella neyðug fylgja av eini almennari regulering. Kapittul 2 snýr seg um kappingaravlagandi avtalur v.m., meðan kapittul 3 snýr seg um misnýtslu av marknaðarráðandi støðu.

Sambært § 2, stk. 4 í kappingarlógini er tað landssýrismaðurin ið varðar av viðkomandi regluverki, ið ger av, hvørt ein kappingaravmarking er ein beinleiðis ella neyðug fylgja av eini almennari regulering, og bert ein dómstólur kann taka støðu til um svarið frá landsstýrismanninum er rætt.

Í kæruni verður nógv gjørt burturúr, hvussu fyrispurningurin frá Kappingareftirlitinum varð orðaður. Fuglafjarðar kommuna vildi hava Kappingareftirlitið at spyrja Uttanríkis- og Vinnumálaráðið um tað var so, at loðsflutningur onki hevði við loðsing at gera sambært loðslógini. Hartil er at siga, at § 2, stk. 4 greitt ásetur hvat spyrjast skal um og hvat landsstýrismaðurin hevur skyldu at svara uppá. Spurningurin sum Fuglafjarðar kommuna vildi hava svar uppá liggur uttanfyri heimildina í § 2, stk. 4 í kappingarlógini. Uttanríkis- og Vinnumálaráðið hevur bert skyldu til at svara uppá um ein kappingaravmarking er ein beinleiðis ella neyðug fylgja av almennari regulering.

Endamálið við fyrispurninginum var at fáa staðfest, hvørt ein kappingaravmakring er fevnd av § 2, stk. 1 ella § 2, stk. 2 í kappingarlógini. Er ein kappingaravmarking fevnd av § 2, stk. 1 í kappingarlógini, hevur Kappingarráðið atgongd til at brúka kapittul 2 og 3 í kappingarlógini. Um kappingaravmarkingin hinvegin er av § 2, stk. 2 í kappingarlógini, er Kappingarráðið avskorið frá at brúka kapittul 2 og 3.

Alt annað kjak um hvat loðslógin annars sigur er óviðkomandi, tí Uttanríkis- og Vinnumálaráðið hevur staðfest, at kappingaravmarkingin, sum Fuglafjarðar kommuna fremur, ikki er fevnd av undantakinum i § 2, stk. 2 í kappingarlógini. Fuglafjarðar kommuna hevur ikki afturvíst hesum í kæruni.

Í kæruni verður funnist at Kappingareftirlitinum fyri at hava kunna Uttanríkis- og Vinnumálaráðið um hvussu loðsskyldan varð útint til dagligt í teimum størru havnunum í Føroyum. Uttanríkis- og Vinnumálaráðið varð kunnað um, at loðsskyldan í hesum havnum verður útint uttan ta kappingaravmarking, sum Fuglafjarðar kommuna framur. Talan er um upplýsingar sum eru viðkomandi í sambandi við viðgerð av einum fyrispurningi eftir § 2, stk. 4 í kappingarlógini, serliga við atliti til um talan er um eina neyðuga fylgju. Í sambandi við fyrispurningar eftir § 2, stk. 4 verður mælt til at vísa at aðrir og/ella minni kappingaravlagandi háttir kunnu nýtast.

At enda skal viðmerkjast, at Kappingarráðið kann ikki nýta mannagongdina í § 2, stk. 5 í kappingarlógini, tá ið Uttanríkis- og Vinnumálaráðið hevur svarað, at kappingaravmarkingin ikki er ein beinleiðis ella neyðug fylgja av eini almennari regulering. Samstundis er sama kappingaravmarking ikki staðfest í øðrum havnum í Føroyum. Tvørturímóti, so verður loðsskyldan umsitin heilt øðrvísi í Tórshavn, Klaksvík og Runavík. Tí er heldur ongin tørvur at vísa á.

§ 11, stk. 1 í kappingarlógini
Í kæruni verður sagt, at prógvbyrðan er ikki lyft í hesum máli.

Ein kappingarmyndugleiki hevur í sambandi við eitt mál eftir § 11 í kappingarlógini lyft prógvbyrðuna, um prógv er fyri, at fyritøkan hevur eina ráðandi støðu og at henda støðan er misnýtt.

Í parti 3.1.1 í avgerðini hjá Kappingarráðnum eru staðfestir tríggir viðkomandi vørumarknaðir. Marknaðurin fyri atløgupláss, marknaðurin fyri loðsflutning og marknaðurin fyri sleipitænastur. Somuleiðis er staðfest, at landafrøðiligi marknaðurin í øllum trimum førum er Fuglafjørður, sí 3.1.2. í avgerðini.

Í kæruni er ikki sett spurnartekin við part 3.1.1 í avgerðini.

Í parti 3.2.1 í avgerðini verður staðfest at Fuglafjarðar havn situr á 100% av viðkomandi marknaði fyri atløgupláss, meðan ongin hevur eina marknaðarráðandi støðu á marknaðinum fyri loðsflutning og á marknaðinum fyri sleipitænastur.

Í kæruni er ikki sett spurnartekin við part 3.2.1 í avgerðini.

Í parti 3.2.2 í avgerðini verður sagt, at tann ráðandi støða sum Fuglafjarðar kommuna hevur á marknaðinum fyri atløgupláss hevur verið brúkt til at sýta P/F Faroe Agency at veita tænastur á ávikavist marknaðinum fyri loðsflutning og marknaðinum fyri sleipivirksemi.

Í kæruni er ikki sett spurnartekin við part 3.2.2 í avgerðini.

Kappingarráðið hevur sostatt lyft prógvbyrðuna fyri, at Fuglafjarðar kommuna hevur eina ráðandi støðu, og hevur framt brot á § 11 í kapingarlógini.

Í tílíkum førum kann hin ráðandi verja seg við objektivum grundgevingum. Talan kann vera um at eitt brot er objektivt neyðugt, at hin ráðandi verjir sínar handilsáhugamál, tá hesi verða hótt, ella at broti hevur við sær effektivitetsfyrimunir.

Meðan prógvbyrðan fyri at ein ráðandi støða er misnýtt liggur hjá Kappingarráðnum, so liggur prógvbyrðan fyri teimum objektivu grundgevingunum hjá tí ráðandi. Hesum viðvíkjandi er at siga, at Fuglafjarðar kommuna als ikki hevur lyft sína prógvbyrðu.

Í kæruni verður sagt, at tað kunnu vera subjektiv viðurskifti hjá tí ráðandi, sum sakliga kunnu grunda eina ávísa atferð, uttan at talan er um misnýtslu.

Í fyrsta lagi so er misnýtsla av ráðandi støðu eitt objektivt hugtak, har brotið er framt uttan mun til um brotið er framt ótilvitað ella tilvitað. Hinvegin innganga subjektivu viðurskiftini í sambandi við ásetan av eini møguligari bót, har tílík viðurskifti hava eina linnandi ella skerpandi ávirkan. Tann ráðandi hevur eina serliga skyldu til at ansa eftir at viðkomandi ikki misnýtir sína ráðandi støðu. Í øðrum lagi framgongur ongastaðni í kappingarrættinum, at subjektiv viðurskifti hjá tí ráðandi kunnu rættvísgera eitt brot.

Hartil verður sagt í kæruni, at Kappingarráðið í síni avgerð ikki hevur megnað at prógva, at Fuglafjarðar kommuna hevði ætlan um at ávirka kappingina við síni atferð. Her skal enn einaferð vísast á, at misnýtsla av ráðandi støðu er eitt objektivt hugtak. Ein ætlan um at fremja eina avgerð er ikki neyðug, men er nakað, sum myndugleikin kann brúka til at stuðla undir at misnýtsla er farin fram. Tá hetta er sagt skal vísast á, at málið byrjar við eini samtykt í vinnunevndini í Fuglafjarðar býráð, har semja var um at staðbundin fyritøka skuldi verða fyrsta val til loðsflutning.

Eisini verður víst á, at tað kunnu vera objektiv viðurskifti, ið kunnu grunda valið av báti, men at Kappingareftirlitið skal hava nokta at taka atlit til hesi viðurskifti. Til hetta er at siga, at hóast talan er um eina prógvbyrðu, sum Fuglafjarðar kommuna eigur at lyfta, so hevur Kappingareftirlitið veruliga roynt at fáa staðfest hvørji viðurskifti kommunan vísir á.

Tann 31. juli 2018 sendi Kappingareftirlitið teldupost til Eyðbjørn Larsen, adv. vísandi til teirra hoyringssvar frá 15. juli 2018. Har var beinleiðis spurt um hvat meint var við, tá sagt varð, at loðsstøðin hevði sakligar orsøkir til at velja ávísa fyritøku. Í svarinum tann 17. august 2018 er ongin grundgeving annað enn, at víst verður til eitt skriv frá 30. apríl 2018. Talan er um skriv, sum varð sent Kappingareftirlitinum í sambandi við mál nr. 17/00071, har Kappingareftirlitið hótti við vikuligari sekt.

Havandi í huga, at tað er Fuglafjarðar kommuna, sum hevur hesa prógvbyrðu, so má sigast, at kommunan hevur ikki lyft prógvbyrðuna. Tað kann ikki verða nøktandi, at kommunan vísir til eitt skriv, hvørs innihald er um nakað heilt annað og tí krevur at myndugleikin skal tulka seg til eitt svar.

Kappingareftirlitið vil í hesum sambandi gera galdandi at pliktin at lýsa málið ikki kann fevna um, at seta saman eina verju fyri Fuglafjarðar kommunu soleiðis, at hon kann lyfta sína prógvbyrðu í hesum sambandi. Hóast hetta hevur Kappingareftirlitið roynt at mett um hvat kommunan meinar við í sambandi við støði í hoyringssvarinum frá 15. juli 2018. Notatið sum var gjørt í sambandi við viðgerðina varð sent til Fuglafjarðar kommunu í sambandi við at tilmælið frá Kappingareftirlitinum var sent aftur í hoyring tann 15. august 2018. Fuglafjarðar kommuna er ongantíð komið við viðmerkingum til notatið.

Samanumtikið kann tí sigast um § 11 spurningin, at í avgerðini hjá Kappingarráðnum er prógvbyrðan fyri at ein misnýtsla av ráðandi støðu er farin fram lyft, við tað at Kappingarráðið hevur staðfest eina ráðandi støðu og at henda ráðandi støða er vorðin misnýtt.

Fuglafjarðar kommuna er ikki komin við nøkrum uppáhaldi um at hesin partur av avgerðini er skeivur.

Somuleiðis hevur Fuglafjarðar kommuna als ikki lyft prógvbyrðuna fyri at framferðin hjá kommununi kann verjast við objektivum grundgevingum.

Fyrisitingarligir spurningar og aðrir snøklar

Málið sum nú er kært til Vinnukærunevndina hevur verið til hoyringar hjá Fuglafjarðar kommunu tríggjar ferðir. Fyrstu ferð var tann 19. juni 2018, aðru ferð var tann 15. august 2018 og triðju ferð tann 2. oktober 2018. Í sambandi við fyrstu hoyringina fekk Fuglafjarðar kommuna innlit í øll skjøl í málinum. Í sambandi við næstu hoyringina varð viðlagt eitt yvirlit, sum innihelt viðmerkingar frá Kappingareftirlitinum til hoyringssvarið frá fyrstu hoyringini. Sostatt er tað ikki rætt, tá Fuglafjarðar kommuna sigur, at Kappingareftirlitið ikki hevur tikið støðu til tey viðurskifti, sum kommunan vísur á. Í sambandi við seinastu hoyringina varð fyrispurningurin, sum Kappingareftirlitið hevði sent til Uttanríkis- og Vinnumálaráðið og svari frá teimum viðlagt.

Fuglafjarðar kommuna hevur harumframt í sambandi við tveir teir seinastu kappingarráðsfundirnar fingið loyvi at hava eitt stutt munnligt innlegg frá ráðnum. Á tí seinasta fundinum valdi formaðurin í Kappingarráðnum ítøkiliga at spyrja Eyðbjørn Larsen, adv., um hann kundi vísa á nøkur ítøkilig viðurskifti, sum kundu verða orsøk til framferðina hjá Fuglafjarðar kommunu. Sum viðlagda avrit av fundinum vísur, so var svarið aftur óítøkiligt.

Í kæruni verður rørt framundir, at Kappingarráðið ikki hevur fingið innlit í skjøl, sum Eyðsbjørn Larsen, adv. hevur sent vegna kommununa. Hetta er ein grov ákæra, sum Kappingareftirlitið kann avvísa beinanvegin.

Øll hoyringssvar frá Eyðbjørn Larsen, adv. umframt viðmerkingarnar frá Kappingareftirlitinum vórðu send til limirnir í Kappingarráðnum áðrenn fundirnar, og vórðu løgd fram á fundunum. Øll skjøl í málinum vórðu eisini atkomulig hjá limunum til hvønn fund í Kappingarráðnum.

Kappingarráðið hevur regluligar fundur og fundarskipanin fyri ráðið ásetur, at ráðið umframt at taka avgerðir í málum eisini skal hava kunning frá leiðsluni í Kappingareftirlitinum um dagligu umsitingina. Hetta merkir m.a. at ráðið skal hava kunning um innkomin mál, hvat arbeitt verður við og møguligar avgerðir, sum eftirlitið hevur tikið vegna ráðið. Henda mannagongd merkir, at Kappingarráðið altíð er væl inni í teimum málum, sum Kappingareftirlitið arbeiðir við.
Kærarin vísir á, at skjal 18/00246-37 ikki var útflýggja í sambandi við at innlit var latið í øll skjøl í málinum tann 6. juli 2018, hóast at áðurnevnda skjal er frá 5. juli 2018. Orsøkin til hetta er, at Kappingareftirlitið hevði tikið avgerð í juni mánað 2018 um at nú máttu vit steðga við at taka ímóti og viðgera fleiri fráboðanir frá P/F Faroe Agency og heldur brúka orku uppá tað sum longu vóru inni. Men málið dró út og í august mána varð byrjað at skráseta fráboðanir aftur. Tað er í hesum

sambandi, at telduposturin varð skrásettur. Telduposturin hevur ongan týdning fyri avgerðina. Innihaldið í hesum telduposti er bara at Fuglagfjarðar kommuna framvegis ikki vil geva teimum atgongd. Annars verður víst til viðlagda yvirlit yvir skjøl í málinum.

Í kæruni verður funnist at, at ávís fyritøka ikki er hoyrd. Her til er at siga, at umrødda fyritøkan hevur biðið um innlit tann 21. august 2018 og tann 2. september 2018 varð innlit noktað. Avgerðin varð kærd til Uttanríkis- og Vinnumálaráðið tann 4. september 2018. Uttanríkis- og Vinnumálaráðið staðfesti avgerðina hjá Kappingareftirlitinum tann 10. september 2018.

Kappingareftirlitið heitir tí á Vinnukærunevndina um at síggja burtur frá uppáhaldinum hjá kærara um at allir partar í málinum eru hoyrdir, tí rætta kæruvald í málum um innlit í kappingarmál, longur hevur gjørt niðurstøðu hesum viðvíkjandi.

Viðmerkingar frá Kæruumboðnum
Í skrivi frá 10. desember 2018 hevur Eyðbjørn Larsen, adv. gjørt viðmerkingar til ummælið frá Kappingareftirlitinum. Kæruumboðið sigur soleiðis:

"Fyrst er at siga, at ummælisskrivið er frá KE heldur enn frá Kappingarráðnum (KR). Hóast KE er skrivstova hjá KR og vegna Kappingarráðið hevur dagligu umsitingina av lógini, so er talan um aðrar persónar enn tey 5, sum manna KR sambært § 20, stk. 3 í kappingarlógini. Her er tí talan um, at skrivstova heldur enn myndugleikin ummælir, og onki sæst um, hvørt KR hevur heimilað KE at ummæla og útleggja fatanina hjá KR, upplýsingargrundaðlagið frá KE til KR v.m.

KE er tilmælandi organið undir KE og tí er trupult at fyrihalda seg til tað, sum KE skrivar vegna KE, uttan at KR sæst hava verið involverað aftur síðan fundin har 11. oktober 2018. Avleiðingin kann tí valla vera onnur, enn at Vinnukærunevndin antin vendir sær beinleiðis til kærda myndugleikan um at viðgera málið/kæruna og síðan svara, ella at sæð verður burtur frá viðmerkingunum frá KE.

Annars er at viðmerkja viðvíkjandi formellu betraktningunum hjá KE um, hvat mál er til viðgerar, so er tað ein sannroynd, at KE hevur lagt dent á áleið sama faktum, síðan KE tók málið upp. Um hetta so var í einum máli frá 2017, ið bleiv niðurlagt, ella málinum nú, har kært er, og har KE gjørdi 3 tilmælir, sum fleiri ferðir eru tillagað fyrisitingarliga/juridiskt so hvørt, fyri at passa til útleggingina hjá KE av serliga loðslógini, so er enn talan um somu faktisku viðurskifti, sum tilmælið til KR er grundað á, og sum KR, tí má metast hava tikið støði í, so ella so.

Tí er ikki talan um, at FK vísir til tilfar og viðurskifti, sum ikki eru viðkomandi fyri hetta mál. So langt gevur tað tí heldur ikki meining nú at skilja málini at eftirfylgjandi í KE/KR. FK kærir tó sjálvandi ikki avgerðina frá 12. juni. 2017 um at niðurleggja málið í KE. Um tað hinvegin eru viðurskifti, sum KR/KE ikki longur leggja dent á, so má KE/KR fyri greidleika skuld gjarna vísa á hesi, soleiðis at Fk kann meta, hvørt hetta gevur orsøk til viðmerking.

KE sigur aftur og aftur, at Fuglafjarðar kommuna ikki hevur víst á, hvørji viðurskifti hava grundað val av loðsbátið og hví Faroe Agency (FA) ikki altíð er valt, tá FA er umboð.

FK hevur í skrivinum frá 30. apríl 2018 og á fundinum í KR 22. august og 11. oktober greitt frá hesum. At KE ikki góðtekur grundgevingarnar og at KR ikki fyriheldur seg til grundgevingarnar er ilt hjá FK at gera nakað við.

Fyri at endurtaka, so er sambært havnastjóranum ymiskt, hvørjir bátar eru tøkir og nær. T.d. eru bátarnir hjá FA ikki altíð tøkir hóast skip, ið FA umboðar, koma í havn. Eisini er tað ymisk, um FA bjóðar seg fram til loðsflutning, tá skip, ið FA umboðar, koma inn á Fuglafjørð, og FA er

sjálvdan ella ongantíð á fjørðinum, tá onnur skip koma inn og skip, ið FA umboðar ikki eru har. Longu av teirri orsøk kann FA ikki altíð veljast. Hetta er KE vitandi um, men hetta hevur ikki elvt KE til viðmerking ella broytta fatan.

Sambært Fuglafjarðar havn kemur hartil ofta fyri, at skip, ið koma og serliga, tá tey skulu avstað, boða frá hálvan til ein tíma áðrenn – hóast tey hava fráboðanarskyldu. Fuglafjarðar havn vil veita eina góða tænastu og tað kann havnin ikki eins væl, um tað altíð skal bíðast eftir báti hjá FA, sum t.d. fyrst skal sigla úr Runavík (ca. 2 tímar at sigla, um fólk annars eru umborð). Aðrar tíðir skulu teir koma úr Havn ella Klaksvík, so har gongur ein tími afturat. Úr Klaksvík skulu teir hava 1,5 tíma freist. Hetta kann tí ávirka val av báti frá tíð til aðra.

Sambært KE snýr kæran seg ikki um bulin í einum máli um misnýtslu av ráðandi støðu (staðfestingina av ráðandi støðu og eini framferð, sum er misnýtsla av ráðandi støðu).

Sjálvsagt eru hesi viðurskifti týðandi partur av kæruni og teim skrivum, ið kæran stuðlar seg til. At FK ikki hevur skipað ella sett síni skriv upp á sama hátt sum KE, hvørt einstakt brot nummererað, men gjørt ymiskt galdandi í mun til ymisku evnini, merkir ikki, at kæran ikki snýr seg um hesi grundleggjandi viðurskifti. Soleiðis er í fleiri umførum gjørt galdandi, at grundarlag ikki er fyri at staðfesta misnýtslu av ráðandi støðu, at heimild ikki er í § 11 til ætlaðu boðini og at talan er um serlig mál, tí loðslógin áleggur kommununi ikki bara veitingarskyldu í mun til loðsin, men eisini loðsflutningin, sum kommunan kann standa fyri, sum kommunan kann bjóða út, gera avtalu við privat um e.l.

FK hevur fleiri ferðir og eisini á fundunum við KR tann 22. august og 11. oktober 2018 ført fram og víst á, at heimild er ikki í kappingarlógini fyri at áleggja einari loðsstøð og einum havnamyndugleika at brúka ávísan privatan veitara, tá tann privati ynskir tað – eisini hóast loðslógin ikki setir til viks kappingarlógina.

Prógvbyrðuna fyri, at § 11, stk. 1 um misnýtslu av ráðandi støðu, hevur KE. Henda metir FK framhaldandi ikki er lyft, tá talan er um lógarfesta veitingarskyldu og har kommunan kann vísa á, hví og hvussu kommunan velur flutning frá tíð til aðra. Fk skal her aftur vísa til tað, sum er ført fram fleiri ferðir, m.a. í skrivinum frá 15. juli 2018 um, at KE ikki hevur ávíst at FK hevur, ella hevur ætlað at reingja nakra kapping og at sakligar orsøkir eru frá tíð til aðra hjá FK at velja millum ymisku bátarnar.

Kommunan hevur harvið víst á eina røð av sakligum grundum fyri at velja millum ymsiku veitararnar, alt frá logistikki í havnini til reaktiónstíð, tænastustøði og praktisk atlit, herundir at fleiri loðsbátar ikki verða á fjørðinum í senn, tí fleiri umboðsmenn hava skip har í senn. Onki av hesum hevur KE tikið við ella atlit til, annað enn at KE (ikki KR) skúgvar hetta til viks sum almen atlit heldur enn sakligar grundgevingar.

Kommunan er tí ikki samd í, at kommunan ger sær dælt av síni støðu, sum tann, ið hevur tørv á loðsflutningi, tvs. hvørki til egnan fyrimun ella til fyrimun fyri onnur.

Her er annars at viðmerkja, at KE generelt tykist halda, at tað er FA, sum hevur tørv á loðsflutningi. FK metir ikki, at hetta er røtt útlegging av faktisku ella juridisku støðuni, tí FA umboðar skip, ið tørva loðs. Síðan er tað loðsstøðin, ið hevur myndugleikan og ræðið á at loysa loðsuppgávuna, undir hesum eisini at skipa fyri at flyta egnar loðsar til og frá. Tað er her, at KE/KR og FK ikki fata støðuna eins, og tað er her KE einans tykist síggja málið frá sjónarhorninum hjá FA.

Hóast kappingarlógin § 22, nr. 1-6, sum § 11, stk. 4 vísir til, eru dømi um boð, so skulu boð vera heimilað og proportional.

FK ger galdandi, at í hesum máli er ikki talan at forða órímiligum handilstreytum, at lova veitara framat infrakervi ella faciliteti (havn, floghavn, neti e.l.), at krevja, at ein seljari eisini selur til ávísan keypara til vanligar treytir. Hinvegin snýr málið seg um at KR vil krevja ein keypara av veiting (FK) at keypa/útvega tænastu frá ávísum veitara, ið sambært KE skal eitast at hava sjálvsøgd rættindi at selja. Hetta fer út um tað, sum § 11, stk. 4, sbrt. § 22, nr. 1-4 heimilar, og sum er tilsvarandi áseting sum § 16, stk. 1, nr. 1-4 í donsku kappingarlógini. Í donsku kommenteraðu kappingarlógini verður greitt ávíst (s. 776 til § 11, stk. 4 og s. 1196 til § 16 í 4. útg.), at boð um at selja til vanligan prís kunnu rúmast innan § 16, meðan boð um at skula keypa vøru/tænastu ikki kann heimilast í § 16 (okkara § 22).
FK ger tí galdandi, at boðini sambært kærdu avgerðini um at gevast at nýta aðrar veitarar enn FA til flutning av kommunalum starvsfólkum samstundis eru at líkna við kravboð um at nýta FA. Slíkt er ikki heimilað í § 11, stk. 4, sbr. § 22, ikki grundað, ikki neyðugt og úti av proportiónum í mun til at fremja kapping innan flutning av loðsum, í tann mun tað annars gevur meining at kappast um slíka veiting, sum er partur av veitingarskylduni hjá FK sambært lóg.

Viðvíkjandi fyrispurninginum frá KE til Uttanríkis- og Vinnumálaráðið, so er FK ikki samd í, at KE bara kann loyva sær at spyrja UVMR um § 2, stk. 4 í kappingarlógini. Tað kann KE heldur ikki hava hildið, tá KE tann 30. mars 2017 spurdi aðalráðið um loðslógina og síðan legði aftursvarið frá 6. apríl 2017 frá UVMR til grund og hevur gjørt tað síðan.

Leggjast má enn sum áður til grund, at veitingarskyldan eftir loðslógini greitt fevnir um loðsflutning, umframt sjálvan loðsin. Tá er, eins og vit fleiri ferðir hava ført fram, eingin privatur ella annar, ið kann fyriskipa loðsflutning ella hava røði á nøkrum loðsflutningi. Loðsflutningur verður við øðrum orðum bara aktuellur, tá kommunala loðsstøðin tekur avgerð um, at nú skal loðsur teirra flytast til ella frá.

Á síðu 2 í ummælinum førir KE fram, at FK vildi hava KE, at spyrja, um UVMR, um tað var so, at loðsflutningur onki hevði við loðsing av gera. Hetta er rætt, men FK bað eisini KE venda sær til VMR og spyrja, um loðslógin skal skiljast soleiðis, at tað sambært loðslógini er upp til privat at gera avtalur um flutning av kommunalur loðsunum, og at loðsstøðin skal hava skyldu at brúka ávísan bát hjá privatum veitara, alt eftir hvørjir agentar hava avtalur við skip, ella um agentar hava framíhjárættindi uttan víðari. Tá vildi samstundis verið viðkomandi at spurt, um ella hvussu ein veitari kann hava slíkan sjálvsagdan rætt at flyta kommunalu loðsarnar, sum KE í tilmælum sínum hevur ført fram, um kommunan eins væl kundi átt loðsbát ella útveitt uppgávuna. Hetta bleiv ongantíð spurt. Tað vildi KE eftir øllum at døma ikki, men tíbetur kemur UVMR inn á hesi viðurskifti, sí svar teirra.

Umráðandi er at hava fyrilit fyri, at UVMR hevur einki staðfest um kappingaravmarking ella misnýtslu, men bara svara einum leiðandi spurningi frá KE um § 2, stk. 4 í lógini.

Um mannagongdina í § 2, stk. 5 er annars at siga, at grundarlag er ikki í kappingarlógini fyri at siga, at mannagongdin er reserverað til føri, har t.d. UVMR mátti svara, at ein kappingaravleiðing er ein beinleiðis ella neyðug fylgja av eini almennari regulering. Vísast skal til serligu viðmerkingarnar á s. 19 í løgtingsmáli 110/2006 (løgtingslógaruppskotið til kappignarlógina), sum vísir eitt breiðari nýtsluøki. Soleiðis hevur KE væl eisini skilt møguleikan at spyrja, t.d. tá spurt var í 2017, tí er enn sum áður ein møguleiki, at málið verður heimvíst við boðum um at royna møguleikan eftir § 2, stk. 5 í kappingarlógini og leggja málið fyri UVMR aftur.

Viðvíkjandi fundinum í KR og teirri fundarfrásøgn, ið KE leggur við umælisskrivinum er at siga, at vit ikki duga at síggja, at henda er viðløgd upprunaliga. Henda er tó móttikin eftirfylgjandi d.d. beint áðrenn evstamark at svara, og FK hevur tí ikki havt høvi at gera viðmerkingar til hana. Evt. viðmerkingar verða tí senda Vinnukærunevndini skjótast gjørligt.

Á báðum fundunum í KR gjørdi undirritaði og serliga havnameistarin annars viðmerkingar til og greiddi frá um, hvørji viðurskifti á fjørðinum frá tíð til aðra grundaðu val av báti og hví óhepnar støður kundi koma í, um FK altíð fyrst skuldu kanna, hvør var agentur fyri síðan at biða loðsin fara umborð á bátin hjá agentinum.
Viðvíkjandi partsstatus hjá øðrum, sum ikki eru hoyrd, so er tað helst fyrst og fremst Sp/F Pilot, ið talan kann verða um, tí tað felagið hevur havt nógvar uppgávur á fjørðinum í sambandi við loðsflutning.

Felagið Faroe Agency (FA) fær við avgerðini hjá KR einkarrætt til 60-70 % av øllum loðsflutningi uttan víðari – uttan at kommunan hevur ávirkan og uttan at onnur kunnu bjóða seg fram til somu túrar. Hetta er grundað á avtalur, ið vit hvørki hava sæð ella kenna til – heldur ikki KE/KR. Tá hava aðrir aktørar, ið bjóða flutning av loðsi fram á fjørðinum individuellan og týðandi áhuga í málinum, tí hetta tekur 60-70 % av tænastunum burtur so at eingin kapping kann vera um tann partin og hetta vil sjálvandi merkjast væl hjá aktørunum, serliga Sp/F Pilot.

KE grundgevur fyri noktandi innliti til Sp/F Pilot og noktan at viðurkenna Pilot sum part, at avgerðin rakar allar loðsbátatænastur í landinum, men uttan at meta um týdningin fyri hetta eina felagið, sum er óbeinleiðis orsøkin til alt málið, tí FA eisini vil hava tann flutningin, sum Pilot hevur havt.

Tá KE grundgevur við, at orsøk er ikki at víkja frá meginregluni um, at bara móttakarin av avgerð er partur/hevur rætt til innlit, so er hetta ikki rætt.

Tað er eingin meginregla eftir § 27, stk. 2, í kappingarlógini um kæru, at bara móttakari av avgerð hevur kærurætt. Tvørturímóti er talan um javnbjóðis kærurætt til tey, sum hava týðandi individuellan áhuga í málinum, og tað má man um nakað merkja, at tann veitarin, um kærumálið reelt snýr seg um, og sum við avgerðini missur rættin av kappast um 70% av flutninginum í økinum, hevur partsstatus. KE vísir til avgerðina hjá UVMR frá 10. september 2018, men her er at viðmerkja, at UVMR bara vísir til sjónarmiðini hjá KE. Tá KE leggur kærurættin út til eina meginreglu fyri móttakara av avgerðini og so undantaksvís til onnur, so er tað ikki rætt. Av somu orsøk kann dentur tí heldur ikki leggjast á svarið frá UVMR.

Tí verður heitt á Vinnukærunevndina at hava atlit til henda partin – eisini hóast KE og UVMR ikki vilja geva viðkomandi innlit, tí teirra meting av Sp/F Pilot sum parti bindir ikki Vinnukærunevndina. Vísast kann annars til s. 1290f. í Konkurrenceloven med kommentarer um sama.

Viðvíkjandi umsitingarligari forðing sigur KE kommununa hava sett í verk mannagongd viðvíkjandi at kontakta skip hjá FA og at hetta bara rakar hesa fyritøkuna. Sum FK m.a. á fundinum í oktober við KR førdi fram og áður hevur skrivað til KE, so er her ikki tikið atlit til, at ógreiðan um hvørjir bátar skulu sleipa, føra loðs og annars virka á fjørðinum hevur snúð seg um føri, har FA er umboð og krevur at flyta loðsar hjá kommununi. KE tekur ikki – hvørki í notatinum frá 15. august 2018 ella tilmælinum – atlit til tað rímiliga og forsvarliga í, at loðsstøðin fær hetta avklárað við FA ella annan umboðsmann, ið setir fram slík ynski og krøv, tí annars er ikki havnameistaranum greitt, hvørs kal brúkast til hvat á fjørðinum og hvørji ørindini hjá ymisku førunum eru. Hetta hevur tí einki við gjaldskyldu fyri loðs ella loðsflutning at gera (sí notatið hjá KE frá 15/8), ella við tað at gera, at havnameistarin annars fær kravdar upplýsingar um skip, ið koma í havn.

Annars hevur FK víst á, at tørvurin á slíkari avkláring er generellur og vil vera galdandi fyri allar aktørar, ið hava serlig ynski um sleip ella annað, tí annars valdar skjótt óskil á fjørðinum, soleiðis sum havnameistrin eisini í tveimum umførum hevur greitt KR frá á fundi.

Hetta hevur tí við vit og skil og trygd á fjørðinum at gera, sí eisini viðmerkingar okkara frá 15. juli 2018 til KE (s. 3/10), og tí er ikki talan um "alment innlit" (sum KE metir), men sakligar grundgevingar fyri, at ein loðsstøð frá tíð til aðra velur sín loðsflutning.

KE førir fram at FK ikki hevur sett spurnartekin við viðkomandi vørumarknaðin, ráðandi støðu ella misnýtslu av ráðandi markaðarstøðu í avgerðini. Hesum er FK ikki samd í.

Í skrivi okkara frá 15. juli 2018 er sostatt á s. 7 og 9 (til pkt. 12, 13, 112, 113 og 118 í tilmælinum hjá KE) víst á, at alternativir møguleikar eru at bunkra tungolju og at vøra kann verða og verður flutt via veganetið. Tá so er, er FK ikki samd við útleggingini hjá KE av viðkomandi vørumarknaðinum.

Fk er heldur ikki samd við KE í teirra útlegging av ráðandi støðu og misnýtslu av evt. ráðandi støðu. Sum Uttanríkis- og vinnumálaráðið eisini vísir á, so skal flutningurin av kommunala loðsinum síggjast sum ein heildarpartur av tí at hava veitingarskyldu í mun til loðs. Hetta hevur FK ført fram frá byrjan, og hetta er tað, sum UVMR svarar við at tengja loðsflutning at tí at loðsa sum heild. Kortini hevur KE alla tíðina vilja skilt loðsing og loðsflutning at, fyri at loðsflutningur harvið kann verða lýstur sum eitt hvørt vanligt keyp av tænastum. Hesum er grundarlag ikki fyri.

Rættari er at siga, at innan loðsflutning sum part av loðsingini og harvið veitingarskylduni hjá FK, er ikki talan um frían marknað. Havnin/loðsstøðin hevur sambært loðslógini uppgávuna og kann loysa hana við egnum báti, kann lata flutningsuppgávuna til onnur um hetta er ynskiligt, á sama hátt sum við loðsinum. Loðsstøð kann sostatt gera avtalur við privat fyri t.d. ávíst áramál, og harvið vildi agentar/umboðsmenn og onnur ikki kunna kravt sína serskylda part framíhjá.

Sama er um loðsstøðin valdi at bjóða uppgávuna út og onkur veitari vann útboðið av tí at flyta kommunalar loðsar.

Tí er hvørki talan um ráðandi støðu, men lógarfesta veitingarskyldu, sum kann verða loyst á ymiskar mátar eftir avgerð frá loðsstøðini. Harvið er heldur ikki (sum ført er fram fleiri ferðir, herundir í kæruni) talan um nakra misnýtslu av ráðandi støðu.

Samanumtikið verður aftur heitt á Vinnukærunevndina um at ógilda avgerðina hjá KE, alternativt at heimvísa málið til nýggja viðgerð grundað á tey viðurskifti, ið FK hevur ført fram.

Heitt verður á Vinnukærunevndina um at útvega avrit av gerðabókunum frá fundinum 11. oktober (og august), sbt. § 13 í kunngerðini um kappingarráðið.

Kappingareftirlitið
Í skrivi frá 12. desember 2018 kemur Kappingareftirlitið við viðmerkingum til skrivi frá kæruumboðnum.

Kappingareftirlitið vísur á, at Fuglafjarðar kommuna í viðmerkingunum rør fram undir, at tað nú er skrivstovan sum ummælir, meðan Kappingarráðið, sum er veruligi myndugleikan, er óvitani um ummælið. Til hetta skal sigast, at Kappingarráðið hevur bæði fingið kæruritið frá Fuglafjarðar kommunu og ummælið frá Kappingareftirlitinum.

Víst verður annars til kunngerð nr. 8 frá 13. mars 2008 um starvs- og fundarskipan fyri Kappingarráðið, sum lýsir arbeiðsbýtið millum ráð og eftirlit, og kunngerð nr. 7 frá 13. mars 2008 um virksemið hjá Kappingareftirlitinum, sum lýsir dagliga virksemið hjá Kappingareftirlitinum. Í § 5 í seinnu kunngerðini framgongur, at tað er Kappingareftirlitið, sum ger skrivlig innlegg til kæruviðgerðina og leggur til rættis eina munnliga málevnisumrøðu, um hetta gerst neyðugt.

Verður hugt eftir, hvussu mannagongdin er í donskum kærumálum innan kapping, har okkara skipan við einum Kappingareftirlitið og Kappingarráðið stavar frá, so er vanligt har, at danska Konkurrencerådet er umboðað av einum starvsfólki frá Konkurrencestyrelsen, meðan eitt starvsfólk frá Erhvervsstyrelsen undirskrivar vegna Konkurrenceankenævnet. Hvørki í føroysku ella eftir donsku skipanini er tað uppgávan hjá ráðslimum at málsviðgera.

Tað tykist, sum Fuglafjarðar kommuna leggur stóra áherðslu á, at Kappingareftirlitið skal hava tulkað partar av loðslógini skeivt. Partar, sum onki hava við § 2, stk. 4 fyrispurningin at gera. Her verður serliga hugsað um spurningin, hvørt loðsing og loðsflutningur hanga saman ella ikki.

Fuglafjarðar kommuna heldur uppá, at Kappingareftirlitið hevur sagt, at hesi bæði onki hava við hvørt annað at gera. Kappingareftirlitið kennir ikki hetta uppáhald aftur. Kappingareftirlitið hevur lagt áherðslu á, at talan er um tvær ymiskar tænastur, har sami keypari rindar til tveri ymsikar seljarar.

Somuleiðis skal vísast á, at hvørki Kappingareftirlitið, Fuglafjarðar kommuna ella Kommunufelagið varða av hesum lógarøki, og tí hevur Kappingareftirlitið sett fyrispurning sambært § 2, stk. 4 í kappingarlógini og harvið fingið greiðu á tí, sum hevði týdning í hesum máli. Hvørki Fuglafjarðar kommuna ella Kommunufelagið kunnu skjalprógva, at teirra tulking av hesum pørtum av loðslógini er røtt.

Men grundleggjandi er at siga, at spurningurin umhvørt Kappingareftirlitið hevur lýst loðslógina rætt ella ikki, hevur lítlan og ongan týdning fyri niðurstøðuna í hesum máli. Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur staðfest, at tann framferð, sum Fuglafjarðar kommuna hevur í hesum mál, er ikki ein beinleiðis ella neyðug fylgja av loðslógini.

Fuglafjarðar kommuna vísir á, at kommunan hevur víst á eina røð av sakligum grundum fyri at velja ymisku veitarnarnar, men at Kappingarráðið skúgvar hesar til viks. Hartil er at siga, at tað er Fuglafjarðar kommuna, sum hevur prógvbyrðuna fyri, at tann framferðin, sum kommunan hevur havt, hevur verið objektivt neyðug. Kommunan hevur reksað upp nøkur viðurskifti, men ongantíð grundgivið fyri sínum pástandi ella lagt nøkur prógv fram til at stuðla sínum pástandi.

Í loðslógini eru freistir ásettar, sum geva Fuglafjarðar kommunu rúmt rásarúm at skipa fyri loðsingini. Tað, at kommunan velur at seta sær sjálvari harðari servicekrøv, sum síðani hevur við sær, at bert bátar, sum eru á fjørðinum kunnu brúkast, kann ikki verjast við, at kommunan er áløgd eina loðsskyldu. Kappingarráðið sær tí hetta sum eina tekniska forðing, hvørs endamál og avleiðing er at skapa eina støðu, har staðbundna felagið gerast einasti valmøguleikin.

Í fimta reglubroti á síðu 2 roynir Fuglafjarðar kommuna at afturvísa staðfestingina í ummælinum hjá Kappingarráðnum um, at Fuglafjarðar kommuna ikki hevur nortið við bulin í málinum, ið er, at staðfest er ein marknaðarráðandi støða, og at ráðandi støðan er misnýtt. Fuglafjarðar kommuna vísir á, at teirra skriv var skipað á ein serligan hátt, men at kæran veruliga eisini snýr seg um hesi grundleggjandi viðurskifti. Hetta kann burturvísast beinanvegin. Kappingarráðið hevur lyft prógvbyrðuna fyri, at Fuglafjarðar kommuna hevur eina ráðandi marknaðarstøðu, og at henda støða er misnýtt. Tá myndugleikin fyrst hevur lyft prógvbyrðuna, so krevst meir enn ein uppreksan av ymiskum viðurskiftum til at flyta prógvbyrðuna aftur á Kappingarráðið.

Í reglubrotunum 3-5 á síðu 6 verður sagt, at grundarlag er ikki fyri at geva tey boð, sum Kappingarráðið gevur í síni avgerð. Fuglafjarðar kommuna sigur, at kommunan er keypari av loðsflutningi, og tí er í veruleikanum talan um, at ein marknaðarráðandi fyritøka verður áløgd at keypa eina vøru, og í hesum sambandi verður sagt, at tað greitt stendur í bókini Konkurrenceloven med kommentarer at slík boð eru ikki heimilað í kappingarlógini.

Í fyrsta lagi er her talan um eina vranga útlegging av, hvør er keypari í hesum máli. Keyparin er tann, sum rindar fyri tænastuna. Sambært § 13, stk. 3 í kunngerð nr. 153 frá 21. desember 2012 um loðsing, gjøld o.a., so er tað antin P/F Faroe Agency ella reiðaríið, sum rindar loðsbátafelagnum fyri loðsflutningin. Leikluturin hjá kommununi er at vera samskipari av loðsingini.

Í øðrum lagi skal vísast á grundgevingina fyri, at keypspligt ikki eigur at kunna áleggjast er, at við eini keypspligt verður fyritøka áløgd at **rinda pening** fyri eina vøru uttan at hava ávirkan á kvalitet, kvantitet og prís, meðan við eini salgspligt verður álagt einari fyritøku at lata vøur til ein keypara eftir vanligum handilsligum treytum. Tann, sum verður álagdur sølupligt fær sostatt pening sum mótveiting, meðan tann, sum verður álagdur keypspligt fær eina vøru sum mótveiting, sum kann svinga í bæði dygd og nøgd.

Seta vit hetta upp ímóti hvør avleiðingin fer at verða um ávikavist Kappingarráðið ella Fuglafjarðar kommuna fær viðhald, so er greitt, at um Fuglafjarðar kommuna fær sín vilja, so skal ein keypspligt áleggjast á øll reiðarí, sum hava brúk fyri loðsi. Hesi skulu áleggjast at keypa loðsflutning frá tí veitara, sum kommunan vísir á. Verður hinvegin avgerðin hjá Kappingarráðnum staðfest, so verður ein sølupligt áløgd á kommununa, ið skal veita loðs, uttan mun til hvør loðsbátur verður nýttur, afturímóti fær kommunan rinda eitt gjald, sum er ásett í lóggávuni. Her skal leggjast afturat, at reiðaríið hevur bert møguleika at vísa á bátar, sum eru blivnir góðkendir sum loðsbátar av Sjóvinnustýrinum.

Fuglafjarðar kommuna vísir fleiri staðni í skrivinum á, at avleiðingin av hesi avgerð verður, at ein veitari kemur at seta seg á mest sum allan marknaðin, og at veitarar allastaðni í landinum nú verða avskornir. Hetta kann avvísast. Avleiðingin av hesi avgerð verður, at veitarar úr øllum landinum kunnu virka í øllum havnum og kappast við aðrar veitarar um kundar. P/F Faroe Agency hevur bert tveir bátar, og flest onnur umboðsfeløg hava ikki slíkar bátar. Loðsbáta- og sleipibátaeigarar kunnu sostatt venda sær bæði til tey reiðarí, sum umboðsfeløgini umboða, og eisini kappast um at vera undirveitarar hjá umboðsfeløgunum.

Í reglubroti 6 á síðu 3 verður sagt, at tað er ikki rætt, tá ið Kappingarráðið sigur, at spyrjast kann bert eftir § 2, stk. 4 í kappingarlógini. Sum prógv fyri hesum verður víst til gamla niðurlagda málið. Hetta er ein vreingjan av tí, sum Kappingarráðið hevur sagt í sínum ummæli og ein villeiðandi útlegging av teimum faktisku og løgfrøðiligu viðurskiftum, sum vóru í gamla málinum. Kappingarráðið hevur víst á, at § 2, stk. 4 í kappingarlógini heimilar, at spurt verður um ein kappingaravmarking er ein neyðug ella beinleiðis fylgja av eini almennari regulering, og ikki um allar aðrar partar av loðslógini, sum Fuglafjarðar kommuna hevur áhuga at fáa greiðu á. Talan er um eina heimild, sum beinleiðis áleggur landsstýrismanninum at svara, men bara í mun til § 2, stk. 4 í kappingarlógini.

Í reglubroti 3 á síðu 4 verður sagt, at § 2, stk. 5 í kappingarlógini hevur eitt breiðari nýtsluøki enn í teimum førum, har UVMR hevur svarað at ein kappingaravmarking er ein beinleiðis ella neyðug fylgja av eini almennari regulering. Helst verður sipað til síðsta reglubrot í ummælinum hjá Kappingarráðnum. Tað, sum Kappingarráðið hevur sagt er, at nú fyriliggur ein váttan frá UVMR um, at tann kappingaravmarking, sum er staðfest, ikki er ein beinleiðis ella neyðug fylgja av eini almennari regulering. Tá er eisini óneyðugt at venda sær til UVMR við einum fyrispurningi um at broyta lógina soleiðis, at áðurnevnda kappingaravmarking ikki kann fara fram. Somuleiðis skal vísast á, at loðsskyldan verður umsitin øðrvísi í Klaksvík, Runavík og Tórshavn.

Fuglafjarðar kommuna vísir eisini í hesum skrivi á, at kommunan heldur, at staðbundna felagið átti at verið viðurkent sum partur í hesum máli. Tað er at undrast á hví hetta hevur týdning fyri Fuglafjarðar kommunu í sambandi við, at málið er kært til Vinnukærunevndina.

At enda skal viðmerkjast, at tað tykist, sum Fuglafjarðar kommuna hevur misskilt avgerðina hjá Kappingarráðnum. Avgerðin snýr seg í stuttum um, at Fuglafjarðar kommuna hevur framt brot á § 11 í kappingarlógini við at sýta P/F Faroe Agency at standa fyri loðsflutningi og sleip fyri skip, sum felagið umboðar, og at hava sett umsitingarliga forðing fyri P/F Faroe Agency í sambandi við sleip. Fyri at fáa marknaðin í Fuglafirði at virka aftur, hevur Kappingarráðið givið Fuglafjarðar kommunu boð um, at steðga við at nokta P/F Faroe Agency at útinna tænastur fyri tey reiðarí, sum felagið umboðar.

Fuglafjarðar kommuna leggur hetta út sum um, at allar kommunur nú hava mist síni rættindi í sambandi við loðsing og loðsflutning. Tey boð, sum Kappingarráðið hevur givið, eru givin, tí Fuglafjarðar kommuna hevur framt brot á § 11 í kappingarlógini og umstøðurnar annars í málinum geva ábending um, at neyðugt er at geva slík boð fyri at tryggja ein opnan marknað í Fuglafirði. Boðini hava onga búskaparliga avleiðing fyri Fuglafjarðar havn, og hava til endamáls at skapa somu kappingarligu umstøður, sum eru í Klaksvík, Tórshavn og Runavík, har loðsskyldan verður umsitin á ein minni kappingaravlagandi hátt.

Viðvíkjandi kontraktum millum P/F Faroe Agency og tey reiðarí sum teir umboða, so hevur Fuglafjarðar kommuna sátt iva um hesi konktraktforhold fyriliggja. P/F Faroe Agency hevur í trúnaði latið Kappingareftirlitinum innlit í hesar kontraktir, og um Vinnukærunevndin, um hon ynskir tað, kann fáa innlit í. Tað er tó sjálvsagt, at hesar kontraktir ikki mugu koma øðrum til kunnleika, tí hesar eru handilsloyndir hjá P/F Faroe Agency.

Í samband við viðgerðina hjá Vinnukærunevndini av hesum máli, vil Kappingareftirlitið biðja um møguleika at hava munnlig innlegg fyri Vinnukærunevndini, sbrt. § 4, stk. 3 í løgtingslóg nr. 17 frá 8. mai 2008 um Vinnukærunevnd.

Viðmerkingar frá P/F Faroe Agency
Við skrivi frá 12. desember 2018 hevur advokaturin hjá P/f Faroe Agency gjørt viðmerkingar til málið. Hann sigur seg viðmerkja partar burturúr skrivinum frá 10. desember 2018 hjá Sókn Advokatum, har P/F Faroe Agency beinleiðis verður nevnt.

"Skrivið frá Sókn Advokatum nevnir, at grundgevingar eru fyri, hvørjir loðsbátar verða valdir, og hví bátarnir hjá klienti mínum ikki altíð verða valdir. Sagt verður m.a. at tað veldst um, hvørjir bátar eru tøkir og nær, at klientur mín ikki altíð er á fjørðinum, at skip hava skund at fara avstað, og samanumtikið eru sakligu grundgevingarnar alt frá logistikki í havnini til reaktiónstíð, tænastutíð og praktisk atlit.

P/F Faroe Agency kennir ikki við hesar grundgevingar, í øllum førum hevur felagið ikki fingið nakra av hesum grundgevingum fyri í einstum førum at frávelja bátarnar hjá felagnum sum loðsbátar. Støðan er hinvegin tann, at bátarnar hjá P/F Faroe Agency greitt og konsekvent í longri tíð eru blokeraðir av havnini og fingið greitt at vita, at teir skulu halda seg burtur frá loðsuppgávunum, tí havnin hevur annan bát á staðnum, "Pilot", at taka sær av hesum. Klientur mín hevur ongantíð fingið nakra fráboðan frá havnini og heldur ikki frá teimum reiðaríum, sum felagið er agentur fyri, at bátarnir hjá felagnum ikki eru fleksiblir nokk, bæði í reaktiónstíð og á tænastustøði annars. Tvørturímóti er tað fleiri ferðir komið fyri, at skipini, sum klientur mín umboðar, beinleiðis hava frábiðið fær "Pilot" sum loðs- og sleipibát, tí hann er ov lítil. Men einki hjálpir, "Pilot" skal fyri alt í verðini hava uppgávurnar fyri skipini, sum P/F Faroe Agency umboðar.

Grundgevingarnar hjá kommununi hevur kommunan funnið fram til rætta høvið nú í sambandi við, at Kappingareftirlitið og Kappingarráðið hevur tikið máli upp. Men grundgevingarnar eru uttan nakað reelt innihald. Í øllum førum hevur P/F Faroe Agency ikki fingið nakra grundgeving

fyri, at felagið ikki fær loyvi til at servisera egin skip, hóast bátarnir hjá felagnum hava allar neyðugar góðkenningar sum loðsbátur frá Sjóvinnustýrinum.

Ein onnur grundgeving, sum gott nokk ikki framgongur av nevnda skrivi frá Sókn Advokatum, men sum var at hoyra í Kringvarpinum í samrøðu við borgarstjóran í Fuglafirði í sambandi við, at Kappingarráðið hevði tikið sína avgerð. Tá nevndi borgarstjórin, at trygdin á fjørðinum eisini var avgerandi fyri kommunua. Sum nevnt hava bátarnir hjá P/F Faroe Agency allar góðkenningar og somuleiðis trygdargóðkenningar. P/F Faroe Agency hevur ongantíð fingið nakra kunning ella áheitan frá kommununi ella havnini um at hava bjargingarroyndir saman við havnini. T.v.s. aftur ein grundgeving, sum er drigin upp úr hattinum í eini roynd at rættvísgera ólógligu blokaduni av loðsbátunum hjá klienti mínum til fyrimuns fyri staðbundna bátin "Pilot". Eingin saklig grundgeving finst fyri konsekvent at halda klienti mínum burtur av havnini, og hví bara báturin "Pilot" kann nýtast.

Kommunan er eisini ónøgd við, at Sp/f Pilot ikki hevur fingið partsstatus og er hoyringspartur og er ónøgt við, at ikki verður kapping um stóran part av tænastunum á fjørðinum, og at hetta merkist hjá Sp/f Pilot.

Hetta vísir júst, at kommunan verjir staðbundna felagið. Hetta vísir, at kommunan ikki virðir ta fríu kappingina á marknaðinum innanfyri agentvirksemi innan shipping. P/F Faroe Agency er í fríari kapping við onnur líknandi feløg á marknaðinum, og tað er eydnast felagnum at fáa avtalur í lag við fleiri reiðarí, harímillum russisk reiðarí. Hetta er ein partur av fríu marknaðarkreftunum, sum kommunan nú setir úr gildi við at taka frá felagnum og lata til Sp/f Pilot, sum ikki nýtist at luttaka í kappingini á jøvnum føti við klient mín. Sp/f Pilot nýtist ikki at vera í kapping, tí felagið er í einari monopolstøðu orsakað av atburðinum hjá kommununi.

Tað vísir seg tíverri, at gamla og vælkenda samtyktin í vinnunevndini hjá Fuglafjarðar kommunu, sum seinni varð staðfest av Fuglafjarðar býráð í 2014, framvegis spøkir og reelt framvegis er galdandi. Býráðið tók av samtyktina, men tað vísir seg bert at vera á pappírinum. Reelt, og tað er sjón fyri søgn, er samtykin framvegis galdandi, og kommunan og havnin fremja framhaldandi og hava enntá bert sína ráðandi støðu og brot á kappingarlógina til fyrimuns fyri staðsetta bátin "Pilot".
Í skrivinum verður eisini viðmerkt um umsitingarligar forðingar, sum kommunan setir í verk við at kontakta skip hjá P/F Faroe Agency. Tað er eingin orsøk hjá kommununi at kontakta hesi skipini, sum P/F Faroe Agency umboðar. Kommunan er fullvæl vitandi um øll hesi skipini, sum P/F Faroe Agency umboðar. Eingin seriøsur agentur, sum klientur mín metir seg vera, fer at halda uppá at umboða eitt skip, sum hann veruliga ikki umboðar. Kommunan kann heldur neyvan vísa á nakað dømi um nakran ítøkiligan trupulleika, har ivi er um, at klientur mín umboðar viðkomandi skip. Um tað skuldi komið fyri í ávísum førum, skal kommunan prógva tað, og ikki hinvegin agenturin í hvørjum einstøkum føri. Eisini kann leggjast afturat, at klientur mín umboðar hesi skipini grundað á privatrættarligar vinnuavtalur, sum eingir orsøk er til, at kommunan fær innlit í. Klientur mín hevur goldið vegna øll hesi skipini øll árini til kommununa, sum samstundis eisini vísir kommununi, at felagið umboðar hesi skipini og heldur sínar gjaldsavtalur vegna skipini sum agentur.

Tað var ikki nokk við, at kommunan setti umsitingarligar forðingar í verk. Sp/f Pilot setti seg beinleiðis í samband við kundarnar hjá klinti mínum við góðum stuðli frá kommunini og var harvið í ferð við at oyðileggja forrætningina hjá klienti mínum. Hetta skapti stórar trupulleikar fyri klientin.

Vegna P/F Faroe Agency verður heitt á Vinnukærunevndina um at staðfesta avgerðina hjá Kappingaráðnum."